# Rúsdrekka- og rúsevnispolitikkur Føroya

Heilsumálaráðið
Juli 2015

# Rúsdrekka- og rúsevnispolitikkur Føroya

# Formæli

Vegna Føroya landsstýrið leggi eg við hesum fram Rúsdrekka- og rúsevnispolitikk Føroya.

Flestu grannalond okkara hava seinastu 3-4 árini evnað til nýggjar heildarætlanir á rúsdrekka- og rúsevnisøkinum. Hetta hevur verið gjørt, tí stjórnirnar í hesum londum ásanna, at enn krevur skaðiliga nýtslan av rúsdrekka og rúsevnum ov nógvar mannalagnur. Landsstýrið hevur somu áskoðan. Í samgonguskjalinum millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin, Miðflokkin og Sjálvstýrisflokkin frá 14. november 2011 varð tí sett út í kortið, at *"Ein greiður rúsdrekka – og rúsevnapolitikkur skal orðast."*

Í arbeiðinum at evna til rúsdrekka- og rúsevnispolitikkin hava verið ein røð av hoyringsfundum við viðkomandi myndugleikar, stovnar, ráð, fyritøkur, privatar felagsskapir og áhugafelagsskapir. Endamálið við hesum fundum hevur m.a. verið at fáa vitan og hugskot til innihaldið í politikkinum og at skapa betur rótfesti undir arbeiðinum. Vónandi kenna tey flestu seg aftur í tí, sum framleitt er. Tó so, nógvir tættir eru í hesum politikki, og atlitini eru ymisk, og tí er ikki altíð semja millum tey, ið hava áhuga fyri og virka á økinum.

Eg fari við hesum at takka øllum teimum, sum hava luttikið í arbeiðinum við at orða henda Rúsdrekka- og rúsevnispolitikk fyri áhugaverdar og dygdargóðar viðmerkingar.

Mín vón er, at hetta skjal verður eitt gott grundarlag at skifta orð um, hvussu vit á bestan hátt frameftir kunnu fyribyrgja avleiðingarnar av skaðiligari nýtslu av rúsdrekka og rúsevnum.

Karsten Hansen
landsstýrismaður

# Innihald

**Formæli** ........ 2

**Kapittul 1 – Samandráttur** ........ 6

1.1 Samfelagsligar avleiðingar av rúsdrekkaovurnýtslu ........ 7

1.3 Skulu framvegis hava ein tálmandi rúsdrekka- og rúsevnispolitikk ........ 8

1.4 Ein lesivegleiðing ........ 9

1.5 Verkætlanarbólkur, tilvísingarbólkur, stýringsbólkur, fakligur ráðgevi ........ 10

**Kapittul 2 – Støðulýsing og gongdin á økinum** ........ 11

2.1 Søguligt baksýni ........ 11

2.1.1 Broytingar síðani 1992 ........ 12

2.2 Gongdin í rúsdrekkanýtsluni í Føroyum 1970-2014 ........ 13

2.2.1 Miðalnýtslan ........ 13

2.2.2 Nýtslan býtt á aldur og kyn ........ 15

2.2.3 Rúsdrekkavanar millum tey ungu ........ 16

2.2.4 Hvat drekka føroyingar? ........ 17

2.2.5 Miðalnýtslan samanborið við okkara grannalond ........ 18

2.2.6 Søla av rúsdrekka í Føroyum, sum ikki er skrásett ........ 19

2.3 Samanumtøka ........ 20

**Kapittul 3 – Rúsevnir** ........ 21

3.1 Innflutningur ........ 21

3.1.1 Nýggj rúsevnir og nýggir hættir at smugla ........ 22

3.1.2 Strangari lóggáva í Føroyum ........ 22

3.2 Skuggatøl og fjølmiðlasøgur um rúsandi evnir ........ 23

3.3 Upplýsing og hugburðsrøkt ........ 23

**Kapittul 4 – Stevnumið: Fyribyrging í øllum liðum** ........ 25

4.1 Heilsunýskipanin og fyrbyrging ........ 25

4.2 Tilmælini hjá WHO um fyribyrgjandi átøk á rúsdrekkaøkinum ........ 26

**Kapittul 5 – 10 ítøkilig átaksøkir** ........ 29

5.1 Átaksøki 1: Taka ábyrgd, tilvitan og útinnan ... 29
5.1.2 Nationalu tilmælini um rúsdrekkanýtslu ... 29
5.1.3 Málið er at minka miðalnýtsluna í Føroyum ... 30
5.2 Átaksøki 2: Atkoma ... 31
5.2.1 Einkarsøluskipan ... 31
5.2.1.1 Rúsdrekkasøla Landsins ... 33
5.2.1.2 Sølustøð ... 34
5.2.1.3 Krav um rakstraravlop ... 34
5.2.1.4 Játtanarskipanin ger einkarsøluskipanina ov stirvna ... 35
5.2.1.5 Varðveita einkarsøluna – tó neyðugt við tillagingum ... 36
5.2.1.6 Uppskot til broytingar í søluskipan ... 37
5.2.1.7 Samanumtøka søluskipan – heilsulig ella vinnulig atlit? ... 39
5.2.2 Loyvisnevnd og skeinkiloyvi ... 41
5.2.2.1 Útflýggingarstøð hjá bryggjaríum ... 42
5.2.3 Aldursmark ... 43
5.2.4 Tollfrí søla ... 43
5.3 Átaksøki 3: Marknaðarføring og forboð móti lýsingum fyri rúsdrekka ... 45
5.3.1 Ávaringartekstur ... 45
5.4 Átaksøki 4: Rúsdrekkakoyring ... 46
5.4.1 Lágt promillumark gevur úrslit ... 46
5.5 Átaksøki 5: Minka um skaðiligu árinini, tá ið drukkið verður ... 49
5.5.1 Minka um skaðiligu árinini, tá ið drukkið verður – Útskeinking við ábyrgd ... 49
5.6 Átaksøki 6: Rúsdrekkapolitikkir á arbeiðsplássum, ítróttarfeløgunum og kommunum ... 50
5.7 Átaksøki 7: Kampanjur og undirvísing í skúlum ... 51
5.7.1 Upplýsing um vandar við rúsdrekka í undirvísingini ... 52
5.8. Átaksøki 8: Prísásetan ... 52
5.9 Átaksøki 9: Fyribyrging og rúsdrekkaviðgerð í heilsuverkinum ... 53
5.9.1 Fyribyrging. Tiltøk í tøkum tíma – skjót interventión ... 54
5.9.1.1 Stutt ráðgevandi samrøða ... 55
5.9.2 Rúsdrekka- og rúsevnisviðgerð í Føroyum ... 55
5.9.2.1 Viðgerðartilboð í Føroyum ... 56
5.9.2.2 Hagtøl fyri viðgerðir á viðgerðarstovnunum ... 57
5.9.2.3 Ávísing til viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu ... 61
5.9.2.4 Játtan til viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu ... 62

5.9.2.5 Framtíðarviðgerðartilboð í Føroyum ........ 62
5.10 Átaksøki 10: Yvirvøka (monitorering) og eftirmetingar ........ 66

**Kapittul 6 – Fíggjarligar avleiðingar og ætlan fyri átøkini 2015-2020** ........ 70
6.1. Tilmælir og kostnaður ........ 70
6.2. Rúsevnir, ein støðulýsing ........ 70

**Kapittul 7 – Kelduyvirlit** ........ 77

**Kapittul 8 – Fylgiskjal – hoyringspartar** ........ 82

# Kapittul 1 – Samandráttur

Øll skulu hava møguleikan at vaksa upp og liva í Føroyum uttan at vera í vanda fyri at fáa skaða av egnari rúsdrekka- og rúsevnisnýtslu ella nýtsluni hjá øðrum. Á hesa súlu leggur landsstýrismaðurin í heilsumálum vegna landsstýrið fram nýggjan Rúsdrekka- og rúsevnispolitikk Føroya.

Rúsdrekka- og rúsevnispolitikkurin fellir, sum heitið sigur, í tveir meginpartar. Rúsdrekkapolitikkurin er eyðvitað nógv meira umfatandi enn parturin um rúsevni. Tá ið tað kemur til rúsevni – narkotisk evni – eru tey flestu samd um, at tað er rímiligt at hava eitt greitt forboð, og at vit sum samfelag eiga at arbeiða fyri at fáa einar rúsevnisfríar Føroyar. Gott samstarv er millum løgreglu og tollvald um at forða, at rúsevnir koma til landið, men tey, ið innflyta, finna støðugt nýggjar hættir at fáa euforiserandi evni á føroyska marknaðin. Tí er neyðugt áhaldandi at vera á varðhaldi, samstundis sum ávarað verður um skaðiligu árinini av rúsevnum.

Øðrvísi nógvir tættir eru í einum rúsdrekkapolitikki. Fjølbroyttar fatanir eru í spurningum um sølustøð, prísir, skeinkiloyvi og hvar markið gongur millum nýtslu og misnýtslu. Rúsandi løgir hava verið ein innbygdur partur av flestu mentanum í 1000 ár, og ein avmarkað nýtsla verður sum útgangsstøði ikki mett vera heilsuskaðilig fyri hin einstaka.

Nógv ymisk sjónarmið eru um rúsdrekka og rúsdrekkanýtslu, men helst eru øll samd um, at sleppast skal undan skaðiligari rúsdrekkanýtslu. Í WHO høpi verður hetta allýst sum nýtsla, ið skaðar tann, sum drekkur, heilsuliga og sosialt, fólkini kring hann og samfelagið sum heild. Allýsingin fevnir eisini um nýtslumynstur, sum ítøkiliga skaða kropsligu heilsuna hjá fólki.

At síggja til á teimum almennu hagtølunum er rúsdrekkanýtslan í Føroyum lág samanborið við okkara norðurlendsku grannalond. Seinastu seks árini hevur miðalnýtslan verið støðugt fallandi, eftir at nýtslan stillisliga hevði verið vaksandi síðani 1993. Í dag er miðalnýtslan 6,4 litrar. Til samanberingar er miðalnýtslan í Danmark 9,4 litrar.

Samanumtikið er nýtslan ikki vaksin síðani nýggj rúsdrekkalóg kom í gildi í 1992. Heldur tvørturímóti. Viðvíkjandi rúsevnum er fatanin tann, at vit í Føroyum eru í einari rímiligari góðari støðu, hóast fjølmiðlar viðhvørt bera søgur, sum kundu bent á, at misnýtslan er vaksandi. Orsøkin er millum annað, at vit eru eitt fjarskotið land, sum minkar um útboðið.

Tá ið tað kemur til rúsdrekka ivast neyvan nakar í, at tálmandi rúsdrekkapolitikkurin í Føroyum hevur havt sína ávirkan á lutfalsliga lágu nýtsluna. Føroyski rúsdrekkapolitikkurin hevur seinastu 100 árini bygt á tey mest virknu amboðini at tálma rúsdrekkanýtslu – nevniliga at avmarka atkomuna til rúsdrekka og við høgum avgjøldum at minka um eftirspurningin eftir hesari vøru.

Men. Og tað eru altíð nøkur "men". Í Føroyum eru tað lutfalsliga mong, ið als ikki drekka. Kanningar benda á, at kanska fjórði hvør føroyingur nertir ikki rúsdrekka. Hetta er nógv í mun til okkara grannalond. Í Danmark er hetta talið fimm prosent.

Tað merkir, at tey, ið drekka, kanska ikki drekka so lítið kortini. Havandi í huga, at tað serliga er ovurnýtslan av rúsdrekka, sum er skaðilig, er hetta vert at leggja sær í geyma. Eisini eru ábendingar um, at tað, sum verður rópt óskrásett nýtsla, vindur uppá seg við tað, at sølan av rúsdrekka í tollfríum sølum er ikki við í teimum almennu hagtølunum.

Nógvar óvissur eru um, hvussu nógv føroyingar drekka, og manglandi vitan er um drykkjumynstur sum heild. Vantandi hagfrøðiligt tilfar á bæði rúsdrekka og rúsevnisøkinum ger tað truplari at meta um avbjóðingarnar og mest sum ógjørligt at seta inn við røttum spesifikkum átøkum, tá tey eru neyðug.

Samstundis er krummtappurin í tálmandi rúsdrekkapolitikkinum, einkarsølan, undir trýsti. Meiningakanningar vísa, at tveir av fimm føroyingum ikki taka undir við skipanini og ynskja eina liberalisering. Í vár var uppskot eisini lagt fyri Løgtingið um at loyva sølu av øli og víni í matvøruhandlum. Uppskotið fall, men Løgtingið gjørdi greitt, at lóggávan átti at endurskoðast. Hetta er ein avbjóðing, sum verður tikin upp í hesum politikki.

Hóast sterkasta vápnið at fyribyrgja skaðiligari nýtslu er at avmarka atkomuna, gera vit neyvan nóg nógv við tað fyribyrgjandi arbeiðið. Eitt nú áttu at verið fleiri tilboð um skjóta hjálp, tá fólk koma út á tromina við einari skaðiliga nýtslu. Viðgerðartilboðini í dag venda sær í størri mun til fólk, sum eru farin útav tromini. Tað gera tey væl. Men sum samfelag er tað okkara ábyrgd at fáa hjálpt fólki, áðrenn heim nærum eru oyðiløgd orsakað av áralangari misnýtslu.

## 1.1 Samfelagsligar avleiðingar av rúsdrekkaovurnýtslu

Tað er vælkent úr gransking og bókmentum at skaðiligu árinini av ovurnýtslu av rúsdrekka eru stór. Í Føroyum hava vit fáar ella ongar uppgerðir yvir, hvussu skaðilig rúsdrekkanýtslan millum føroyingar er fyri fólk. Hinvegin er nógv tilfar úr okkara grannalondum og aðrastaðni, sum lýsir hesar avleiðingar neyvt. Í hesum partinum verður trivið í nakrar av bókmentunum, har skaðiligu avleiðingarnar av rúsdrekka og samfelagsligu avleiðingarnar, bæði fíggjarliga og menniskjaliga, verða lýstir.

Í nýggjastu støðulýsingini hjá WHO – "Global status report on alcohol and health 2014"[1] – sigur heimsheilsustovnurin, at globalt sæð verður mett, at íalt 3,3 mió. fólk doyðu í 2014 orsakað av ovurnýtslu av rúsdrekka. Hetta svarar til, at 5,9 prosent av øllum deyðsføllum í heiminum standast av ovurnýtslu av rúsdrekka.

Lýsingin frá heimsheilsustovninum vísir á, at rúsdrekkanýtsla, sum einkult orsøk ella sum ein lutvís orsøk, elvir til fleiri enn 200 sjúkur, skaðar og aðrar heilsustøður. Felags fyri tær allarflestu sjúkurnar og skaðarnar er, at nøgdin av rúsdrekkanýtsluni hevur týdning. Drekkur tú nógv, eru sannlíkindini fyri, at tú verður sjúk/-ur, størri. Til dømis økjast sannlíkindini fyri at fáa eina rúsdrekkatengda krabbameinssjúku, um tú hevur eina ovurnýtslu av rúsdrekka.

Útrokningar úr danska Heilsustýrinum vísa, at í einari miðal kommunu í Danmark við 50.000 borgarum doyggja 300 fólk árliga av sjúkum, sum hava samband við rúsdrekkanýtslu. Aftrat koma andlátini í ferðsluni og á arbeiðsplássum, har rúsdrekka er orsøkin. Sama miðal kommunu brúkar 70 mió. krónur árliga til viðgerð og uppfylging til borgarar, sum drekka ógvusliga.[2]

Aftrat hesum koma útreiðslur til politi og dómstólar, hjúnabandsslit og nógv annað, sum kemur í kjalarvørrinum á ovurnýtslu. Í hugsaðu miðalkommuni hjá Heilsustýrinum liva 1.200 børn við rúsaðum foreldrum, sum í størri og minni mun ikki megna at veita neyðugu umsorganina, og í 44 prosentum av teimum førum, tá børn verða sett heiman, er rúsdrekkamisnýtsla ein týðandi orsøk.

[1] World Health Organization (2014).
[2] Sundhedsstyrelsen (2012).

Rúsdrekka er krabbaelvandi, og ov nógv rúsdrekka kann hava við sær 60 ymiskar sjúkur, m.a. krabbameinssjúkur, maga-tarmsjúkur, hjarta-æðrasjúkur, livrasjúkur, ov høgt blóðtrýst, niðursetta immunverju, angist og tunglyndi. Í heila tikið verður mett, at rúsdrekka sum stakur vandatáttur er orsøk til 10 prosent av samlaðu sjúkrahúsbyrðuni. Samanlagt metir danska Heilsustýrið, at rúsdrekkanýtslan hjá dønum kostar danska samfelagnum 10 mia. krónur árliga.[3]

Hesar útrokningar eru eitt sindur í andsøgn við tøl úr Noregi, har metingar vísa, at kostnaðurin av rúsdrekka ávum er um 18 mia. um árið.[4] Verður hugsað um, at danir í miðal drekka meira enn norðmenn, men at avleiðingarnar kortini eru mettar at vera størri í Noregi, so er okkurt, sum bendir á, at tað eru ymiskir hættir at gera tølini upp.

Vit hava ikki gjørt líknandi útrokningar í Føroyum, og tí er grundarlagið fyri at siga, hvussu stór samfelagsliga avleiðingin av rúsdrekkanýtslu er í Føroyum, ikki tøkt. Hyggja vit í Fíggjarlógina fyri 2015,[5] síggja vit, at tilsamans 11,6 mió. krónur eru settar av til beinleiðis viðgerð til rúsdrekkamisnýtarar á tveimum viðgerðarstovnum, Heilbrigdi og Blákrossheimið. Haraftrat eru 3,8 mió. krónur settar av til serlig bútilboð til heimleys. Tey, ið koma undir hesa fyriskipan, hava ofta víðfevndar sosialar trupulleikar, men er rúsdrekkamisnýtsla ein partur av avbjóðingini.

Sjáldan er ovurnýtsla av rúsdrekka einsamøll orsøkin til sosialu og medisinsku avleiðingarnar fyri fólk. Men ofta er rúsdrekka ein partur av einum meira samansettum trupulleika, sum fær ógvusligar menniskjaligar avleiðingar.

Samfelagsligi kostnaðurin má tí metast at vera munandi hægri. Um vit samanbera við donsku tølini og taka hædd fyri, at føroyingar drekka í miðal umleið 30 prosent minni pr. persón enn danir, so vil ein varislig meting siga, at samfelagsligi kostnaður av rúsdrekkanýtsluni í Føroyum er á leið 60 mió. krónur árliga. Brúka vit norsku útrokningarnar sum fyridømi, so vil ein meting av samfelagsligu avleiðingunum víst, at árligi kostnaðurin er munandi hægri enn 60 mió. krónur árliga.[6]

## 1.3 Skulu framvegis hava ein tálmandi rúsdrekka- og rúsevnispolitikk

Á rúsdrekkaøkinum eiga vit at halda fast við tey amboðini, sum vísindalig haldgóð prógv eru fyri, rigga. Hesi eru fyrst og fremst einkarsøluskipan við avmarkaðum tali av sølustøðum og upplatingartíðum, ein virkin príspolitikkur við avgjøldum, hava lágt promillumark og góð viðgerðartilboð. Tann almenna einkarsøluskipan hevur víst seg at vera eitt munagott amboð at stýra atkomuni til rúsdrekka í Føroyum og harvið hildið miðalnýtsluni og ta skaðiligu nýtsluna á einum lutfalsliga lágum støði. Málið frameftir er at fáa miðalnýtsluna í Føroyum niður á 6 litrar av reinum alkoholi pr. íbúgva 15 ár og eldri.

Skal einkarsøluskipanini vera lívi lagað, má hon hava undirtøku millum fólk og vinnu. Hevur skipanin ikki tað, kann avleiðingin verða, at krav verður um, at rúsdrekkasølan verður heilt liberaliserað, við stórum avleiðingum fyri nýtsluna av rúsdrekka.

[3] Ibid.
[4] Helse- og omsorgsdepartementet (2012).
[5] Løgtingslóg nr. 128 frá 19. desember 2014 um Løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2015.
[6] Egnar útrokningar.

Tað verða skjótt 25 ár, síðani rúsdrekkalógin[7] kom í gildi, og stórvegis broytingar eru ikki framdar í lógini síðani tá. Hóast endamálið við lógini, at *"avmarkað rúsdrekkamisnýtsluna og minka sum mest um skaðan, sum rúsdrekkanýtslan hevur við sær"* framvegis er tíðarhóskandi, eigur hon at endurskoðast, m.a. soleiðis, at Rúsdrekkasøla Landsins fær størri frælsi at tillaga sína tænastu í mun til eftirspurningin hjá fólk og vinnu í dag. Hetta kann merkja, at fleiri søludeildir lata upp, og at vøruúrvalið økist. Eisini skal kravið um avlop takast burtur, tí tað stríðir móti endamálinum við rúsdrekkalógini.

Fyri betur at eydnast við einum miðvísan og strategiskum rúsdrekka- og rúsevnispolitikki er neyðugt, at haldgott hagfrøðiligt grundarlag er fyri teimum átøkum, sum vera sett í verk. Tað er ein trupulleiki, at vit í roynd og veru ikki vita, hvussu stór veruliga miðalnýtslan er í Føroyum, tá tollfría sølan og onnur óskrásett nýtsla er tald við. Ei heldur vita vit nóg nógv um drykkjumynstur í Føroyum. Hvør drekkur? Hvussu nógv? Hvussu nógv hava roynt rúsandi evni? Hvør drekkur ikki. Drekka tey ungu og hvussu nógv? Eisini er skrásetingin um, hvør fær viðgerð og hvussu ofta, ikki nøktandi. Ein komandi Fólkaheilsustovnur skal fáa heimild at fáa til vega hesi hagtøl, so politiski myndugleikin hevur betur grundarlag fyri at taka avgerðir á økinum.

Eisini skulu vit vera betur at viðgera rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu fyrr. Í dag hava vit skipað tilboð við almennari fígging á Blákrossheiminum og Heilbrigdi. Hesi tilboð eru serliga ætlað teimum, sum eru um at fara ella eru farin út av eggini í sínari misnýtslu. Tøl úr Danmark benda á, at bert tíggjundi hvør við skaða av nýtslu av rúsdrekka fær viðgerð. Helst er hetta talið á leið tað sama í Føroyum. Eins og við aðrari viðgerð innan heilsuverkið skulu vit fjøltáttað og góðska viðgerðartilboðini fyri betur at finna trupulleikarnar tíðliga, so viðgerðin kann byrja, áðrenn stóra nýtslan gerst misnýtsla. Soleiðis fyribyrgja vit bæði heilsuskaðar fyri einstaklingin, men ikki minst menniskjaligum og sosialum avleiðingum fyri børn og maka. Somuleiðis er neyðugt við einum tilboðið til ungar misnýtarar, og best er, um hetta tilboðið varð samskipað við onnur viðgerðartilboð í almanna- og heilsugeiranum.

Øll tilmælini eru savnað í Kapittul 6, sum er síðsta kapittul í hesum politikki.

## 1.4 Ein lesivegleiðing

Rúsdrekka- og rúsevnispolitikkurin fellur í tveir yvirskipaðar partar. Parturin um rúsevni fyllir als ikki eins nógv, sum parturin um rúsdrekkapolitikk. Hetta tí, sum longu nevnt, nógv fleiri tættir eru í spurninginum um, hvussu samfelagið skipar seg í mun til rúsdrekkanýtslu enn í sama spurningi um rúsevni. Tí snýr meginparturin av hesum politikki seg um átøk at minka um skaðiligu rúsdrekkanýtsluna. Spurningurin um rúsevni er tí viðgjørdur fyri seg í kapittul 3, og spurningurin um viðgerð fyri rúsevnismisnýtslu er partur av kapitli um átaksøki 9 um fyribyrging og viðgerð.

Rúsdrekka- og rúsevnispolitikkurin er soleiðis bygdur upp, at fyrsti partur er ein stutt søgulig gjøgnumgongd av rúsdrekkapolitikkinum í Føroyum seinastu 100 árini og ein støðulýsing av nýtsluni í dag samanborið við onnur lond. Í Kapittul 3 verður spurningurin um rúsevnisnýtslu viðgjørdur við uppskotum um neyðug átøk. Í kapittul 4 verður visjónin handan og grundarlagið fyri teimum átøkum, Rúsdrekka- og rúsevnispolitikkur Føroya byggja á. Støðið verður tikið í Heilsunýskipanini og strategiskum ætlanum hjá heimsheilsustovninum WHO og danska Heilsustýrinum. Tey 10 ítøkiligu átaksøkini verða løgd fram og sett í ein føroyskan samanhang í kapittul 5. Strategisku átaksøkini eru hesi:

---

[7] Løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 17. mai 2011.

1) Taka ábyrgd, tilvitan og útinnan
2) Atkoma
3) Marknaðarføring
4) Rúsdrekkakoyring
5) Minka um skaðiligu árinini, tá drukkið verður
6) Rúsdrekkapolitikkur á arbeiðsplássum, ítróttarfeløgum og kommunum
7) Kampanjur og undirvísing í skúlum
8) Prísásetan
9) Fyribyrging og rúsdrekkaviðgerð í heilsuverkinum
10) Yvirvøka og eftirmetingar

Í kapittul 6 eru ymsu átøkini og tilmælini sett í eina tíðarætlan við fíggjarligum avleiðingum. Góðan lesihug!

## 1.5 Verkætlanarbólkur, tilvísingarbólkur, stýringsbólkur og fakligur ráðgevi

Arbeiðið at orða henda Rúsdrekka- og rúsevnispolitikk Føroya er skipað í einum verkætlanarbólki, einum tilvísingarbólki og einum stýringsbólki við umboðum úr viðkomandi stjórnarráðnum. Harafturat hevur verið ein fakligur ráðgevi.

*Verkætlanarbólkur*

- Fróði Jacobsen, Heilsumálaráðið, verkætlanarleiðari
- Katrin Gaard, Heilsumálaráðið

*Tilvísingarbólkur*

- Jenny Lydersen, Mentamálaráðið
- Heri Petersen, Almannamálaráðið
- Jóanna Djurhuus, Vinnumálaráðið
- Petur Alberg Lamhauge, Fíggjarmálaráðið

*Stýringsbólkur*

- Turid Arge, Heilsumálaráðið, forkvinna
- Jan Simonsen, Heilsumálaráðið
- Bjørgfríð Ludvíg, Vinnumálaráðið

*Fakligur ráðgevi*

- Pál Weihe, adjungeraður professari, Megindeild fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi, Fróðskaparsetur Føroya

# Kapittul 2 – Støðulýsing og gongdin á økinum

Rúsdrekkanýtslan í Føroyum er lág samanborið við okkara norðurlendsku grannalond. Nýggjastu almennu hagtølini vísa, at miðalnýtslan av rúsdrekka yvirhøvur hevur verið lækkandi seinnu árini. Samstundis eru drykkjumynstrini broytt. Gongdin seinastu 20 árini hevur verið, at føroyingar drekka minni av sterkum og meira av víni.

Neyvan ivast nakar í, at tálmandi rúsdrekkapolitikkurin í Føroyum hevur havt sína ávirkan á lutfalsliga lágu nýtsluna. Í galdandi rúsdrekkalóg verður gjørt greitt í grein 1, at endamálið við lógini er at avmarka rúsdrekkanýtsluna og minka sum mest um skaðan, rúsdrekkanýtslan hevur við sær fyri einstaklingar og samfelagið.

## 2.1 Søguligt baksýni

Søguliga sæð hava Føroyar havt ein tálmandi rúsdrekkapolitikk í meira enn 100 ár.[8] Tað byrjaði við, at føroyingar í seinnu helvt av 1800-talinum fingu eina rúsdrekkanýtslu, sum mangan hevði eina sosiala vanlukku við sær. Kongligi einahandilin varð avtikin í 1856, og tá byrjaði ein umfatandi handil við rúsdrekka, serliga brennivíni. Tað hevði við sær eitt fólkakrav til politisku skipanina um at gera strangar ásetingar fyri, hvussu og hvar rúsdrekka kundi keypast.

Nýtslan av rúsdrekka vaks ógvusliga hesi árini, og metingin hjá mongum var, at hetta varð ein týðandi samfelagstrupulleiki. Fleiri ferð varð heitt á ríkismyndugleikarnar um at broyta rúsdrekkaviðtøkurnar og endin var, at í 1907 varð hildin fólkaatkvøða um málið – har kvinnurnar eisini fingu møguleika at greiða atkvøðu, hóast tær ikki fingu vanligan valrætt fyrr enn í 1915. Úrslitið var, at ein ovurstórur meiriluti var fyri at banna fríari sølu av rúsdrekka.[9] [10]

Spurningurin um sølu av rúsdrekka í Føroyum varð fleiri ferð í 20. øld ein politiskur stríðsspurningur millum flokkar og elvdi til ósemjur ikki minst til innanhýsis í politisku flokkunum.[11] [12] Í 1973 endaði eitt mál um at seta á stovn eina einkarsølu undir landsstýrinum á fólkaatkvøðu. Einkarsølan skuldi hava allan handil við rúsdrekka, soleiðis at innflutningur av rúsdrekka hjá privatum ikki longur skuldi verða loyvdur. Lógaruppskotið fall á fólkaatkvøðu. Men kjakið um at skipa eina einkarsølu tagnaði ikki. Knøpp 20 ár seinni varð einkarsølan Rúsdrekkasøla Landsins veruleiki.

Í 1992 fingu vit núgaldandi rúsdrekkalóg.[13] Við lógini var ásett, at Føroyar skuldu fylgja okkara norðurlendsku grannum úr Íslandi, Noreg, Svøríki og Finnlandi og skipa eina almenna einkarsøla, sum skuldi standa fyri øllum

[8] Rúsdrekka- og Narkotikaráðið.
[9] Jacobsen (1995).
[10] Isholm (2005).
[11] Rúsdrekka- og Narkotikaráðið (1991).
[12] Rúsdrekka- og Narkotikaráðið (1992).
[13] Løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 17. mai 2011.

innflutningi og sølu av rúsdrekka. Bryggjaríini hava tó framvegis møguleikan at selja tað ølið, ið tey framleiða, beinleiðis frá bryggjarínum.

Hetta er ein monopolskipan, sum eisini er kend úr Kanada og pørtum av USA. Í stuttum byggir henda skipan á ta fatan, at tað er prísurin á rúsdrekka og atkoma, ið er avgerandi fyri nýtsluna. Sum nevnt omanfyri er endamálið við rúsdrekkalógini frá 1992 framvegis at avmarka misnýtsluna av rúsdrekka.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið[14] lesa vit, at hóast Løgtingið fleiri ferð hevði framt broytingar í rúsdrekkalógini til tess at avmarka nýtsluna og og gera tað truplari at fáa fatur á rúsdrekka, hevði gongdin í veruleikanum verið júst tann øvugta.

Sambært Maritu Petersen, sálu, sum vegna landsstýrið setti fram uppskotið, var galdandi lóggáva "avlagað, tambað og toygd....og ógjørlig at umsita". Enn meira álvarsligt var tað, sambært landsstýrinum, at "hon [lóggávan] hevur við sær óhepnar drykkjuvanar og hevur ført til ábyrgdarloysi í sambandi við rúsdrekkanýtslu". Henda orðing um óhepnar drykkjuvanar sæst aftur samandráttinum í gjøllari lýsing, sum Uni Vestureið, varapolitikommisserur, skrivar í áliti um rúsdrekkapolitikk í Føroyum í 1991.[15] Í lýsingini vísir hann somuleiðis á, at hóast ógvuliga avmarkandi rúsdrekkalóg við skamtan, so hevur tað "ongantíð verið forðan fyri rúsdrekkanýtslu/misnýtslu, eins og nýtararnir eru vorðnir yngri og yngri".

Umframt skipanina við einari einkarsølu, sum hevði einkarrætt at innflyta rúsdrekka, var ein onnur høvuðsbroyting, at aldursmarkið at keypa rúsdrekka var broytt úr 20 niður í 18 ár, "tí í dag eru 18 ára gomul myndug í øllum viðurskiftum", sum tað stendur í viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Ein onnur høvuðsbroyting var skipanin við útskeinking. Áðrenn 1992 var útskeinking á almennum støðum bannað. Undantøkini vóru ølklubbarnir, sum komu fram í ljósmála ymsa staðni í 1960-unum. Upprunaliga var tað soleiðis, at bert limir høvdu atgongd til ølklubbarnar. Sum tíðin leið gjørdust krøvini til atgongd linari, og limir kundu hava maka og gest við sær og viðhvørt lótu klubbarnir eisini øllum kvinnum inn, hóast tær ikki vóru limir.

Endamálið við at broyta reglurnar fyri útskeinking var millum annað skapa betri umstøður fyri einari matstovuvinnu í Føroyum. Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið verður eisini nevnt, at loyvini at skeinkja rúsdrekka skuldu vera við at menna eina ferðavinnu. Tí var eisini skotið upp, at Loyvisnevndin bert kundi geva persónum og feløgum, sum reka hotell- og matstovuvirksemi, loyvi at skeinkja gestunum rúsdrekka. Hendan orðing stendur við í dag, og verður rúsdrekka í lógini tí sæð sum nakað, tú nýtir afturvið mati.

### 2.1.1 Broytingar síðani 1992

Við heimild í nýggju lógini um sølu og innflutning av rúsdrekka verður Rúsdrekkasøla Landsins stovnsett 2. november í 1992 og læt fyrsta sølubúðin upp í Tórshavn. Seinni sama ár lat upp sølubúð í Klaksvík, og árið eftir lótu eisini upp búðir á Tvøroyri, í Skálavík, Saltangará og Miðvági. Bert í Saltangará var sjálvtøka, meðan hinar fimm sølubúðirnar seldu rúsdrekka yvir diskin. Sølubúð er ikki longur í Skálavík. Hon varð flutt til Sands í 2014.

Síðani rúsdrekkalógin fekk gildi í 1992 eru bert smávegis tillagingar gjørdar. Eitt nú varð broyting gjørd í 2010, soleiðis at Rúsdrekkasølan fekk loyvi at hava opið leygardagar. Í 2011 varð tann broyting gjørd, at

[14] Uppskot nr. 84 til løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka (1991).
[15] Rúsdrekka- og Narkotikaráðið (1991).

Rúsdrekkasølan fekk loyvi at selja øl sterkari enn 5,8 prosent. Samstundis vóru broytingar gjørdar í teimum avmarkingum, sum føroyskir framleiðarar av rúsdrekka virkaðu undir. Áðrenn var tað ikki loyvt at framleiða rúsdrekka sterkari enn 5,8 prosent, men hendan áseting varð broytt til í mesta lagið 60 rúmprosent av alkoholi. Sølan av sterkum øli byrjaði tann 2. apríl 2011.[16]

## 2.2 Gongdin í rúsdrekkanýtsluni í Føroyum 1970-2014

Í hesum partinum verður greitt nærri frá, hvussu drykkjumynstrini eru hjá føroyingum. Hugt verður eftir, hvussu nýtslan av rúsdrekka er í dag, og verður hetta sæð í mun til árini frammanundan. Eisini verður nýtslan greinað nærri á kyn og aldursbólkar við støði í tí tilfari, ið er tókt.

Grundarlagið fyri greiningini er sonevnda miðalnýtslan í Føroyum. Hetta verður altjóða rópt fyri "totalkonsum" av alkoholi í einum landi. Miðalnýtslan verður roknað sum litrar av reinum alkoholi, av øllum slagi av alkoholi, sum árliga verður drukkið av hvørjum íbúgva 15 ár og eldri í miðal. Miðalnýtslan er ein einfaldur máti at lýsa støðuna viðvíkjandi rúsdrekkanýtsluni í einum landi, og er eitt týðandi amboð at stýra rúsdrekkapolitikkinum við. WHO staðfesti í tilmælum fyri longu 30 árum síðani, at miðalnýtslan er eitt rímiligt mát fyri væntaðu trupulleikarnar av rúsdrekka í einum fólki. Er miðalnýtslan størri, eru størri sannlíkindi fyri, at vit hava stórbrúkarar, sum hava heilsuligar og sosialar trupulleikar av rúsdrekka. Hetta er væl skjalprógvað við empiriskum kanningum.[17]

### 2.2.1 Miðalnýtslan

Rúsdrekkasøla Landsins ger á hvørjum ári hagtøl fyri søluni av rúsdrekka í Føroyum. Tølini fevna um søluna hjá Rúsdrekkasøluni og hjá føroysku øl framleiðarunum. Tollfría sølan er ikki við í uppgerðini. Í talvuni niðanfyri sæst gongdin í søluni síðani 1970 í reinum alkohol litrum fyri hvønn íbúgva í Føroyum 15 ár og eldri. Hetta er tað, ið vanliga verður rópt fyri miðalnýtslan. Eisini vísir talvan gongdina í søluni av ávikavist spiritus, øli og víni.

[16] Kunngerð nr. 153 frá 28. oktober 1992 um framleiðslu og útflýgging av rúsdrekka, sum seinast broytt við kunngerð nr. 122 frá 14. september 2011.
[17] Fólkaheilsuráðið (2012).

Talva 1: Søla í reinum alkohol litrum pr. íbúgva 15 ár og eldri 1970-2014




| | 70 | 71 | 72 | 73 | 74 | 75 | 76 | 77 | 78 | 79 | 80 | 81 | 82 | 83 | 84 | 85 | 86 | 87 | 88 | 89 | 90 | 91 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Alc. ltr. | 4,4 | 4,7 | 5,6 | 5,6 | 5,3 | 4,8 | 5,2 | 5,9 | 6,1 | 5,6 | 6,0 | 6,1 | 5,9 | 6,4 | 6,1 | 7,1 | 6,7 | 8,1 | 7,5 | 6,9 | 6,7 | 6,7 |
| Spiritus | 2,0 | 1,8 | 2,2 | 2,3 | 2,2 | 2,2 | 2,2 | 2,6 | 2,7 | 2,6 | 3,0 | 2,9 | 2,8 | 3,0 | 2,6 | 3,5 | 2,9 | 3,9 | 3,8 | 2,9 | 3,2 | 3,0 |
| Vín | 0,1 | 0,2 | 0,2 | 0,2 | 0,3 | 0,4 | 0,5 | 0,5 | 0,5 | 0,4 | 0,5 | 0,5 | 0,4 | 0,4 | 0,3 | 0,4 | 0,4 | 0,6 | 0,4 | 0,6 | 0,6 | 0,7 |
| Øl | 2,2 | 2,6 | 3,1 | 2,9 | 2,6 | 2,1 | 2,3 | 2,7 | 2,8 | 2,5 | 2,3 | 2,6 | 2,6 | 2,9 | 3,1 | 3,0 | 3,2 | 3,5 | 3,2 | 3,3 | 2,8 | 2,9 |

| | 92 | 93 | 94 | 95 | 96 | 97 | 98 | 99 | 00 | 01 | 02 | 03 | 04 | 05 | 06 | 07 | 08 | 09 | 10 | 11 | 12 | 13 | 14 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Alc. ltr. | 8,8 | 6,2 | 6,4 | 6,4 | 6,5 | 6,6 | 6,6 | 6,5 | 6,7 | 6,9 | 7,0 | 6,9 | 6,7 | 6,6 | 6,8 | 7,1 | 7,0 | 6,9 | 6,7 | 6,4 | 6,6 | 6,3 | 6,4 |
| Spiritus | 4,1 | 2,9 | 2,8 | 2,6 | 2,6 | 2,6 | 2,6 | 2,6 | 2,7 | 2,7 | 2,6 | 2,5 | 2,3 | 2,2 | 2,3 | 2,4 | 2,3 | 2,2 | 2,2 | 2,0 | 1,9 | 1,8 | 1,8 |
| Vín | 1,4 | 0,5 | 0,5 | 0,5 | 0,6 | 0,6 | 0,7 | 0,7 | 0,8 | 0,9 | 0,8 | 0,9 | 0,9 | 1,0 | 1,1 | 1,1 | 1,3 | 1,4 | 1,4 | 1,4 | 1,5 | 1,5 | 1,6 |
| Øl | 3,1 | 2,8 | 2,8 | 3,0 | 3,1 | 3,2 | 3,2 | 3,2 | 3,2 | 3,3 | 3,4 | 3,4 | 3,3 | 3,3 | 3,4 | 3,5 | 3,4 | 3,3 | 3,1 | 3,0 | 3,1 | 3,0 | 3,0 |

Kelda: Rúsdrekkasøla Landsins.

Sum talva 1 vísir, so var miðalnýtslan í Føroyum í 2014 6,4 litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri. Seinastu seks árini hevur miðalnýtslan verið støðugt fallandi, eftir at nýtsla stillisliga hevur verið vaksandi síðani 1993, tá nýtslan var 6,2 litur fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri. Í 2007 var miðalnýtslan í hæddini við 7,1 litur av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva.

Samanumtikið er nýtslan ikki vaksin síðani nýggja rúsdrekkalógin kom í gildi í 1992. Heldur tvørturímóti. Síðst í áttatiárunum var nýtslan munandi hægri enn í dag, ein vøkstur, sum sannlíkt stóðst av teimum góðu tíðunum í samfelagnum, og at fólk yvirhøvur høvdu meira pening um hendi.

Tølini undan 1992 skulu takast við stórum fyrivarni, men hyggja vit heilt aftur til 1970, so vísir talvan ein greiðan tendens. Nýtslan hækkaði øll sjeytiárini og áttatiárini, heilt fram til kreppan rakti síðst í áttatiárunum. Ein ógvusligur vøkstur er so aftur í 1992, tá nýggja rúsdrekkalógin kemur í gildi og Rúsdrekkasøla Landsins letur upp. Men longu árið eftir í 1993, fylgir miðalnýtslan tí tendensi, sum byrjar í 1988: Føroyingar drekka minni, tí fíggjarliga støðan er vánalig.

Mitt í 90-unum kvinkar miðalnýtslan spakuliga uppeftir, og fylgir hetta eisini nøkulunda støðuni í samfelagnum, sum nú batnar. Í 2008 gerast tíðirnar aftur verri, og sæst tað eisini aftur í nýtsluni. Áhugavert er tó, at nýtslan sambært tølunum hjá Rúsdrekkasøluni heldur á at falla seinnu árini, hóast tøka inntøkan hjá fólki er vaksin seinnu árini.

Tað verða ikki gjørdar regluligar kanningar, sum greina neyvari, hvussu rúsdrekkanýtslan er millum føroyingar. Slíkar kanningar um nýtslu av rúsdrekka eru kendar úr grannalondum okkara og geva millum

annað vitan um, hvussu nógv drekka ov nógv, og hvussu nógv fólk drekka einki. Eisini kunnu slíkar kanningar siga meira um, nær fólk byrja at drekka, og greina rúsdrekkanýtsluna á aldursbólkar ella kyn.

Tó hava Fólkaheilsuráðið og Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu gjørt ymsar kanningar av rúsdrekkanýtsluni millum fólk seinnu árini, og tær kanningarnar geva nakrar greiðar ábendingar.

Søguliga sæð – og helst er tað so enn – so eru tað lutfalsliga nógvir føroyingar, sum als ikki nýta rúsdrekka. Kanning, sum Rúsdrekka- og Narkotikaráðið[18] gjørdi í 1991, vísti, at 13 prosent av teimum spurdu (20 ár og eldri) monnunum ikki høvdu drukkið rúsdrekka seinastu 12 mánaðirnar. Talið fyri kvinnurnar í sama aldursbólki var 28 prosent. Niðurstøðan í kanningini var, at sammett við okkara grannalond vóru tað fleiri føroyingar, bæði mannfólk og konufólk, sum als ikki drukku rúsdrekka.

### 2.2.2 Nýtslan býtt á aldur og kyn

Nýggjari kanningar benda á tað sama. Í kanning, sum Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Fyribyrgingarráðið gjørdu í 2007[19], er parturin av føroyingum, sum als ikki drekka, 24 prosent. Hetta var eitt sindur óvæntað, tí atkoman til rúsdrekka vaks eftir broyttu rúsdrekkalógina, og tí var væntandi, at tað nú vóru færri fráhaldsfólk í Føroyum.

Talva 2: Hvussu ofta drekkur tú øl, vín ella brennivín?




Kelda: Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Fyribyrgingarráðið (2007).

Í 2009 gav Fólkaheilsuráðið út eina MARK-kanning (Motión, Alkohol, Royking og Kost)[20]. Í hesari kanning søgdu 21 prosent seg ongantíð hava drukkið rúsdrekka, og kunnu hesi tøl benda á, at talið á teimum, sum siga seg drekka alkohol, er eitt vet vaksandi, og at tey, sum ikki drekka, verða færri. Kanningar, sum Gallup Føroyar gjørdi fyri Fólkaheilsuráðið árini 2005-2009, vísa eisini, at nógv fráhaldsfólk eru í Føroyum. Ein góður triðingur – í 2005 36 prosent og í 2009 38 prosent – svaraðu, at tey vóru fráhaldsfólk viðvíkjandi alkoholi. Líknandi kanningar í Danmark vísa, at bert um fimm prosent av dønum siga seg vera fráhaldsfólk.

[18] Rúsdrekka- og Narkotikaráðið (1991).
[19] Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu; Fyribyrgingarráðið (2007).
[20] Fólkaheilsuráðið (2010).

At so stórur partur av føroyingum eru fráhaldsfólk, merkir so eisini, at tey, ið drekka, drekka ein lutfalsliga størri part av samlaðu nýtsluni í Føroyum.

Niðurstøðan í kanningini av rúsdrekkanýtsluni frá 2007 var annars, at menn drekka munandi meira – fýra ferðir meira – enn kvinnur. Hetta var sama lutfall, sum Rúsdrekka- og Narkotikaráðið fann í kanningini frá 1991. Munurin millum menn og kvinnur er størri í Føroyum enn í Danmark, har kvinnurnar drekka helvtina av tí, menninir drekka.

Sama kanning vísti eisini, at nýtslan er størst hjá teimum millum 35 og 45 ár og minkar, tá ið fólk eldast. Tey fráskildu drekka sambært kanningini mest, men einkjur og einkjumenn minst. Hetta er sama mynstur sum í Danmark. Tað sæst eisini eitt týðiligt samband við útbúgving, soleiðis at tey við høgari útbúgving drekka mest – aftur líkt danska mynstrinum. Eisini vísti kanningin, at nýtslan av rúsdrekka er rættiliga jøvn kring landið.

Tá kanningin varð gjørd í 2007, var tilmælið frá danska Heilsustýrinum, at menn skuldu ikki drekka meira enn 21 alkoeindir (vanliga nevnt “genstand” á donskum) um vikuna og kvinnur ikki meira enn 14. Hetta er síðani lækkað niður í ávikavist 14 og 7 alkoeindir. Ímillum føroyingar vóru tað 4-6 prosent (alt eftir aldri) av monnum, sum drukku meira enn tilmælið og bert 1-2 prosent av kvinnunum. Fyri bæði kynini eru tølini munandi lægri enn í Danmark.

Í norðurlendskum høpi verður víst á, at nýtslan seinnu árini er vaksin mest hjá teimum miðaldrandi kvinnunum og monnunum yvir 50 ár. Í Noregi[21] er nýtslan í hesum bólkinum næstan tvífaldað seinastu 10 árini og síggja onnur Norðurlond sama tendens. Talan er bæði um eina vaksandi miðalnýtslu og eina vaksandi skaðiliga misnýtslu í hesum bólki. Við núverandi hagtalstilfari er ikki grundarlag at siga, at vit uppliva somu gongd í Føroyum, men havandi í huga, at mentanin í grannalondini ikki er so ólík, er hugsandi, at hetta fyribrigdið eisini er í Føroyum.

### 2.2.3 Rúsdrekkavanar millum tey ungu

Í MARK-kanningini[22] frá 2009 vóru fólk eisini spurd um, nær tey fyrstu ferð høvdu drukkið so mikið, at tey vóru full. Tey flestu svaraðu, at tað var í tannárunum, at tey fyrstu ferð vóru full. Tey flestu vóru 16 ella 17 ár og miðalaldurin var 17,7 ár, tá ið tey fyrstu ferð høvdu drukkið so mikið, at tey vóru full.

Føroyar hava luttikið í altjóða ESPAD-kanningini fyri 9. flokkar síðani 1980. Í hesi kanning verður spurt inn til rúsdrekkanýtsluna hjá skúlanæmingum í 9. flokki. Í nýggjastu frágreiðingini,[23] sum byggir á tøl frá 2011, siga 13,5 prosent seg ongantíð í lívinum at hava smakkað rúsdrekka. Knapt 40 prosent av næmingunum svaraðu, at tey høvdu smakkað rúsdrekka millum 1 og 10 ferð í lívinum, meðan ein av fimm søgdu seg hava smakkað rúsdrekka 40 ferðir ella oftari.

Samanbera vit hesi tølini við ESPAD-kanningina fyri 2003, so eru so at siga líka nógv, sum siga seg ongantíð hava smakkað rúsdrekka (12,4 prosent). Áleið 45 prosent høvdu tá drukkið millum 1 og 10 ferð og 32 prosent 10 árum síðani. [24]

Sum vera man er munur á at hava smakkað rúsdrekka og so at kenna til ella drekka seg fullan. Ein spurningur í ESPAD-kanningini er, um hvussu ofta (um nakrantíð) næmingurin hevur verið so ávirkaður, “at hann hevur

---

[21] Helse- og omsorsdepartementet (2012).
[22] Fólkaheilsuráðið (2010).
[23] ESPAD (2011).
[24] ESPAD (2003).

vinglað, havt trupulleikar at tosa, spýð ella ikki minst til, hvat ið hendi". Her siga 54,2 prosent seg ongantíð hava verið so ávirkað, at hava upplivað sovorðið. 23,9 prosent siga 1-2 ferð, 11,4 prosent siga 3-5 ferð og so minkar talið líðandi. 1,1 prosent siga seg hava verið so ávirkað av rúsdrekka, at tey hava havt hesar upplivingar 40 ferð ella fleiri.

Talva 3: ESPAD-kanning: Spurningur: Nær (um nakrantíð) royndi tú FYRSTU FERÐ?

| | Ongan tíð | 9 ár ella yngri | 10 ár | 11 ár | 12 ár | 13 ár | 14 ár | 15 ár | 16 ár ella eldri |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Øl (minst eitt glas/ fløsku) | 29,1% | 12,1% | 2,4% | 3,3% | 6,2% | 11,4% | 21,1% | 14,1% | 0,4% |
| Cider (minst eitt glas/ fløsku) | 29,6% | 2,2% | 1,3% | 2,2% | 5,3% | 13,8% | 24,8% | 20,2% | 0,6% |
| Alcopops (minst eitt glas/ fløsku) | 52,6% | 0,2% | 0,6% | 0,7% | 2,0% | 7,6% | 19,3% | 16,4% | 0,6% |
| Vín (minst eitt glas) | 56,4% | 2,4% | 0,9% | 3,0% | 4,7% | 7,7% | 13,1% | 11,2% | 0,6% |
| Brennivín (minst ein snaps ella ein sjuss) | 38,5% | 1,1% | 0,4% | 1,5% | 3,9% | 8,8% | 22,0% | 22,7% | 1,1% |
| At drekka seg fulla/n av rúsdrekka | 44,2% | 0,4% | 0,2% | 0,6% | 2,0% | 7,0% | 20,9% | 23,3% | 1,5% |

ESPAD-kanningin sigur eisini nakað um byrjunaraldurin hjá føroyingum. Í spurningi um, nær tey fyrstu ferð drukku seg fullan av rúsdrekka, svara 44,2 prosent, at tey ongantíð hava verið full. Eisini søgdu íalt 44,2 prosent, at tey vóru 14 ella 15 ár (ávikavist 20,9 og 23,3 prosent), 7 prosent vóru 13 ár og 2 prosent vóru 12 ár, tá ið tey fyrstu ferð vóru full. Samanlagt eru tað 10,2 prosent, sum siga seg hava verið full, tá ið tey vóru 13 ár ella yngri.

Samanborið við Danmark er talið lágt. Í Danmark hava 20 prosent av teimum ungu verið full sum 13 ára gomul ella fyrr. Í Svøríki og Noreg eru tølini áleið tey somu sum í Føroyum, og í Týsklandi hava eini 12 prosent verið full sum 13 ára gomul.[25]

Fyrivarni eru tó við slíkum kanningum, tá fólk sjálvi skulu siga, um tey drekka, og hvussu nógv tey hava drukkið seinastu tíðina. Tað er kent, at fólk hava lyndið at undirmeta sjálvmettu nýtsluna í hesum kanningum – hetta fyribrigdið er kent undir hugtakinum "undirrapportering".

### 2.2.4 Hvat drekka føroyingar?

Føroyingar drekka fyri tað mesta øl. Miðalnýtslan av øli hevur, síðani Rúsdrekkasølan lat upp, verið ógvuliga støðug á umleið trimum litrum av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri. Hinvegin eru stórar broytingar í drykkjumynstrinum, um vit hyggja eftir miðalnýtsluni av víni og spiritus. Miðalnýtslan av víni er trífaldað hesi gott 20 árini, úr 0,5 litrum upp í 1,5 litrar. Talan er um ein varnan líðandi vøkstur í vínnýtsluni hesi árini.

[25] Jacobsen (2014).

Samstundis er sølan av spiritus minkað við góðum triðingi síðani 1993, tá seldir vóru 2,8 litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva. Í 2013 er talið 1,8 litur. Fara vit longur aftur í tíðina, so var nýtslan av spiritus enn hægri, og í fleiri ár eisini hægri enn miðalnýtslan av øli.

Hyggja vit yvirskipað og søguliga eftir, hvussu drykkjumynstrini hava verið og eru kring Evropa, so er greitt, at nýtslan av rúsdrekka lagar seg eftir lokalum viðurskiftum. Tað er lítið at ivast í, at drykkjumynstrini fyrst og fremst eru ávirkað av tí framleiðslu, sum er farin fram í heimaumhvørvinum. Og soleiðis er framvegis. Hvat tú drekkur er í ein stóran mun stýrt av tí framleiðslu, sum er í økinum, tú býrt.

Í Suðurevropa er vínnýtslan nógv tann størsti parturin av samlaðu miðalnýtsluni. Longur norður tú kemur – Kekkia, Týskland, Belgia, Danmark - veksur ølið sum partur av samlaðu miðalnýtsluni. Uppaftur longur norðuri, har framleiðslan í heimaumhvørvinum í heila tikið er minni, vísir tað seg, at nýtslan av sterkum rúsdrekka – spiritus – er lutfalsliga tann størsta søguliga sæð.

Uttan at viðgera nærri orsøkina til hesar drykkjuvanar, so vísa søguligu tølini fyri sølu av rúsdrekka, at tað hevur verið so í Føroyum. Tølini vísa eisini greitt, at hetta mynstur er í stórari broyting, og eru vit við tíðini vorðin meira "evropalagaði" síðani 1992, tá ið tað kemur til rúsdrekkanýtslu.

### 2.2.5 Miðalnýtslan samanborið við okkara grannalond

Talvan niðanfyri vísir miðalnýtsluna í Norðurlondum 2009-2013. Miðalnýtslan er, sum áður nevnt, sølan av reinum alkohol litrum fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri.

Sæð í mun til okkara grannalond, so er føroyska nýtslan samanumtikið lág. Ísland, Noreg og Føroyar hava eina miðalnýtslu undir sjey litrar av reinum alkoholi, Svøríki hevur beint yvir sjey, meðan Finnland og Danmark høvdu í 2013 eina miðalnýtslu á ávikavist 9,1 og 9,4. Grønland hevur leingi havt eina stóra miðalnýtslu av alkoholi, men við miðvísum politiskum átøkum seinnu árini hevur tað eydnast teimum at fingið nýtsluna munandi niður. Í 2013 var miðalnýtslan í Grønlandi 8,8 litrar av reinum alkoholi.

Talva 4: Miðalnýtsla í Norðurlondum




Tølini í talvu 4 omanfyri vísa tað skrásettu søluna í teimum ymisku londunum. Tað er týðandi at vísa á, at tað í øllum londum eisini er nýtsla, sum ikki er skrásett. Óskrásett nýtsla er til dømis rúsdrekka, sum verður keypt í tollfríum sølum, marknahandil, rúsdrekka, sum verður flutt inn ólógliga, og heimabryggj.[26]

Í Danmark eru ikki ókent at fara yvirum markið til Týsklands at keypa inn rúsdrekka, í Finnlandi fara fleiri til Estlands og í Svøríki fara fleiri til Danmarkar og Týsklands at keypa rúsdrekka til egna nýtslu. Í Svøríki, sum helst er tað Norðurlandið, ið ger mest burturúr at fáa til vega hagtøl fyri nýtsluni av ikki-skrásettum rúsdrekka, verður mett, at veruliga nýtslan av reinum alkoholi er 2-2,5 litur hægri enn skrásetta nýtslan. Sama støða er í Finnlandi.[27]

Líknandi metingar úr Noreg endurtaka søguna. Veruliga nýtslan er upp í móti 8 litrum av alkoholi fyri hvønn íbúgva, tá tax-free søla, marknahandil og heimabryggj eru tikin við.[28] Í Danmark er tann totala nýtslan ein litur hægri enn skrásetta nýtslan, meðan metingar úr Íslandi benda á, at tann veruliga nýtslan liggur tættari at skrásettu nýtslutølunum enn í hinum grannalondunum.

### 2.2.6 Søla av rúsdrekka í Føroyum, sum ikki er skrásett

Eisini í Føroyum er nýtsla, sum ikki er skrásett. Eitt nú hava manningar við skipum, sum sigla millum lond, møguleika at keypa rúsdrekka uttan avgjøld til egna nýtslu[29] og nøkur bryggja heima, hóast hendan nýtsla verður mett at vera lítil í dag. Ei heldur er rúsdrekka keypt í tollfríum sølum innanlands og uttanlands við í almennu tølunum. Hetta er millum annað tað, ið føroyingar keypa í Vága og Kastrup floghavn ella øðrum floghavnum. Sølan til føroyingar á veg til Føroya við Norrønu er heldur ikki við í skrásettu nýtsluni.

Ilt er at meta neyvt um, hvussu stór tann óskrásetta nýtslan er í Føroyum, men greitt er, at ferðafólkastreymurin er øktur nógv seinnu árini. Í 2014 var ferðafólkatalið um Vága Floghavn 250.000

---

[26] Helse- og omsorgsdepartementet (2012).
[27] http://www.nordiskfolkehelsekonferanse.no/lib/tpl/nfh-6/assets/presentasjoner/ws_f_leifman_270814.pdf
[28] Helse- og omsorgsdepartementet (2012).
[29] Kunngerð nr. 118 frá 7. desember 1994 um proviantering av skipum og flogførum til nýtslu umborð ella sølu til ferðafólk.

ferðandi samanborið við knøpp 200.000 í 2010. 140.000 ferðandi fóru um flogvøllin í 2000, og er talið av ferðandi næstan tvífaldað seinastu 15 árini. Sambært Vága Floghavn eru umleið 70 prosent av teimum ferðandi búsitandi í Føroyum. Samstundis veksur ferðafólkatalið við Norrønu til Føroya eisini støðugt. Her er lutfallið tó beint øvugt. Um 70 prosent av teimum ferðandi við Norrønu eru ikki búsitandi í Føroyum sambært Smyril Line.

Samanumtikið er tó lítið at ivast í, at økta ferðslan um flogvøllin og við Norrønu merkir, at fleiri keypa rúsdrekka í sølustøðum, sum almenna skrásetingin ikki fevnir um. Norsk kanning um tollfría sølu á flogvøllum og ferðafólkaskipum frá 2012 staðfestir, at nýtslan av tollfríum rúsdrekka í Noreg svaraði til á leið ein hálvan litur av reinum alkoholi pr. íbúgva 15 ár og eldri í 2010. Kanningin vísir, at sølan av spiritus í tollfríu sølunum svarar til 27 prosent av nøgdini av spiritus, ið verður seld í norsku einkarsøluni Vinmonopolet.[30]

Hinvegin er tollfría sølan av øli og víni bert ein lítil partur – ávikavist 1 og 7 prosent – av samlaðu nøgdini, ið verður seld í einkarsøluni. Fólkaheilsuráðið hevur mett, at orsøk er at halda, at niðurgongdin í søluni av spiritus í Føroyum síðani 2007 kann forklárast við øktari sølu í tollfríu búðunum. Staðfestast kann, at eins og í øðrum Norðurlondum er reella miðalnýtslan eisini í Føroyum hægri enn skrásettu tølini vísa, men ikki er møguligt at meta við veruligari vissu um, hvussu stór henda nýtslan er.

## 2.3 Samanumtøka

Føroyingar eru ikki farnir at drekka meira, hóast broytingin til skipanina við einkarsølu í 1992 gjørdi rúsdrekka munandi meira atkomuligt. Helst er ávís mentanarlig broyting farin fram hesi árini, sum eisini verður undirbygd við tí sannroynd, at nýtslan av víni er farin upp, meðan nýtslan av spiritus er farin niður.

Hyggja vit eftir nýtsluni og samanbera við onnur Norðurlond, so er miðalnýtslan í Føroyum lutfalsliga lág. Samanumtikið hevur nýtslan verið rættiliga støðug síðani 1992 við hissini upplopum, men síðani 2007 er ein jøvn minking í nýtsluni av reinum alkoholi pr. íbúgva yvir 15 ár. Ein partur av hesari minking kann skyldast, at alt fleiri fólk ferðast í dag og keypa tí ein part av teirra rúsdrekka í tollfríum sølum, søla, ið ikki telur við í almennu skrásetingini.

Afturvendandi ESPAD-kanningin av næmingum í 9. flokki gevur eina mynd av einum ungdómi við einari moderatari nýtslu í mun til grannalondini. Tó so, umleið 10 prosent svaraðu í seinastu kanning, at tey høvdu verið full, tá ið tey vóru 13 ár ella yngri.

Støðulýsingin ber brá av, at vit hava eitt veikt hagtalsgrundarlag um drykkjumynstur hjá fólki. Ilt er at meta nærri um, hvussu nógv drekka, og hvussu nógv tey drekka, hvussu kynsbýtið og aldursbýtið er og annað, sum kundi verið viðkomandi at fingið lýst fyri betur at kunna gera møgulig átøk fyri ávísar vandabólkar.

Tó benda tær kanningarnar, ið gjørdar eru, á, at lutfalsliga nógvir føroyingar ongantíð drekka – út við triði hvør søgdu seg vera fráhaldsfólk í 2009 – og at tað somuleiðis er ein rættiliga stórur bólkur, sum næstan ikki drekkur. Um so er, at hetta er álítandi, merkir tað eisini, at vit hava ein bólk, sum drekkur rættiliga nógv meira enn miðalnýtslan annars vísir.

[30] SIRUS (2012).

# Kapittul 3 – Rúsevnir

Sambært Fólkaheilsuráðnum fellur ein *rúsevnapolitikkur* vanliga í tveir meginpartar.[31] Annar parturin viðvíkur rúsdrekka ella alkohol, og hin parturin viðvíkur narkotika, t.d. hash, heroin ella amfetamin. Tá ið tað í samgonguskjalinum[32] er orðað, at "...ein greiður rúsdrekka- og rúsevnispolitikkur skal orðast", verður tað tulkað soleiðis, at rúsevnisparturin fevnir um narkotikapartin. Hesin kapittul kemur at viðgera narkotikastøðuna í Føroyum. Vit hava valt at viðgera partin um rúsevni fyri seg.

Fatanin hjá Fólkaheilsuráðnum er, at Føroyar er í eini rímiligari støðu viðvíkjandi narkotikamisnýtslu. Kanningarnar í 9. flokki, sonevndu ESPAD-kanningarnar, sum Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu hevur staðið fyri, vísa týðuliga ár fyri ár, at Føroyar eru millum tey lond í Evropa, har tey ungu brúka minst narkotika. Millum tey tilkomnu er Fólkaheilsuráðið vitandi um, at tað finst ein ávís hashmisnýtsla.

## 3.1 Innflutningur

Fólkaheilsuráðið hevur seinastu árini havt afturvendandi fundir við løgreglu og tollvald, har roynt verður at finna fram til, hvussu stór tann ítøkiliga mongdin av rúsevnum er, sum hald er lagt á, og hvussu stór tann nøgdin er, sum hesir myndugleikar hava varhugan av, eru farin "ímillum fingrarnar" á teimum og út í samfelagið. Niðurstøðan á hesum fundum hevur verið, at støðan er nøkulunda óbroytt seinastu árini, og at hon ikki er hættisliga stór. Talva 5 niðanfyri er yvirlit yvir tær nøgdir av rúsevnum, sum løgregla og tollvald hava lagt hald á árini 2010-2014.

Talva 5: Nøgdir av rúsevnum, sum hald er lagt á 2010-2014

| Ár | Hash | Amfetamin | Kokain | Ecstacy | Joint | Skunk |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2010 | 1.056,90 gr. | 39,73 gr. | 0,13 gr. | 1 stk. | - | 395,20 gr. |
| 2011 | 17.481,78 gr. | 273,30 gr. | - | 5 stk. | - | 2,95 gr. |
| 2012 | 6.351,44 gr. | 74,30 gr. | 1,00 gr. | - | - | 31,00 gr. |
| 2013 | 4.183,61 gr. | 4,84 gr. | 0,52 gr. | - | 3 stk. | 572,58 gr. |
| 2014 | 3.779,70 gr. | 0,5 gr. | 0,80 gr. | - | 5 stk. | 44,61 gr. |

Tað eru einstøk ár, at tað verður lagt hald á størri nøgdir av rúsevnum í Føroyum. Til dømis varð tað í 2011 lagt hald á størri nøgd av hashi og amfetamini. Tó var henda nøgdin ikki ætlað føroyska marknaðin, men tí íslendska.

Orsøkin til lutfalsligu smáu nøgdirnar av innflutningi av rúsevnum er helst, at Føroyar liggja so avbyrgd úti í havi, at tað er trupult at fáa evnini inn í landið. Meginvegirnir hjá rúsevnum til Føroya eru rættiliga einfaldir, og harvið lættari at hava eitt vakið eyga við. Í høvuðsheitum er talan um loftvegis innflutning við Atlantsflogi yvir flogvøllin ella sjóvegis við Norrønu. Harumframt er eftirlitið við landamarkið hjá okkum uppá seg strangari enn í øðrum londum í Evropa.[33] Tollvaldið hevur raðfest eftirlitið við narkotika høgt og hevur servandan narkohund, sum verður brúktur til at leita eftir rúsevnum uppi á ferðafólki, í postflutningi, í farmaflutningi og

[31] Fólkaheilsuráðið (2012).
[32] Samgonguskjal (2011).
[33] Fólkaheilsuráðið (2012).

umborð á skipum. Umframt hund hevur tollvaldið røntgentól á høvuðsposthúsinum í Tórshavn til at kanna postsendingar við, umframt atgongd til røntgentól á flogvøllinum at kanna lutir við, sum rúsevni kunnu verða fjald í. Eisini hava løgregla og tollvald talgilda atgongd til ferðafólkalistar.

### 3.1.1 Nýggj rúsevnir og nýggir hættir at smugla

Hóast talan ikki er um stórar nøgdir, sum hald verður lagt á, hevur tað týdning, at myndugleikarnir framhaldandi raðfesta at fyribyrgja, at narkotisk evnir koma inn í landið. Sambært løgreglu og tollvaldi gerast smuglingarhættirnir alt meira framkomnir. Dømir eru um, at rúsevnir eru funnin í eldsløkkjarum og akkumulatorum o.s.fr. Eisini eru fleiri dømir um innvortis flutning.

Sambært løgregluni eru eisini fleiri farin undir at dyrka hashplantur heima við hús.[34] Í hesum sambandi hava bæði løgreglan og tollvaldið gjørt vart við, at tíðum verður funnið fræ til cannabisplantuna og skunk. Fræ er í dag í sjálvum sær ikki ólógligt, men um tað verður plantað, kunnu ólóglig evni vinnast burtur úr plantuni, t.d. hash. Hetta er dømi um, at eftirlitið við nýtsluni av rúsevnum viðhvørt ikki bert viðvíkur evninum sjálvum, men eisini tilfari (í hesum fræ), sum verður brúkt til framleiðsluna og er ein avbjóðing í mun til at fyribyrgja ólógligu nýtsluni við rúsevnum.

Tollmyndugleikarnir mæla tí til, at tað verður virkað fyri, at forboð verður sett fyri innflutningi av cannabisfræi ella, um neyðugt, at tað einans kann flytast inn við serligum loyvi frá avvarðandi myndugleika.[35] Ein avbjóðing í hesum samanhangi hevur víst seg at vera, at cannabisfræ eisini verður nýtt í øðrum samanhangum – eitt nú sum fuglafræ – og tí er spurningurin um at forbjóða ikki einfaldur kortini.

Sambært tollvaldinum eru eisini dømir um nýggj narkotisk evnir, sum koma til landið við posti, og sum fólk bíleggja umvegis internetið. At tað støðugt koma nýggj rúsevnir umvegis internetið, sum eru alternativ til tey meira kendu evnini, er eitt rák, sum eisini er kent í okkara grannalondum.[36] Ein avbjóðing er, at framleiðarar av hesum evnum broyta kemisku samansetingina á hesum evnum fyri at sleppa uttanum innflutningsbann í lóggávuni. Neyðugt er at halda eitt vakið eygað við hesari avbjóðing og støðugt dagføra lógarverkið á økinum fyri at banna innflutningi av teimum euforiserandi evnunum.

### 3.1.2 Strangari lóggáva í Føroyum

Vanliga er revsingin fyri at innflyta rúsevnir hægri í Føroyum enn í Danmark, hóast lógin um euforiserandi evni er donsk og er sett í gildi í Føroyum við ríkislógartilmæli. Hetta kemst av, at sjálvt smáar nøgdir av euforiserandi evnum kunnu hava við sær størri skaðiligar avleiðingar í einum lítlum samfelag enn í einum størri samfelag. Harafturat er sølurprísurin og harvið vinningurin av slíkari sølu munandi hægri í Føroyum enn í Danmark. Sum dømi ber til í Danmark at revsa brot á lógina um euforiserandi evni við ávaring. Ein so lin revsing finst ikki í lógini, sum er sett í gildi í Føroyum.[37]

---

[34] Frásøgn frá fundi um rúsevnisstøðuna í Føroyum, hildin í Fólkaheilsuráðnum, tann 23. oktober 2012. www.folkaheilsa.fo

[35] Skriv frá TAKS til Heilsumálaráðið, dagfest 10. januar 2011.

[36] Stoltenbergudvalget (2010).

[37] Anordning nr. 1321 af 2. december 2014 om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af lov om euforiserende stoffer.

## 3.2 Skuggatøl og fjølmiðlasøgur um rúsandi evnir

Tey almennu yvirlitini um nøgd av rúsevnum og rúsevnisnýtslu benda ikki á stórvegis trupulleikar av hesum evnum. Tó koma javnan útsagnir frá teimum, ið virka í býarlívinum og løgregluni, sum benda á, at vavið av trupulleikanum er størri enn vanliga eygað sær. Summir hoyringspartar høvdu eisini ta fatan, at rúsevni eru lættari at fáa hendur á, enn tað letst. Harumframt síggja vit ein lítlan vøkstur av rúsevnismisnýtarum, sum fara í viðgerð á viðgerðarstovnunum.

Ilt er at gera eina neyva meting av, hvussu er og ikki, men í hesum brotinum verður tikið støði í nøkrum av hesum útsagnum og fatanum. Í frágreiðing, sum Frelsunarherurin[38] hevur latið gjørt um rúsdrekka og rúsevnisnýtslu hjá teimum ungu, sigur fimti hvør næmingur í 3. s í studentaskúlunum í Føroyum seg at hava roynt rúsevni – 34 prosent av dreingjunum og 11 prosent av gentunum. Í kanningini verður ikki spurt, hvørji rúsandi evni talan er um, men neyvan eru tað sonevnd “hørð” evni. Kanningin er gjørd millum ein sera avmarkaðan skara, og sannlíkt er henda kanning ikki umboðandi fyri allan ungdóm í Føroyum. Hinvegin vísir kanningin eina markant øðrvísi mynd, enn almennu tølini gera.

Narkodeildin hjá løgregluni er vitandi um, at rúsevni finnast í náttarlívinum, sum ikki verða skrásett. Hoyringspartar, sum kenna til, hvat fyriferst í býarlívinum, vátta, at hevur tú røttu sambondini, er ikki trupult at fáa hendur á rúsevnum. Nýtslan gongur fyri seg uttanfyri skipaðu tiltøkini á bygd og í bý, eitt nú í morgunballum, aftaná at dansistøð, barrir og annað letur aftur um náttina í vikuskiftunum. Løgreglan metir hetta tó ikki at vera ein stóran trupulleika í náttarlívinum.

Ein nýggj avbjóðing, sum løgreglan, og lutvíst Psykiatriski depilin, hava sæð, er ávís misnýtsla av heiliváginum Ritalin, sum m.a. verður latin persónum við ADHD. Alt fleiri ung verða viðgjørd við hesum heilivági, sum hevur jalig árin fyri tey, ið hava tørv á Ritalini, og er atkoman er tí økt. Hinvegin hevur heilivágurin rúsandi virknað fyri onnur, og dømir eru um, at Ritalin verður brúkt til at rúsa seg. Eisini eru dømir um, at Ritalin er vorðin ein haldilsvøra, og hevur løgreglan í fjølmiðlunum víst á, at ein ávís søla av Ritalini fyrigongur millum ung.[39]

Vanlig mannagongd er, at bert serlækni í psykiatri setur medisinsku viðgerðina í verk, og kommunulækni fylgir upp. Tá tað snýr seg um børn, tekur Psykiatriski depilin sær í stóran mun av at fylgja upp eisini. Í Danmark hevur hesin sami tendensur við misnýtslu verið at sæð, og eru atlit tikin til henda trupulleika í nýggjum leiðreglum frá danska Heilsustýrinum. Heilsumálaráðið eigur at hava eitt vakið eyga við hesum frameftir.

## 3.3 Upplýsing og hugburðsrøkt

Fólkaheilsuráðið viðurkennir, at rúsevni í ein ávísan mun eru í umfari – og hvat er so til ráða at taka? Svarið er sambært Fólkaheilsuráðnum einfalt: Upplýsing og hugburðsrøkt. Í dag er tað soleiðis, at skúlin, skúlaheilsuskipanin og Fólkaheilsuráðið royna at læra tey ungu, at narkotika er vandamikið. Bæði tí tað kann hava lívsoyðileggjandi bundinskap við sær, men eisini tí hesi rúsevni kunnu hava lívshættisliga akutta eitran við sær; enntá deyða, tí andadrátturin verður doyvdur so nógv, at persónurin doyr av súrevnistroti. Ein annar trupulleiki er, at av tí at evnini eru ólóglig, er onki góðskueftirlit við teimum, soleiðis sum vit hava tað við eitt nú heilivági. Tann, sum tekur narkotika, veit ikki fyri vist, hvat viðkomandi hevur við at gera. Rúsevnið kann vera nakað heilt annað, enn hvat viðkomandi roknaði við, og kann eisini vera nógv sterkari enn mett og í ringasta føri hava deyða við sær.

---

[38] Jacobsen (2014).

[39] http://kvf.fo/netvarp/uv/2013/04/12/ritalin-endar-gtuni-froyum

Hendan vitan er umráðandi at fáa út millum fólk. Fyri tað fyrsta, at rúsevni kunnu krøkja fólk, eins og sigarettir og rúsdrekka kunnu, og so verða tey trælir stóran part av lívinum. Fyri tað næsta, eru ólóglig rúsevni altíð líka. Tey kunnu verða lívshættisliga sterk, og tað hevur deyðsvanda við sær. Hetta er nú sum áður ein uppgávu fyri bæði myndugleikarnar, men eisini er tað umráðandi, at heimini greiða teimum ungu frá vandunum við rúsevnum.[40]

---

**Forboð fyri innflutningi av cannabisfræi.** Virkað verður fyri, at forboð verður sett fyri innflutningi av cannabisfræi ella um neyðugt, at tað einans kann flytast inn við serligum loyvi frá avvarðandi myndugleika.

**Støðugt dagføra regluverkið um euforiserandi evni.** Týðandi er at dagføra listarnar við euforiserandi evnum, sum eru ólóglig at innflyta til landið og sum hoyra til lógina, so hvørt sum broytingar koma í gildi í Danmark.

**Fylgja gongdini á rúsevnisøkinum neyvt.** Skipað verður fyri árligum fundum millum Heilsumálaráðið, løgreglu, Landsapotekara, Landslækna, Fólkaheilsuráð, Psykiatriska depilin og Kommunulæknafelagið at umrøða gongdina við heilivágsmisnýtslu.

**Fólkaheilsuráðið skipa fyri kampanju um vandarnar við rúsevnismisnýtslu.** Fólkaheilusráðið eigur at seta málið á skrá í 2016.

---

[40] www.folkaheilsa.fo

# Kapittul 4 – Stevnumið: Fyribyrging í øllum liðum

Rúsdrekkanýtsla hevur við sær heilsuvandar. Vandin fyri sjúku, skaða og at gerast bundin av rúsdrekka økist, tess meira tú drekkur. Rúsdrekkanýtsla kann eisini hava avleiðingar fyri onnur enn tann, sum drekkur, og fyri samfelagið sum heild. Tí er neyðugt at tálma nýtsluni av rúsdrekka.

Sum útgangsstøði eru marknaðarkreftir sum útboð og eftirspurningur, prísur og atkoma eisini galdandi fyri rúsdrekka. Aktørar vilja av givnum orsøkum fáa so stóran vinning burturúr og brúka siðbundnar hættir at ávirka eftirspurningin og nýtsluna av rúsdrekka. Yvirskipað mugu tey fyribyrgjandi átøkini tí bæði taka atlit til at minka um atkomuna og eftirspurningin.

At avmarka atkomuna til rúsdrekka hevur víst seg at vera hitt mest virkna átaki.[41] [42] Tiltøk at minka um eftirspurningin snúgva seg um fyribyrging, viðgerð, endurmenning og at minka um skaðan av rúsdrekka. Prísásetan er dømi um amboð fyri at minka um eftirspurningin. Í hesum kapitli verður greitt frá visjónini handan rúsdrekka- og rúsevnispolitikkinum, og síðani verður stutt trivið í tey átaksøki, sum politikkurin byggir á og fevnir um. Í fylgjandi kapitlum verða átaksøkini lýst og greinað nærri.

## 4.1 Heilsunýskipanin og fyrbyrging

Rúsdrekka- og rúsevnispolitikkurin hjá landsstýrinum byggir á ta yvirskipaðu heilspolitisku kós, ið varð sett, tá landsstýrismaðurin í heilsumálum legði fram Heilsunýskipanina í november 2013. Visjónin í Heilsunýskipanini er einføld, men ambitiøs: "Føroyingar skulu hava betri møguleika at liva eitt langt og virkið heilsugott lív uttan sjúku".[43]

Fyri at røkka hesum er neyðugt við góðum fyribyrgjandi arbeiði, skjótum innsatsi og dyggari viðgerð. Sum landsstýrismaðurin, Karsten Hansen, orðaði tað, snýr tað seg um fyribyrging, fyribyrging og fyribyrging. Við støði í aðalendamálinum í Heilsunýskipanini er stevnumiðið fyri Rúsdrekka- og rúsevnispolitikk Føroya hesi.

Vit skulu vera nógv betri til at fyribyrgja, at fólk gerast sjúk av rúsdrekka og rúsevnum í heila tikið. Kanningar úr eitt nú Finnlandi vísa, at beinleiðis samband er ímillum talið av teimum, ið hava eina skaðiliga nýtslu av rúsdrekka, og samlaðu nýtsluna – miðalnýtsluna – í einum landi. Tí er neyðugt við einum politikki, sum tálmar samlaðu nýtsluni av rúsdrekka.[44]

Tá fólk kortini gerast sjúk av rúsdrekka, skulu vit við røttu viðgerðini til røttu tíð fyribyrgja, at fólk gerast so illa fyri, at tey noyðast á sjúkrahús ella á eitt viðgerðarheim fyri at koma seg. Tað sentrala í hesum er, at vit finna sjúkueyðkennini skjótt og veita eina skjóta og dygga hjálp. Til dømis verður sagt, at fólk ganga við rúsdrekkatrupulleikum í miðal í 10-12 ár, áðrenn tey koma í intensiva viðgerð.[45]

---

[41] Helse- og omsorgsdepartementet (2012).
[42] World Health Organization ( 2012)b.
[43] Frágreiðing til aðalorðaskifti um Heilsunýskipan (2013).
[44] Rossow, Makela, Kerr  (2014).
[45] Sundhedsstyrelsen (2012).

At finna trupulleikan tíðliga er harvið ein týðandi liður í at fyribyrgja, at tú verður ov illa ávirkaður av sjúkuni. Inntrivið er sannlíkt eisini nógv minni, um tú finnur trupulleikan beinanvegin, og áðrenn sjúkan er sloppin at vaksa.

Í triðja lagi, at vit skulu fyribyrgja, at tey, ið verða noydd at fáa viðgerð, ikki vera innløgd aftur eftir lidna viðgerð. Tað gera vit bert við í fyrra lagi at bøta um sjálvi viðgerðartilboðini, umframt at styrkja tilboðini uttanfyri og úti í økjunum, so borgarin kemur fyri seg aftur, og aftur kann gerast virkin partur av samfelagslívinum.

## 4.2 Tilmælini hjá WHO um fyribyrgjandi átøk á rúsdrekkaøkinum

Tað er týðandi, at ein national átaksheildarætlan sum henda tekur støði í átøkum, sum prógv eru fyri, eru virkin – tað vil siga byggir á evidensgrundað vitan.

Í frágreiðingunum "European Status Report on Alcohol and Health 2010"[46] og "Alcohol in the European Union. Consumption, harm and policy approaches"[47] frá 2012 vísir heimsheilsustovnurin WHO á teir bestu hættirnar at fyribyrgja og viðgera rúsdrekkamisnýtslu. Niðanfyri eru nevnd tey mest viðkomandi økini, sum tilmælini hjá WHO um fyribyrgjandi tiltøk snúgva seg um, umframt tvey úr heildarætlan frá danska Heilsustýrinum.[48] Hesi evidensgrundaðu átøk eru bulurin í Rúsdrekka- og rúsevnispolitikki Føroya.

Tey tilsamans 10 átaksøkini vera í komandi kapitlum sett í ein føroyskan samanhang við tilmælum um møgulig tiltøk.

### *Taka ábyrgd, tilvitan og útinnan*

Í heildarætlanini "Global strategy to reduce the harmful use of alcohol" setur WHO sjóneykuna á týdningin av at taka ábyrgd á hægsta stigi. Víst verður á, at fyri at fáa framt í verki munadygg tiltøk at minka um skaðiligu nýtsluna av rúsdrekka krevst, at tey, ið sita fyri borgum, taka ábyrgd. Somuleiðis krevst ein tilvitan um avbjóðingina og ikki minst útinnan. Víðari sigur WHO, at stjórnir standa yvirfyri týdningarmiklum avgerðum um at seta í verk evidensgrundað átøk, og teirra leiðaraevni í hesum sambandi eru avgerandi. Tiltøk, sum verða tikið fram undir hesum átaksøki, eru at gera ein nationalan rúsdrekkapolitikk og at bøta almennu tilvitanina um rúsdrekka.

### *Atkoma*

WHO vísir á, at prógv eru fyri, at avmarkingar í møguleikunum fyri sølu av rúsdrekka hava eina tálmandi ávirkan á rúsdrekkanýtsluna, og at vandin fyri skaðiligari nýtslu minkar. Hitt besta amboðið fyri at avmarka atkomuna til rúsdrekka er sambært WHO, at tað almenna stýrir útbreiðsluni av og selur rúsdrekka. Í høvuðsheitum eru tveir mátar at skipa hetta uppá: við einkarsølu og við skeinkiloyvum. Onnur evidensgrundað átøk fyri at avmarka atkomuna til rúsdrekka eru at hava færri sølustøð, at hava avmarkaðar upplatingartíðir og at áseta eitt aldursmark fyri keyp og nýtslu av rúsdrekka.

---

46 World Health Organization (2010)b.
47 World Health Organisation (2012)a.
48 Sundhedsstyrelsen (2012).

*Prísásetan*

Avgjøld hava víst seg at vera ein munadyggur háttur at minkað um skaðiligu rúsdrekkanýtsluna. WHO vísir tó á, at avgjøld gera ikki eins stóran mun hjá teimum, ið hava betur ráð enn hjá teimum, ið hava minni, og tí kunnu avgjøld ikki væntast at hava somu effekt í øllum sosialum samfelagsløgum.

*Marknaðarføring*

At avmarkað møguleikarnar fyri at lýsa fyri rúsdrekka er eisini týðandi í hesum sambandi. Rúsdrekka verður í dag í størri og størri mun marknaðarført við nýggjum snildum, sum tala til brúkaran. WHO vísir á, at kanningar vísa, at ung, sum síggja lýsingar fyri rúsdrekka, fara við størri sannlíkindum at byrja at drekka og tey, ið longu drekka, fara at drekka meira. Tí verður mælt til at hava eitt serliga vakið eyga við at verja børn og ung fyri hesum lýsingum.

*Rúsdrekkakoyring*

Átøk ímóti rúsdrekkakoyring eru sambært WHO effektiv í mun til at minka um skaðiligu nýtsluna av rúsdrekka og í mun til at forða rúsdrekkatengdum ferðsluóhappum. Eitt av tilmæltu átøkunum er at áseta eitt lágt promillumark.

*Minka um skaðiligu árinini, tá ið drukkið verður*

Eitt av tilmælunum í "Global strategy to reduce harmful use of alcohol" frá 2010 er at tryggja eina ábyrgdarfulla útskeinking. Hetta snýr seg millum annað um at handhevja lógina, sum setur forboð fyri at selja og skeinkja rúsdrekka til ung undir 18, og sum eisini setur forboð fyri at skeinkja persónum, sum longu eru sjónliga ávirkaði. Eftirmetingar av miðvísum átøkum á hesum øki vísa eitt markant fall í harðskapsmálum í býarlívinum.

*Fyribyrging og rúsdrekkaviðgerð í heilsuverkinum*

Eitt vælvirkandi heilsuverk er grundarsteinurin undir bæði at veita viðgerð fyri skaðiligu nýtsluna av rúsdrekka og at fyribyrgja, at skaðilig nýtsla tekur seg upp. Millum tilmælini er ein stutt ráðgevandi samrøða (brief intervention) hjá kommunulækna – ella aðrastaðni í primera geiranum – við tey, ið hava eina stóra nýtslu ella eina skaðiliga nýtslu av rúsdrekka.

*Yvirvøka (monitorering) og eftirmetingar*

WHO vísir á, at tað hevur týdning at vaka yvir og eftirmeta tey átøk, ið verða sett í verk. Hetta kann gerast við hagtølum, skrásetingum og fólkateljingum. Endamálið er millum annað at fáa eitt yvirlit yvir tey, ið drekka ov nógv, hvat verður drukkið og bakgrundina fyri tí skaðiligu rúsdrekkanýtsluni. Hetta eru dáta, sum kunnu brúkast til fyribyrging og somuleiðis til at meta um effektina av møguligum átøkum.

Í frágreiðingini hjá danska Heilsustýrinum um rúsdrekka frá 2012[49] verður víst á tvey onnur átaksøki, sum verða mett góð, hóast tað vísindaliga grundarlagið fyri effektini ikki er so eintýðugt.

*At hava rúsdrekkapolitikkar á arbeiðsplássum, á stovnum og í ítróttarfeløgum*

Orðaðir rúsdrekkapolitikkar kunnu avmarkað atkomuna til rúsdrekka og tryggja, at lyklapersónar hava rætta førleikan, so persónar við rúsdrekkatrupulleikum kunnu fáa skjóta hjálp og um neyðugt koma í neyðuga viðgerð. Tú kanst tí siga, at í slíkum politikkum renna saman tríggir av teimum mátum, sum hava sannførandi skjalprógv – avmarkaða atkomu, skjóta hjálp og rúsdrekkaviðgerð.

---

[49] Sundhedsstyrelsen (2012).

### *Undirvísing í skúlum og kampanjur*

Skjalprógv eru ikki fyri, at undirvísing í skúlum og kampanjur í sjálvum sær hava eina effekt, men hesi átøk stuðla undir onnur, sum hava eina beinleiðis ávirkan á at avmarka nýtsluna av rúsdrekka. Hetta kann til dømis vera aldursmark fyri keyp av rúsdrekka. Somuleiðis er undirvísing og kunning sambært danska Heilsustýrinum ein týðandi kelda til vitan um evnið, ið er avgerandi, tá ið vit tosa um møguligar broytingar í atferð.

# Kapittul 5 – 10 ítøkilig átaksøkir

Í hesum kapitli vera tey tilsamans 10 átaksøkini, sum vóru sett fram í kapittul 4, sett í ein føroyskan samanhang við tilmælum um møgulig tiltøk.

## 5.1 Átaksøki 1: Taka ábyrgd, tilvitan og útinnan

Fyri at fáa framt í verki munadygg tiltøk at minka um skaðiligu nýtsluna av rúsdrekka krevst, at tey, sum ráða, eisini taka ábyrgd. Somuleiðis krevst ein tilvitan um avbjóðingina, og ikki minst skal stórt fokus vera á dygga útinnan. Eitt grundleggjandi tiltak í hesum sambandi er at gera ein nationalan rúsdrekka- og rúsevnispolitikk, umframt at um bøta almennu tilvitanina um skaðiligu árinini av rúsdrekka og rúsevnum.

Fyri at tryggja, at átøkini, sum stjórnir seta úr í kortið á rúsdrekka- og rúsevnisøkinum, verða realiserað, mælir WHO til at leggja ábyrgdina at fylgja átøkunum upp til ein stovn ella til eina skrivstovu. Heimsheilsustovnurin metir, at henda uppgáva liggur best í heilsupolitiskum høpi.[50]

Sæð í føroyskum høpi, so hevði Rúsdrekka- og narkotikaráðið søguliga hesa uppgávu. Í 1991 evnaði ráðið til ein rúsdrekka- og rúsevnispolitikk,[51] sum á nógvar mátar hevur verið grundarlagið fyri, hvussu vit hava skipað atkomuna til rúsdrekka síðani. Í 2000 varð Rúsdrekka- og Narkotikaráðið saman við Tubbaksráðnum og AIDS-ráðnum lagt í eitt nýtt ráð, sum fekk navnið Fyribyrgingarráðið. Seinni varð hetta broytt til Fólkaheilsuráðið.

Samskipandi uppgávan at halda eyga við yvirskipaða endamálinum við rúsdrekka- og rúsevnispolitikkinum – og at fylgja mongu tilmælunum upp fyri at tryggja, at tey verða sett í verk – eigur at liggja á stovni ella stjórnarráði undir landsstýrismanninum í heilsumálum. Arbeitt verður við at umskipa Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Fólkaheilsuráðið til nýggjan Fólkaheilsustovn, og vildi uppgávan at halda eitt vakið eyga við verksetanini av politikkinum ligið væl á hesum stovni.

### 5.1.2 Nationalu tilmælini um rúsdrekkanýtslu

Fólkaheilsuráðið hevur sambært lóg til uppgávu at styrkja tiltøk fyri heilsufremjing og sjúkufyribyrging. Ráðið hevur rúsdrekka sum eitt av fleiri fokusøkjum. Onnur øki eru royking, kostur og rørsla.[52]

Fólkaheilsuráðið hevur í 2012 alment boðað frá sínum tilmæli um rúsdrekkanýtslu. Tilmælið tekur støðið í tilmælunum hjá danska Heilsustýrinum. Fólkaheilsuráðið hevur viðgjørt hesi tilmæli og tekur undir við teimum, men heldur, at boðskapurin er eitt sindur ov torskildur. Tí mælir Fólkaheilsuráðið fólki til at drekka sum minst.[53]

---

[50] World Health Organization (2014).
[51] Rúsdrekka- og Narkotikaráðið (1991).
[52] Løgtingslóg nr. 56 frá 10. mai 2000 um Fólkaheilsuráð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 111 frá 11. desember 2007.
[53] http://www.folkaheilsa.fo//rusdrekka+er+ongantid+vandaleyst_aqvu.html

Tilmælini hjá danska Heilsustýrinum um rúsdrekkanýtslu eru annars hesi:

- Rúsdrekka er ongantíð vandaleyst.
- Drekk ikki fyri heilsuna.
- Tað er lítil vandi fyri at gerast sjúk/-ur av rúsdrekka, um kvinnur drekka færri enn 7 alkoeindir og menn færri enn 14 um vikuna.
- Tað er stórur vandi fyri at gerast sjúk/-ur av rúsdrekka, um kvinnur drekka fleiri enn 14 alkoeindir og menn fleiri enn 21 um vikuna.
- Drekk ongantíð meira enn fimm alkoeindir í senn.
- Kvinnur við barn eiga ikki at drekka alkohol. Kvinnur, ið royna at gerast við barn, eiga heldur ikki at smakka sær á – hetta av fyrivarnisávum.
- Eldri fólk eiga at vera serliga varin við rúsdrekka.

### 5.1.3 Málið er at minka miðalnýtsluna í Føroyum

Rúsdrekka- og Narkotikaráðið gjørdi sum nevnt longu í 1991 álit um rúsdrekka- og rúsevnispolitikk í Føroyum.[54] Millum tilmælini vóru at skipa eina almenna einkarsølu, at reka ein virknan príspolitikk fyri at tálma søluni av rúsdrekka, at styrkja tey fyribyrgjandi og upplýsandi tiltøkini – serliga vend móti teimum ungu og barnakonum – umframt at styrkja og víðka um viðgerðartilboðini fyri rúsdrekkamisnýtarar.

Aðalendamálið við rúsdrekkapolitikkinum frá 1991 var at tálma "og at fáa minkað forbrúkið sum heild" í Føroyum. Tað er samband millum samlaðu nýtsluna av rúsdrekka í einum landi og teir samlaðu trupulleikarnir, t.v.s. at er samlaða nýtslan høg, er talið av stórdrekkarum eisini høgt, og øvugt, er samlaða nýtslan lág, eru eisini færri, sum hava eina skaðiliga nýtslu av rúsdrekka.

Síðani 1991 hava Rúsdrekka- og Narkotikaráðið og seinni Fyribyrgingarráðið og Fólkaheilsuráðið bygt síni tilmæli um rúsdrekka á, hvussu stór miðalnýtslan hevur verið í Føroyum. Við støði í álitinum frá 1991 hevur Fólkaheilsuráðið ásett sum mark, at miðalnýtslan helst ikki skuldi vera yvir sjey litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri í Føroyum. Skorið út í papp, so hevur ráðið mælt til tálmandi átøk, um miðalnýtslan var omanfyri sjey litrar, eitt nú við amboðum sum prísi og/ella útsølustøðum.

Í áliti, sum varð latið Heilsumálaráðnum í 2012, mælir Fólkaheilsuráðið til at miðað verður ímóti, at árliga miðalnýtslan fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri minkar til í mesta lagi seks litrar av reinum alkoholi.[55] Hóast almennu tølini vísa, at nýtslan er lutfalsliga lág í Føroyum, so er rúm fyri bata. Høvuðsorsøkin er, at upp ímóti fjórði hvør ikki drekkur yvirhøvur. Tað merkir, at miðalnýtslan hjá teimum, ið drekka, er lutfalsliga hægri.

At brúka miðalnýtsluna at stýra eftir er kent fyribrigdi í Norðurlondum. Totalkonsummodellið, sum tað verður rópt, er ein einfaldur máti at lýsa støðuna viðvíkjandi rúsdrekkanýtsluni í einum landi, og er eitt týðandi amboð at stýra rúsdrekkapolitikkinum við. Gransking vísir, at um miðalnýtslan er lág, er talið av teimum, sum hava eina skaðiliga nýtslu av rúsdrekka, eisini lágt. Sostatt kanst tú avmarka teir skaðarnar, sum eru tengdir at rúsdrekka, við at halda samlaðu miðalnýtsluni í einum landi á einum lágum støði.[56]

---

[54] Rúsdrekka- og Narkotikaráðið (1991).
[55] Fólkaheilsuráðið (2012).
[56] Rossow, Makela, Kerr (2014).

**Uppfylging og íverksetan av átøkum**. Fólkaheilsustovnurin fær til uppgávu at tryggja, at átøkini í hesum Rúsdrekka- og rúsevnispolitikki verða fylgd upp og sett í verk.

**Minka miðalnýtsluna**. Málið er, at árliga miðalnýtslan av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri minkar til í mesta lagi 6 litrar í 2020.

## 5.2 Átaksøki 2: Atkoma

Semja er um, at virknastu amboðini, tá ið tað snýr seg um at ávirka rúsdrekkanýtsluna og forða fyri heilsuskaðiligari ovurnýtslu av rúsdrekka í einum samfelagi, eru atkomuviðurskifti og prísir.[57] Tá ið vit tosa atkomu, eru virknastu amboðini serliga átøk, sum avmarkað sølustøðini, sum avmarkað upplatingartíðir og átøk, sum áseta (og tryggja) aldursmark fyri keyp av rúsdrekka. Tú kanst siga, at føroyska skipanin við almennari rúsdrekkasølu er eitt dømi um skipan, sum arbeiðir við øllum hesum trimum amboðum. Í hesum parti verður føroyska einkarsøluskipanin viðgjørd nærri við serligum atliti til, hvørjar avbjóðingar skipanin stendur fyri í dag.

### 5.2.1 Einkarsøluskipan

Ein skipan við rúsdrekkaeinkarsølu merkir, at ein stovnur ella fyritøka antin heilt ella partvíst hevur einkarrætt til m.a. at flyta inn og selja ymsu sløgini av rúsdrekka. Í slíkum er talan aloftast um stovnar ella fyritøkur, sum landið eigur. Í øllum Norðurlondum eru skipanir við einkarsølum – tó undantikið Danmark og Grønland. Hóast talan er um einkarsølur, so eru hesar skipaðar ymiskar í grannalondunum.[58]

Uppgávan hjá einkarsølum er einføld, men avbjóðandi. Einkarsølan stendur fyri at selja rúsdrekka og hevur samstundis eina samfelagsuppgávu at tálma nýtsluni av rúsdrekka. Sostatt virka einkarsølur í krossøkinum millum at reka virksemi sítt á ein slíkan hátt, at bæði krøvini frá viðskiftafólkunum um vørur og tænastur og krøvini frá myndugleikunum um at tálma rúsdrekkanýtsluni verða rokkin.

Skipanin við einkarsølu hevur við sær, at tað samstundis bæði ber til at føra ein varnan rúsdrekkapolitikk, betra eftirlitsmøguleikarnar, taka atlit til heilsustøðuna hjá fólki og stýra gongdini viðvíkjandi sølustøðum.

Millum serfrøðingar er breið semja um, at atkomumøguleikarnir til rúsdrekka hava sera stóran týdning á rúsdrekkanýtsluna.[59] Kanningar vísa, at tess lættari atkomiligt rúsdrekka er, tess størri er miðalnýtslan.[60] Og øvugt. Um atkomumøguleikarnir eru meira avmarkaðir, tess lægri er miðalnýtslan. Ein skipan við einkarsølu er tískil eitt munadygt amboð til at tálma rúsdrekkanýtsluna og harvið at fyribyrgja rúsdrekkatengdum skaðum og trupulleikum.

Ein fyritreyt fyri at kunna hava eina skipan við einkarsølu er, at henda bæði hevur undirtøku millum fólk sum heild og politiskt. Ein slík skipan má tí hava nakrar dygdir, sum ger, at fólk taka undir við henni. Hetta eigur fyrst og fremst at vera dugnalig, vælútbúgvin starvsfólk, sum kenna nógv til ymsu vørusløgini og harvið kunnu

[57] Helse- og omsorgsdepartementet (2012).
[58] Ørnberg, Ólafsdóttir (2007).
[59] World Health Organization (2014).
[60] Helse- og omsorgsdepartementet (2012).

veita viðskiftafólkum eina góða ráðgeving. Harumframt skal ein einkarsøla eisini átaka sær at hava eina nógv størri vørugoymslu og -úrval enn vanlig handilsáhugamál tilskila.

Kanningar benda á, at undirtøkan fyri einkarsøluskipan í Føroyum er á eini leið, men skipanin hevur ikki stuðul millum øll. Gallup-kanningar, sum Rúsdrekkasøla Landsins[61] hevur latið gjørt í august og í november 2013, vísa, at umleið helmingurin av teimum spurdu siga seg vera nøgd ella sera væl nøgd við verandi skipan við einkarsølu, sí talvu niðanfyri. Í kanningini frá august 2013 svaraðu 41 prosent, at tey vóru ónøgd ella sera ónøgd við einkarsøluskipanina. Í november varð úrslitið, at 31 prosent vóru ónøgd ella sera ónøgd við verandi skipan.

Tað er týðandi at skilja ímillum nøgdsemi við einkarsøluskipanina sum søluskipan og nøgdsemi við tænastuna, sum starvsfólk og leiðsla veita innan karmarnar á Rúsdrekkasøluni. Spurd, um fólk vóru nøgd við tænastuna, sum Rúsdrekkasølan veitir, svaraðu fólk í stóran mun, at tey vóru nøgd við tænastuna. Í somu kanning frá november í 2013 svaraðu 41 prosent av teimum spurdu, at tey ynsktu, at rúsdrekka fekst til keyps í matvøruhandlum. Í meginøkinum er talið hægri. Spurnarkanning, sum Gallup gjørdi fyri politiskan flokk[62] í 2014, vísti, at meira enn helmingurin av teimum spurdu tóku undir við, at øl og vín kundi fáast til keyps í matvøruhandlum. Gev gætur, at her bert varð spurt um at selja øl og vín í matvøruhandlum – ikki spiritus. Slíkar kanningar frá politiskum flokkum skulu takast við neyðugum fyrivarni, men rímiligt samsvar er millum kanningarnar.

Samanbera vit við undirtøkuna í Svøríki fyri svensku einkarsøluni “Systembolaget”, so er ávísur munur. Í kanning, sum Systembolaget gjørdi í 2014, søgdu 74 prosent seg taka undir við skipanin við einkarsølu í Svøríki.[63] Hóast slíkar samanberingar skulu takast við fyrivarni, er greitt, at føroyingar sum heild ikki eru eins fegnir um skipanina við einkarsølu sum sviar.

[61] Rúsdrekkasøla Landsins.
[62] Løgtingsmál nr. 123/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingsló innflutning og sølu av rúsdrekka (innflutningur og søla av víni og øli).
[63] http://www.systembolaget.se/vart-uppdrag/sa-sager-folket/

Talva 6: Hvussu nøgd/-ur ert tú við verandi skipan við einkarsølu av rúsdrekka í Føroyum?




Kelda: Rúsdrekkasøla Landsins.

Spurningurin um, hvørja søluskipan vit eiga at hava frameftir, verður viðgjørdur nærri seinni í hesum kapitli. Fyrst verður galdandi føroyska skipanin við einkarsølu nærri lýst.

### 5.2.1.1 Rúsdrekkasøla Landsins

Tá ið rúsdrekkalógin kom í gildi í 1992, varð gjørt av at seta eina skipan við eini almennari einkarsølu á stovn, nevnd Rúsdrekkasøla Landsins. Rúsdrekkasøla Landsins hevur einkarrætt til at flyta inn og selja rúsdrekka í Føroyum.[64] Tað er ásett í ávikavist løgtingslóg[65] og kunngerð,[66] hvussu Rúsdrekkasøla Landsins skal skipast og rekast.

Rúsdrekkasøla Landsins er skipað sum stovnur undir Vinnumálaráðnum við egnum rakstrarstaði á løgtingsfíggjarlógini.[67] Sambært § 2, stk. 2 í kunngerðini um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins er ásett, at:

> "Stovnurin eigur í so stóran mun sum gjørligt at verða rikin út frá handilsligum sjónarmiðum tó við neyðugum atliti til heilsuligu sjónarmiðini, sum eru ásett í endamálsgreinini í lógini."

---

[64] Í lógini er ásett, at sum rúsdrekka er at skilja allur løgur, sum hevur minst 2,8 rúmprosent av alkoholi í sær. Undantikið hesi lógini er heilivágur, sum Apoteksverkið innflytur.

[65] Løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 17. mai 2011.

[66] Kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins, sum seinast broytt við kunngerð nr. 19 frá 24. mars 2010.

[67] Sambært málsøkjabýtinum umsitur landsstýrismaðurin við vinnumálum Rúsdrekkasølu Landsins. Málsøkjabýtið er ásett í Fráboðan nr. 148 frá 14. november 2011 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar, sum seinast broytt við fráboðan nr. 92 frá 4. september 2014.

Við tað, at Rúsdrekkasøla Landsins er skipað sum ein einkarsøla, hevur hon ávís einkarrættindi og einkarskyldur, umframt at hon skal taka samfelagslig atlit, bæði í mun til at tálma rúsdrekkanýtsluni, hava eitt fjølbroytt vøruúrval og hava eitt árligt fíggjarligt avlop.

#### 5.2.1.2 Sølustøð

Rúsdrekkasøla Landsins hevur sjey sølustøð kring landið. Tey eru í Tórshavn, Klaksvík, Saltangará, Miðvági, á Sandi,[68] Drelnesi og við Norðskála. Tey fyrstu seks sølustøðini vóru sett á stovn í tíðarskeiðinum frá 2. november 1992 til 5. juli 1993, meðan sølustaðið á Norðskála lat upp tann 20. mai 2015. Harumframt er goymsla á Hjalla. Fyrisitingin húsast í Tórshavn.

Í kunngerðini um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins er ásett, at "Rúsdrekkasøla Landsins verður skipað við sølustøðum um landið." Sambært galdandi skipan er ongin áseting um, hvussu nógv sølustøð skulu vera kring landið, hvar í landinum tey skulu vera, støðd á teimum, hvar tey skulu liggja. Tað er sostatt leiðslan á Rúsdrekkasølu Landsins, sum tekur avgerð um hesi viðurskifti.

Spurningurin um, hvar sølustøð skulu liggja, hevur verið reistur nakrar ferðir. Eisini politiskt. Spurningur hevur verið settur við, um tað er í samsvari við endamálsorðingina, at Rúsdrekkasølan til dømis hevur søludeild í handilsmiðstøð, ella um tær áttu at húsast í serstøkum hølum.[69] Staðfestast kann, at Rúsdrekkasølan longu heldur til í handilsmiðstøð, eins og aðrar deildir liggja tætt við handilsøki. Fyri bryggjaríini eru ei heldur slíkar serligar staðsetingarreglur galdandi, og húsast eisini tey tætt við handilsøki og bústaðarøki.

Politiskt eru mál um at áseta treytir fyri, hvar søludeildir kunnu húsast, feld í Løgtinginum. Ein orsøk er, at hetta verður mett at vera ein munandi broyting í grundarlagnum hjá bæði tí almenna stovninum og teimum privatu aktørunum at virka á økinum. Leggjast kann aftrat, at Loyvisnevndin setur sum treyt, at útflýggingarhøli skal verða skilt frá øðrum handlum, um tað er partur av einum størri handilsøki.

#### 5.2.1.3 Krav um rakstraravlop

Fíggjarkarmarnir hjá Rúsdrekkasølu Landsins eru ásettir í kunngerð.[70] Ásett er, at Rúsdrekkasølan hevur egið stað á fíggjarlógini, og harumframt skal stovnurin hava eitt árligt rakstraravlop. Hvussu stórt hetta avlop skal vera, verður ásett í árligu fíggjarlógunum. Henda ásetingin merkir somuleiðis, at verður kravið um rakstraravlop ikki rokkið, er neyðugt antin at seta tiltøk í verk fyri at selja meira, ella at fáa til vega eina eykajáttan í eini eykajáttanarløgtingslóg.

Sum tað sæst í talvu 7 hækkaði kravið til avlop í rakstrinum við út við 50% frá 2009 til 2010, frá at vera 11,8 mió. kr. til at vera 16,8 mió.kr. Síðani 2010 hevur árliga avlopskravið verið 16,8 mió. kr.

---

[68] Í tíðarskeiðinum 1993 – 2014 var sølustaðið hjá Rúsdrekkasølu Landsins í Skálavík. Í 2014 flutti sølustaðið í hølir á Sandi.

[69] Løgtingsmál nr. 46/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka.

[70] Kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins, sum seinast broytt við kunngerð nr. 19 frá 24. mars 2010.

Talva 7: Ásetingar á fíggjarlógum um rakstraravlop og árlig rakstraravlop

| (1.000 kr.) | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avlopskrav | 11.848 | 11.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 |
| Avlop | 11.733 | 11.731 | 16.505 | 16.308 | 16.849 | 16.856 | 16.650 |
| Munur | 115 | 117 | 343 | 540 | 1 | 8 | 198 |

Kelda: Rúsdrekkasøla Landsins (2014).

Av tí, at avlopskravið hækkaði nógv í 2010, var neyðugt hjá Rúsdrekkasølu Landsins at seta fleiri tiltøk í verk til tess at røkka hesum kravi.[71] Fleiri umskipanir vórðu gjørdar, bæði viðvíkjandi prísásetingini og í raðfestingum innanhýsis. Rúsdrekkasølan upplýsir, at væl minni er brúkt til íløgur, viðlíkahald og førleikamenning enn í tíðini, áðrenn avlopskravið hækkaði.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur kunnað um, at við óbroyttum inntøkum er vandi fyri, at kravið um hækkað avlop fær óhepna ávirkan á tænastustøðið og trivnaðin. Rúsdrekkasølan hevur tørv á at gera íløgur í KT, fløskumóttøkur og at uppraðfesta førleikamenningina aftur – bæði vanligu starvsfólkamenningina og hana, sum er ætlað vørukunnleika/-ráðgeving – umframt at tað fer at gerast alt truplari at liva upp til ásetta avlopskravið.

Hóast Rúsdrekkasøla Landsins skal hava árligt rakstraravlop, eru sambært galdandi reglum ongar ásetingar um, hvat endamálið er við rakstraravlopinum, og hvat tað skal nýtast til, og tí er kravið eitt slag av eyka skatti, sum viðskiftafólkini rinda.

Kjak hevur verið um heimild yvirhøvur er fyri avlopskravinum. Vanliga skulu skattir hava heimild í serlóg og í fíggjarlóg, men heimildin fyri, hvussu stórt avlopskravið skal vera, er bert ásett í fíggjarlóg og hevur ikki greiða heimild í serlóg.

#### 5.2.1.4 Játtanarskipanin ger einkarsøluskipanina ov stirvna

Sum heild hava hoyringspartarnir gjørt vart við, at ásetingarnar í galdandi reglum um, at Rúsdrekkasøla Landsins bæði skal taka handilslig atlit (t.v.s. kravið um rakstraravlop) – og skal taka heilsulig atlit (t.v.s. tálma rúsdrekkanýtsluna) – eru í andsøgn við hvørt annað. Somuleiðis er trupult at reka Rúsdrekkasølu Landsins undir verandi skipan. Ført verður fram, at sjálv skipanin er ein forðing fyri, at Rúsdrekkasøla Landsins kann leggja virksemið sítt til rættis á skynsamasta hátt við atliti til íløgur, ábøtur og tílíkum.

Sum er, virkar Rúsdrekkasølan, sum aðrir almennir stovnar, undir játtanar- og fíggjarlógarskipan landsins. Henda skipan verður mett at hóska illa til ein landsstovn, sum rekur handilsligt virksemi, tí játtanarskipanin tekur ikki í nóg stóran mun atlit til tær avbjóðingar, sum handilsfyritøkur hava fíggjarliga og rakstrarliga.[72]

Aðrir almennir stovnar, sum reka handilsligt virksemið, – eitt nú Strandferðslan og Apoteksverkið – renna seg í somu avmarkingar. Hetta er m.a. viðgjørt í "Álit um apoteksverkið", sum Almanna- og heilsumálaráðið lat gera í 2006[73] og "Frágreiðing um útveitan", sum Vinnumálaráðið hevur gjørt í 2015.[74]

[71] Rúsdrekkasøla Landsins (2014).
[72] Løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan.
[73] Almanna- og heilsumálaráðið (2006).
[74] Vinnumálaráðið (2015).

Galdandi játtanarskipan inniber í stuttum, at Rúsdrekkasølan á hvørjum ári fær eina nettojáttan á Løgtingsins fíggjarlóg. Nettojáttanin svarar til munin millum rakstrarútreiðslurnar og rakstrarinntøkurnar hjá fyritøkuni. Nettojáttanin skal haldast, og er tað uppgávan hjá leiðsluni at fáa munin millum útreiðslur og inntøkur at svara neyvt til játtanina.

Ein slík játtanarskipan egnar seg illa til rakstur, sum er eyðkendur av stórari óvissu, bæði í inntøkum og útreiðslum, sum tað kann vera torført ella nærum ómøguligt at leggja upp fyri.

Í álitinum frá Vinnumálaráðnum (2015) verður sagt, at játtanarskipanin hevur við sær eina stuttskygda fíggjarstýring. Leiðslan má stilla inn á eitt ár í senn og leggja ætlanir eftir teimum kørmum, sum fíggjarlógin gevur eitt ár í senn. Tað longra mennandi arbeiði fyri at fáa effektivari rakstur, má tískil raðfestast lægri.

Hetta er ein íbygdur vansi við játtanarskipanini, har tað t.d. ikki ber til at flyta møgulig yvir- ella undirskot millum ár, og at tað samstundis kann fáa víðfevndar avleiðingar, um nýtslan við ársenda er størri enn játtanin.

Tað er eisini ein vansi fyri Rúsdrekkasølu Landsins, at eitt møguligt avlop eitt ár ikki kann sparast upp og nýtast seinni, eitt nú til íløgur og viðlíkahald og annað. Størri útreiðslur í einum ári krevja størri inntøkur í sama fíggjarári. Tað er ein sannroynd, at stovnar, ið eru á fíggjarlógini, eru bundnir av teirri politisku skipanini, sum ger tað meira stirvið at virka á vinnuligum grundarlagi, tí játtanin er latin teimum fyri eitt ár í senn, og stovnarnir vita ikki fyrr enn við árslok, hvørja játtan teir hava at arbeiða við árið eftir. Rúsdrekkasøla Landsins hevur eisini gjørt vart við, at hetta ger tað trupult at gera ætlanir, seta í gongd virksemi, menna verandi virksemið og gera íløgur í framtíðar virksemi.

#### 5.2.1.5 Varðveita einkarsøluna – tó neyðugt við tillagingum

Fundirnir við hoyringspartarnar góvu ta fatan, at avvarðandi partar í stóran mun eru samdir um, at skipanin við eini einkarsølu er ein skilagóð skipan at røkka endamálinum um at reka ein tálmandi rúsdrekkapolitikk. Skal framhaldandi verða skipanini lív lagað, er tó neyðugt at fremja tillagingar, so Rúsdrekkasølan verður meira tíðarhóskandi og í størri mun lagað til tørvin í dag.

Málið um Rúsdrekkasølu Landsins er ikki "bert" eitt mál um, at brúkarin í Føroyum skal hava avmarkaðar møguleikar at keypa rúsdrekka. Málið snýr seg eins nógv um, hvussu einkarsølan verður skipað, soleiðis at atlit samstundis bæði verða tikin til krøvini hjá brúkarunum um atgongd og úrval og krøvini hjá myndugleikunum um at tálma.

Eitt ávíst trýst hevur í seinastuni verið á politisku skipanina at liberalisera søluna av rúsdrekka. Eitt nú kom hetta til sjóndar, tá Løgtingið á vári 2015 viðgjørdi uppskot frá Framsókn um at loyva sølu av øli og víni í matvøruhandlunum.[75]

Samstundis hoyrast viðhvørt atfinningar frá umboðum fyri ferðavinnu og matstovuvinnu alment at verandi einkarsøluskipan, tí hon eftir teirra tykki forðar møguleikunum fyri menning av teirra vinnum.[76] Funnist verður millum annað á, at grundleggjandi eru somu treytir fyri sølu til kundar, sum koma á sølustøðini at keypa, sum fyri vinnukundar, og hevur Ferðavinnufelagið skotið upp, at Rúsdrekkasølan ikki hevur einkarrætt

[75] Løgtingsmál nr. 123/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka (innflutningur og søla av víni og øli).
[76] Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya (2009).

at innflyta rúsdrekka. Rúsdrekkasølan letur í dag vinnukundum ávísan avsláttur, men ynski hava verið um hava at aðra serskipan fyri vinnukundar, til dømis við lægri avgjøldum.

Framvegis er fortreytin fyri at hava eina skipan við einkarsølu, at hon hevur undirtøku millum fólk – hevur hon ikki tað, fer tað at koma eitt trýst frá fólki um at fáa broytt skipanina til tess at flyta søluna í privatar handlar. Um sølan varð liberaliserað, hevði rúsdrekka vorðið atkomiligt á nógv fleiri støðum enn nú og fleiri tímar hvønn dag, og kappingin um lægri prísir hevði havt við sær vaksandi nýtslu. Sí meira um hetta niðanfyri. Grundarlagið undir verandi rúsdrekkapolitikki hevði tá verið burtur.

Sett á spíssin kanst tú siga, at í roynd og veru stendur valið millum eina vælskipaða einkarsølu, sum lýkur tey krøv, ið brúkarin setur, soleiðis at brúkarin ikki heldur seg hava tørv á fríari rúsdrekkasølu; ella eina fría rúsdrekkasølu, sum ikki hevur serligar avmarkingar, og tí heldur ikki hevur serligar skyldur um upplýsing, vegleiðing og tílíkt.

Flestu hoyringspartarnir halda tí, at landið skal framhaldandi varðveita einkarrættin at innflyta og selja rúsdrekka, men tað er neyðugt at gera broytingar í verandi skipan. Tað er sostatt ikki ein spurningur um, hvørt broytingar skulu gerast, men hvussu hesar verða gjørdar á skilabesta hátt.

Sama boðskap hevði ein meiriluti í Løgtingsins vinnunevnd undir viðgerðini av omanfyrinevnda uppskoti um at loyva sølu av øli og víni í matvøruhandlum. Málið var felt, men í álitinum varð víst á, at stórur tørvur er á at nútímansgera tænastuna hjá Rúsdrekkasølu Landsins, soleiðis at borgarar og vinna fáa eina betri tænastu enn í dag.[77] Í næsta brotinum verður spurningurin um, hvussu søluskipanin skal skipast í framtíðini viðgjørdur.

#### 5.2.1.6 Uppskot til broytingar í søluskipan

Tá ið tosað verður um at broyta verandi søluskipan, eru tað serliga hesi trý uppskotini, sum verða umrødd:

a) At varðveita Rúsdrekkasøluna sum landsstovn
b) At skipa Rúsdrekkasøluna sum partafelag
c) At loyva sølu av rúsdrekka í handlum

*Til a) Landsstovnur*

Ein háttur er at varðveita Rúsdrekkasøla Landsins sum verandi landsstovn. Sum greitt frá omanfyri, verða núverandi karmar mettir at vera eitt haft um beinið fyri møguleikanum hjá Rúsdrekkasøluni at virka sum handilsfyritøka. Í hesum broti verður greitt frá, hvussu Rúsdrekkasølan framhaldandi kann rekast sum landsstovnur, men við fríari kørmum.

Fyri at menna virkismøguleikarnar hjá Rúsdrekkkasølu Landsins er neyðugt at geva stovninum fríari karmar og størri virkisfrælsi, soleiðis at møguligt verður at nútímansgera stovnin samsvarandi teimum krøvum, sum samfelagið, politiska skipanin og viðskiftafólkini seta.

Hevði landsstovnurin verið rikin við partafelagslíknandi rættindum, uttan tó at vera eitt (alment-) partafelag, við rættinum til millum annað at gera íløgur og keypa og selja ognir, hevði Rúsdrekkasølan betur kunnað lagt langtíðarætlanir og effektiviserað sítt virksemi.

[77] http://www.logting.fo/files/casestate/15179/123.14%20Alit%20um%20rusdrekkalog.pdf

Í løtuni er støðan, at stovnurin í longdini ongan fyrimun fær av at hava góð fíggjarár – ár við yvirskoti í rakstrinum. Hevði møguleiki verið fyri at flutt úrslit yvir fíggjarár, hevði tað havt við sær, at stovnurin støðugt kundi styrkja sítt fíggjarliga grundstøði.

Økt vinnuligt virkisfrælsi tykist vera ein fortreyt fyri, at Rúsdrekkasølan fær fylgt við tíðini og kann ganga nútíðarkrøvum á møti. Eitt dømi, sum Rúsdrekkasølan vísir á, er, at í Tórshavn hevur stovnurin fýra leigumál. Um stovnurin virkaði í færri bygningum, vóru pengar at spara á rakstrinum, og hugsast kann, at stovnurin fyri sparda peningin kundi latið upp fleiri sølubúðir aðrastaðni og sett nýggjar fløskumóttøkur upp.

Ein annar háttur at eftirlíka nútíðarkrøvum er, at Rúsdrekkasølan í summum førum sleppur at lækka prísir. Príslegan á rúsdrekka í Føroyum er sera høg samanborið við onnur lond, og hóast prísirnir verða brúktir at stýra nýtsluni við, kann ov høg príslega skunda undir kravið um heilt fría sølu, og tá skundar hon eisini undir, at verandi skipan við einkarsølu kann verða avtikin.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur víst á, at tey samstarva áhaldandi við hinar einkarsølurnar í Norðurlondum, sum støðugt hava flutt og tillagað seg við samtíðini. Góður íblástur kann fáast frá hesum einkarsølum.

Rúsdrekkasøluni er, sum nevnt, álagt at veita landinum 16,8 mió. kr. í avlopi, sama um nýtslan økist ella minkar. Ført hevur verið fram, at málið við kravinum um avlop upprunaliga var, at tað lutvíst skuldi nýtast at fíggja upplýsandi virksemi um skaðarnar av rúsdrekka og til at viðgera rúsdrekkamisnýtarar. Ivasamt er, um so er, tí hvørki tað upplýsandi virksemið ella viðgerðarstovnar hava fingið hægri játtan tey ár, tá avlopskravið er økt. Hvussu er og ikki, er ilt er at síggja, at avlopið verður brúkt til hesi endamál í dag – í øllum førum ikki beinleiðis.

Rúsdrekkasølan hevur mælt politisku skipanini til at avtaka fasta avlopskravið og heldur leggja avgjøld á vørurnar, so avlopið fylgir nýtsluni. Er sølan lægri, minkar avlopið og øvugt. Gongdin seinnu árini hevur verið, at færri litrar av reinum alkoholi verða seldir, og tí er vorðið alsamt truplari hjá Rúsdrekkasøluni at halda kravið um avlop. Tað er ein greið andsøgn í, at stovnurin skal virka fyri at tálma nýtsluni, men noyðist at selja meira fyri at halda kravið. Eisini kann tann margháttliga støða íkoma, at neyðugt er at biðja um eykajáttan frá sama myndugleika, sum skal hava avlopið, fyri at halda kravið á 16,8 mió. kr., sum støðan var í 2014.

Tað skal viðmerkjast, at verður avlopskravið lagt um til avgjøld á rúsdrekka, merkir tað eisini, at rúsdrekka, sum verður selt uttanfyri søludeildirnar hjá Rúsdrekkasøluni, til dømis á bryggjaríum, verður dýrari at keypa. Í dag sleppa hesi sølustøð undan einum avlopskravið á fíggjarlógini.

### *Til b) Partafelag*

Grundgevingin fyri at skipa Rúsdrekkasølu Landsins sum eitt (alment-) partafelag er eins og nevnt, at galdandi leistur, t.e. játtanar- og fíggjarlógarskipan landsins og bindingar við atliti til árligt avlopskrav, ikki hóskar til eina landsfyritøku, sum rekur handilsligt virksemi. Við at skipa Rúsdrekkasølu Landsins sum eitt (alment-) partafelag fæst eitt fíggjarligt frælsi, sum ein landsstovnur á fíggjarlógini ikki hevur, og harvið kann stovnurin verða rikin á ein meira skynsaman hátt enn til ber undir galdandi skipan.

Partafelagsformurin gevur fíggjarligt frælsi í mun til tað frælsi, sum ein stovnur, sum er á fíggjarlógini, hevur. Endaliga fíggjarliga heimildin liggur hjá leiðslu og nevnd. Felagið hevur eina sjálvstøðuga ogn, sum er atskild frá landskassanum, og lántøka er grundað á kredittvirðið hjá felagnum.

Partafelagsformurin gevur Rúsdrekkasølu Landsins størri frælsi at virka, eitt nú tá ið íløgur skulu gerast. Løgtingið skal ikki játtað peningin til íløguna, og harafturat kann avlop flytast til seinni ár. Løgting og landsstýri

hava – umframt við serlóggávu fyri virksemi v.m. – onga ávirkan á felagið, uttan ta ávirkan, partafelagslógin gevur partaeigarum. Landskassin ábyrgdast tí bert við eginognini í felagnum, uttan so, at landskassin t.d. hevur borgað fyri lántøku.

Tá landið velur at leggja eitthvørt virksemi í eitt partafelag, er hetta á mangan hátt eitt frávik frá teimum stýringsamboðum, sum sermerkja landsfyrisitingina. Eitt partafelag er ein sjálvstøðugt løgfrøðilig eind. Hetta merkir, at tað eru nevnd og stjóri, sum taka avgerðir um virksemið. Tað almenna hevur – sum eigari – tær heimildir, sum partaeigarar annars hava í einum partafelagi. Partaeigararnir kunnu gera sína ávirkan á felagið galdandi á aðalfundinum. Partaeigari hevur rætt til at taka orðið á aðalfundinum, og hevur atkvøðurætt um tey viðurskifti, sum aðalfundurin tekur avgerð um.

Lógargrundarlagið, sum eitt partafelag skal virka undir, er partafelagslógin,[78] og møgulig serlóg, sum hevur ásetingar um tað virksemi, sum felagið rekur. Eitt partafelag, har landið eigur allan partapeningin, er sostatt ikki ein partur av tí almennu fyrisitingini, og er vanliga ikki bundið av fyrisitingarlógini, lóg um alment innlit og landsins fíggjarskipan. Tá Ferðaráðið varð umskipað til Partafelagið Vist Faroe Islands[79], samtykti Løgtingið, at lóg um alment innlit eisini var galdandi fyri partafelagið, hóast hetta ikki hevur verið vanlig siðvenja. Somuleiðis hevur lógin ta áseting, at landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til nevnd og stjórn.

*Til c) Søla í matvøruhandlum og kioskum*

Tann mest liberala skipanin er, at matvøruhandlar og kioskir kunnu selja rúsdrekka. Sølustøðini kunnu síðani sjálvi gera av, um tey ynskja at selja rúsdrekka ella ikki. Við eini slíkari skipan ber til at skipa rúsdrekkasølu kring alt landið, og sannlíkt er, at hetta hevði havt við sær, at atkomumøguleikarnir hjá viðskiftafólki høvdu batnað munandi samanborið við galdandi skipan. Eisini ber til at avmarkað søluna av rúsdrekka til bert at fevna um øl og vín.

Henda søluskipan vil lætta um hjá viðskiftafólki, sum fáa møguleikan at keypa rúsdrekka, samstundis sum tey keypa aðrar vørur í handlinum. Tey privatu vinnurekandi fáa víðkað sítt handilsliga grundarlag og harvið økt vinningin. Um rúsdrekkasølan verður flutt til matvøruhandlarnar og kioskirnar, er ikki neyðugt við einum stovni at taka sær av slíkari sølu, og sostatt kunnu sparast rakstrarútreiðslur. Tó skuldu matvøruhandlar og kioskir havt í huga, at sambært lógini kunnu ung undir 18 ikki selja rúsdrekka og tískil ikki arbeiða í matvøruhandlum ella kioskum, sum seldu rúsdrekka.

### 5.2.1.7 Samanumtøka søluskipan – heilsulig ella vinnulig atlit?

Spurningurin um, hvør søluskipanin skal vera, snýr seg í høvuðsheitum um, hvørji atlit myndugleikarnir velja at taka viðvíkjandi rúsdrekkapolitikkinum. Flestu hoyringspartarnir halda, at føroyski rúsdrekkapolitikkurin framhaldandi eigur at taka støði í heilsuligum atlitum heldur enn vinnuligum atlitum. Rúsdrekkapolitikkurin skal hava til endamáls at tálma rúsdrekkanýtsluna og minka um skaðiligu avleiðingarnar av henni – heldur enn at taka atlit til handilsligu áhugamálini hjá privatum vinnurekandi.

Um rúsdrekkasølan verður flutt frá einkarsøluni til privatar handlar, er tað sera sannlíkt, at nýtslan fer at økjast og harvið eisini skaðiligu avleiðingarnar av rúsdrekkanýtsluni. Stórt sæð allir hoyringspartarnir mæla frá at loyva sølu í handlum. Í Svøríki hava granskarar gjørt greiningar av, hvør avleiðingin vildi verið av at tikið av einkarsøluna. Tvey scenario eru sett upp: 1) at skifta út einkarsøluna við serligar útsølur, sum skulu hava

[78] Løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg.
[79] Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands.

loyvi at selja og 2) ein fullkomin liberalisering av allari rúsdrekkasølu. Í fyrra døminum vil nýtslan økjast 17 prosent og í seinna 38 prosent.[80]

Havast skal í huga, at handlarnir taka handilslig atlit. Av somu orsøk kann væntast, at vøruúrvalið í ymsu handlunum verður minni enn í Rúsdrekkasølu Landsins, tí teir fara at leggja seg eftir at selja tey vørusløg, ið mestur vinningur fæst fyri. Hetta er ein gongd, sum hevur verið at sæð í pørtum av Kanada, sum hevur liberaliserað rúsdrekkasøluna.[81] Handlarnir hava minni áhugað í at taka atlit til fyribyrging ella at tálma rúsdrekkamisnýtsluni av tí einføldu orsøk, at tað hevur við sær eina minni inntøku til teirra.

Vandi er eisini fyri, at tað fer at verða truplari at halda kravið um aldursmark. Roknast kann heldur ikki við, at serliga smærru handlarnir fara at hava starvsfólk, sum eru før fyri at veita viðskiftafólkunum dygdargóða ráðgeving. Við at skipa rúsdrekkasøluna í handlum, viknar grundarlagið undir Rúsdrekkasølu Landsins.

Verður Rúsdrekkasølan skipað sum partafelag, merkir tað, at endamálið hjá einkarsøluni broytist. Eitt partafelag hevur til endamáls at reka sítt virki við yvirskoti til partaeigararnar – at tjena pengar. Tað kann sigast at vera ein andsøgn í at skipa rúsdrekkasøluna í einum almennum partafelagi, samstundis sum ætlanin er at reka ein tálmandi rúsdrekkapolitikk.

Hinvegin vildi ein partafelagslíknandi formur givið Rúsdrekkasøluni heilt aðrar og betri fyritreytir fyri at virka á einum handilsligum grundarlagi. Besta loysnin hevði helst verið at fingið varðveitt Rúsdrekkasølu Landsins sum landsstovn uttanfyri fíggjar- og játtanarskipan landsins, sum hevði givið stovninum munandi fríari karmar. Í álitinum um "Apoteksverkið í framtíðini"[82] frá 2006 verður skift orð um hesa loysn við tilsipan til royndir úr Danmark at skipa stovnar uttanfyri fíggjarlógina. Slíkir stovnurin og endamál teirra hava heimild í serlóg, men hava annars størri frælsi at virka, enn landsstovnar vanliga hava. Nærri verður ikki greitt frá hesi møguligu skipan á hesum stað.

Tá ið vit hyggja eftir gongdini í okkara grannalondum, hava einkasølurnar verið ígjøgnum eina stóra broyting seinnu árini.[83] Vinmonopolet í Noregi er til dømis farið frá at hava ein umfatandi einkarrætt til at vera ein detailsøla við einkarrætti. Felagið er farið frá at veita tænastu við søluskivu til sjálvtøku, og hevur seinnu árini ment nethandil, samstundis sum alt fleiri sølubúðir verða latnar upp kring Noreg.

Á hendan hátt hevur Vinmonopolet í Noregi økt um atkomuna til rúsdrekka, men eisini – og tað hevur verið endamálið – at tryggja eina eins atkomu í øllum pørtum av Noregi. Henda broyting skal síggjast í einum størri samanhangi.[84] Í Noregi er metingin, at fortreytin fyri skipanini við Vinmonopolet er, at skipanin hevur legitimitet millum fólk og politiskt. Grundgevingin er hin sama, sum ført hevur verið fram í hesum politikki: Er undirtøkan millum fólk burtur, kann einkarsølan ikki halda fram, og øll søla av rúsdrekka fer í matvøruhandlarnar, og tað fer at hava við sær eina størri nýtslu og eina størri skaðiliga nýtslu.

Avbjóðingin verður mett at vera tann sama í Føroyum, og tí eigur Rúsdrekkasølan at fáa møguleikan at fremja neyðug átøk til tess at tillaga virksemið í samsvari við tørv og væntanir hjá fólki og vinnu.

---

[80] Helse- og omsorgsdepartementet (2012).
[81] Nordisk Råd (2012).
[82] Almanna- og heilsumálaráðið (2006).
[83] Helse- og omsorgsdepartementet (2012).
[84] Ibid.

**Einkarsøluskipanin varðveitast og mennast.** Rúsdrekkasøla Landsins er krummtappurin í einum tálmandi rúsdrekkapolitikki, sum hevur til endamáls at minka um skaðiligu avleiðingarnar av rúsdrekkanýtslu, og eigur søluskipanin at verða varðveitt. Neyðugt er, at Rúsdrekkasølan áhaldandi tillagar seg í mun til dagsins krøv og tørv, og tí eigur hon at fáa fríari karmar at virka undir.

**Rúsdrekkasølan framhaldandi landsstovnur.** Játtanar- og fíggjarlógarskipan landsins verður mett at hóska illa til ein landsstovn, sum rekur handilsligt virksemi, tí skipanin tekur ikki í nóg stóran mun atlit til tær avbjóðingar, sum handilsfyritøkur hava fíggjarliga og rakstrarliga. Tí eigur at verða arbeitt fyri at skipa Rúsdrekkasøluna sum landsstovn leysur av hesum skipanum.

**Avlopskravið strikast.** Mælt verður til at avtaka avlopskravið, tí tað stríðir móti endamálinum at tálma nýtsluni av rúsdrekka.

### 5.2.2 Loyvisnevnd og skeinkiloyvi

Tá ið rúsdrekkalógin kom í gildi í 1992, fingu vinnurekandi loyvi til at skeinkja rúsdrekka fyri gestum.[85] Til at umsita hetta varð sett ein loyvisnevnd, hvørs høvuðsuppgáva er at veita og endurnýggja skeinkiloyvi til rúsdrekka og at taka aftur slík loyvi. Loyvisnevndin hevur fimm limir, sum landsstýrismaðurin tilnevnir.[86]

Í rúsdrekkalógini er ásett, at tað er bert loyvt at skeinkja rúsdrekka á støðum, sum hava fingið skeinkiloyvi frá loyvisnevndini. Bæði í rúsdrekkalógini og í kunngerðini um skeinkingarloyvi eru ásettar treytir í hesum sambandi. Loyvisnevndin kann eftir umsókn veita skeinkiloyvi til persónar, partafeløg, lutafeløg ella tílík feløg, ið reka hotel- og restauratiónsvirksemi, og skip í sigling. Loyvisnevndin kann taka loyvi aftur eftir ávísum treytum. Treytin fyri at fáa skeinkiloyvi er, at persónurin hevur fylt 25 ár og er myndugur, ikki er undir fíggjartroti, hevur bústað í Føroyum og ikki hevur víst tílíka atferð, at orsøk er til at halda, at hann ikki fer at reka virksemið forsvarliga.[87]

Áðrenn skeinkiloyvi verður givið, skal ummæli verða fingið til vega frá kommunalu myndugleikunum á staðnum. Harumframt skulu hølisviðurskiftini og aðrar umstøður lúka tær treytir, sum m.a. eru ásettar í byggilóggávuni, brunalóggávuni, heilsulóggávuni, matvørulóggávuni og politiviðtøkunum.

Fleiri av hoyringspørtunum hava gjørt vart við, at tað er óheppið, at bert eitt slag av skeinkiloyvi er, og at øll støð, sum ynskja at fáa skeinkiloyvi, skulu lúka treytirnar viðvíkjandi borðreiðing. Hetta er eisini galdandi fyri tey støð, sum annars ikki selja mat, eitt nú dansistøð. Ein meira hóskandi skipan hevði verið, at skeinkiloyvi vóru tengd at virkseminum á staðnum, soleiðis at tað vóru fleiri ymisk sløg av skeinkiloyvum. Eitt slag av skeinkiloyvum til tey støð, sum fáast við hotel- og restauratiónsvirksemi og eitt annað slag av skeinkiloyvum til dansistøð, skeinkistøð og líknandi.

Skeinkiloyvi fevnir um sølu av rúsdrekka inni á skeinkingarloyvisstaðnum ella uttandura á avmarkaðum øki uppat skeinkingarloyvisstaðnum. Umboð fyri hotel og matstovur hava tíðum gjørt vart við, at tey halda, at

[85] Løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 17. mai 2011.
[86] Kunngerð nr. 61 frá 7. mai 1992 um reglur fyri skeinkingarloyvisnevndina, sum seinast broytt við kunngerð nr. 76 frá 17. juni 2010.
[87] Kunngerð nr. 60 frá 7. mai 1992 um skeinkingarloyvi, sum seinast broytt við kunngerð nr. 5 frá 13. januar 2011.

hetta er ein ov avmarkandi skipan. Tey ynskja, at tað verður møguligt hjá teimum at selja mat út av húsinum, t.d. matpakkar til ferðafólk, sum eisini innihalda m.a. øl.

*Hissini tiltøk*

Loyvisnevndin kann eisini lata skeinkiloyvi til støk tiltøk, sonevnd "hissiniloyvi". Í slíkum førum er talan um t.d. størri samkomur, ráðstevnur, konsertir og stevnur. Í slíkum førum skal ein loyvishavari sum meginregla standa fyri skeinkingini. Loyvisnevndin kann tó í serligum førum gera frávik frá hesum, um ongin loyvishavari kann átaka sær at standa fyri skeinkingini. Ein vansi við hesi skipan at ein loyvishavari stendur fyri skeinkiloyvinum kann verða, at viðkomandi tekur eitt ómaksgjald frá tiltakshavaranum fyri at "lána" loyvi. Ongin áseting er í galdandi reglum um slík ómaksgjøld.[88] [89]

*Gjald fyri skeinkiloyvi*

Skeinkiloyvi eru galdandi í fýra ár. Eftir hetta skal søkjast um skeinkiloyvi av nýggjum. Loyvishavarar skulu rinda eitt gjald fyri skeinkiloyvi. Gjaldið fer í landskassan. Sama gjald verður goldið, tá loyvið verður longt.[90] Skipanin tykist virka væl og taka hoyringspartarnir sum heild undir við, at loyvishavari skal rinda eitt ávíst gjald fyri at fáa skeinkiloyvi. Men samstundis verður fýlst á, at sama gjald skal rindast fyri at fáa loyvi og fyri at endurnýggja loyvi, og ynskja hoyringspartarnir, at gjaldið fyri at endurnýggja skeinkiloyvi verður lægri enn fyri at fáa skeinkiloyvi. Loyvisnevndin brúkar eins stóra umsitingarligu orku í sambandi við endurnýggjan av skeinkiloyvi, sum tá nýggj loyvi verða latin, og er gjaldið tí tað sama.

#### 5.2.2.1 Útflýggingarstøð hjá bryggjaríum

Rúsdrekkasøla Landsins hevur einkarrætt at selja rúsdrekka. Tó kann Loyvisnevndin geva føroysku bryggjaríunum loyvi til at selja egna framleiðslu, sum hevur í sær í mesta lagi 5,8 rúmprosent av alkoholi. Nærri treytir eru ásettar í kunngerð viðvíkjandi slíkari sølu.[91]

Sølan frá útflýggingarstøðum hjá bryggjaríum svarar í dag til umleið 27 prosent av øllum alkohol litrum, ið seldir verða í Føroyum.[92] Fólkaheilsuráðið hevur fleiri ferðir mælt til, at øll rúsdrekkasøla skal fara fram umvegis Rúsdrekkasølu Landsins. Av somu orsøk hevur Fólkaheilsuráðið fleiri ferðir mælt til, at bryggjaríini ikki longur skulu hava loyvi at selja øl til fólk frá útflýggingarstøðunum. Afturímóti hava bryggjaríini borið fram, at útflýggingarstøðini í royndi og veru hava ein tálmandi virkna á nýtsluna, tí tey hava bert loyvi til at selja øl, sum er minni skaðiligt enn til dømis spiritus. Bryggjaríini eru av tí fatan, at tey eisini áttu at havt loyvi at selt sterkari øl enn 5,8 prosent.

Í Føroyum eru tvey bryggjarí, og hava hesi fleiri útflýggingarstøð kring landið. Seinnu árini hevur Loyvisnevndin loyvt fleiri nýggjum útflýggingarstøðum, og metir Rúsdrekkasølan, at fleiri av hesum eru í beinleiðis kapping við sølubúðirnar hjá Rúsdrekkasøluni. Rúsdrekkasølan heldur, at talan er um ójavna kapping, tí bryggjaríini hava einki krav um avlop at lata í landskassan.

[88] Løgtingslóg nr. 57 frá 16. mai 2006 um broyting í rúsdrekkalógini.
[89] Løgtingsmál nr. 86/2005: Uppskot til løgtingslóg um broyting í rúsdrekkalógini.
[90] Í § 5, stk. 2 í kunngerð nr. 60 frá 7. mai 1992 um skeinkingarloyvi, sum seinast broytt við kunngerð nr. 5 frá 13. januar 2011 er ásett, at fyri øll sløg av rúsdrekka er gjaldið kr. 10.000,-. Fyri skeinkingarloyvi einans til øl og borðvín er gjaldið 5.000,-.
[91] Kunngerð nr. 153 frá 28. oktober 1992 um framleiðslu og útflutning av rúsdrekka, sum seinast broytt við kunngerð nr. 122 frá 14. september 2011.
[92] Sambært Rúsdrekkasølu Landsins.

Bryggjaríini vísa á, at sølan frá útflýggingarstøðunum er av stórum týdningi fyri raksturin hjá feløgunum. Spurningurin um útsølurnar hjá bryggjaríunum hevur verið reistur í Løgtinginum áður, og hevur undirtøka ikki verið fyri at broyta hesa skipan, vísandi til at útflýggingarstøðini eru við at halda lív í ølbrygging í Føroyum.

**Fleiri sløg av skeinkiloyvum.** Heimild skal fáast til vega at lata ymisk skeinkiloyvi, alt eftir hvat virksemi er á staðnum. Til dømis eitt slag av skeinkiloyvum til tey støð, sum fáast við hotel- og restauratiónsvirksemi, og eitt annað slag av skeinkiloyvum til dansistøð, skeinkistøð og líknandi.

### 5.2.3 Aldursmark

Í Føroyum er 18 ára aldursmark fyri at kunna keypa rúsdrekka. Í rúsdrekkalógini er ásett, at tað er forboðið at selja ella flýggja út rúsdrekka til persónar, sum ikki hava fylt 18 ár, ella at flýggja út rúsdrekka, um tað er sannlíkt, at rúsdrekka er tilætlað øðrum, sum ikki lúka treytirnar fyri at fáa rúsdrekka. Um ivamál er um aldurin á móttakaranum, skal viðkomandi vísa samleikaprógv, áðrenn viðkomandi kann fáa rúsdrekka.[93]

Aldursmark er eitt týðandi amboð í rúsdrekkapolitikkinum, tí hetta verður roknað sum eitt virkið fyribyrgjandi tiltak. Aldursmarkið er ásett fyri at fyribyrgja, at børn og ung fáa fatur á rúsdrekka. At aldursmarkið er sett til 18 ár, kemst av, at hetta er myndugleikaaldur.

Sera nógv lond hava ásetingar um aldursmørk og um at skeinkja rúsdrekka til ung. Hetta kemst av, at ung eru meira viðkvom yvirfyri rúsdrekka enn vaksin. Fleiri kanningar vísa, at byrja persónar at drekka á ungum árum, er større vandi fyri at fáa eina stóra nýtslu av rúsdrekka sum vaksin.

Týðandi er, at tey, ið selja rúsdrekka, handhevja lógina um aldursmark. Rúsdrekkasøla Landsins hevur seinasta árið havt eina herferð í hesum sambandi. Í svensku kanningini um avleiðingarnar av at liberalisera søluna av rúsdrekka, sum sipað var til omanfyri, verður víst á, at stórur vandi er fyri, at strongu krøvini um aldursmark ikki verða hildin eins væl, tá sølan fer úr einkarsølunum í matvøruhandlar. Tað er ein orsøk til, at skaðiliga nýtslan sambært kanningini veksur, um sølan verður liberaliserað.

**Varðveita aldursmarkið.** Mælt verður til, at aldurmarkið at keypa rúsdrekka framhaldandi verður 18 ár, sum er myndugleikaaldur.

### 5.2.4 Tollfrí søla

Persónar, ið hava fylt 18 ár og sum koma til Føroyar við skipi ella flogfari, kunnu taka við sær rúsdrekka til egna nýtslu uttan at rinda toll ella avgjald. Hetta verður vanliga nevnt tollfrí søla. Nøgdirnar, sum ferðandi kunnu hava við sær, eru ásettar í kunngerð:[94]

1) Rúsdrekka yvir 22 rúmprosent alkohol: í mesta lagi 1 litur hægst 60 rúmprosent alkohol.
2) Heitt vín o.a. ikki yvir 22 rúmprosent alkohol: í mesta lagi 1 litur, ella borðvín í mesta lagi 2 litrar.
3) Øl: í mesta lagi 2 litrar (6 fl.).

[93] Løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 17. mai 2011.
[94] Kunngerð nr. 95 frá 2. juli 2015 um hvat ferðandi kunnu flyta inn tollfrítt og avgjaldsfrítt til Føroya.

4) Í staðin fyri nøgdirnar, sum eru nevndar í nr. 1-3 kunnu ferðandi flyta inn 10 litrar av øli, ella 4 litrar av borðvíni og 2 litrar av øli.

Umrøðan um tollfríu søluna í hesum parti fevnir um ta sølu, sum er ætlað ferðandi við flogfari ella skipi. Í Føroyum eru tvær fyritøkur, sum hava tollfría sølu, og tær eru Smyril Line, sum hevur tollfría sølu umborð á Norrønu, og samstarvið Vága Floghavn/Atlantic Airways, sum í felag reka tollfríu søluna á flogvøllinum í Vágum. Ein týðandi partur av søluni til føroyingar fer fram í Kastrup og øðrum flogvøllum, sum føroysk ferðandi eru á.

Sum longu greitt frá í Støðulýsingini ber ikki til at fáa eina neyva mynd av, hvussu stór tollfría sølan av rúsdrekka er, men ábendingar eru um, at henda sølan í dag er størri partur av samlaðu nýtsluni í Føroyum enn áður. Ferðamynstrið til Føroya seinnu árini er broytt, og av tí sama er talið av ferðandi til Føroyar nærum tvífaldað eftir fáum árum. Fleiri føroyingar enn áður búgva í Føroyum og arbeiða uttanlands, meðan onnur eru uttanlands í antin arbeiðsørindum ella sjúkraørindum.

Spurningurin viðvíkjandi tollfríu søluni verður javnan umrøddur, og eru aktørarnir á økinum sum vera man ymiskir á máli um henda spurning. Summir partar ynskja at varðveita hesa skipan, meðan aðrir ynskja at taka hana av. Neyvt sama orðaskifti er í Noregi, sum á nógvar mátar líkist Føroyum í hesum høpi. Víst verður á, at tollfría sølan gevur atgongd til bíligari rúsdrekka uttanfyri skipaðu einkarsøluna í landinum. Einkarsølan missir tí inntøkur, og tað er ein vaksandi avbjóðing fyri norska Vinmonopolet. Ein avbjóðing, sum Rúsdrekkasøla landsins eisini hevur víst á.

Norsk kanning vísir, at tollfría sølan á norskum flogvøllum stóð fyri ávikavist 32, 27 og 7 prosentum av søluni hjá Vinmonopolet av heitvíni, spiritus og víni. Sama kanning sigur, at skipanin við tollfríari sølu hevur við sær eina meirnýtslu av rúsdrekka í Noregi. Hetta merkir, at møguleikin at keypa tollfrítt rúsdrekka hevur við sær, at nýtslan økist.[95]

Meirilutin í serligari avgjaldsnevnd, sum norska stjórnin setti at kanna m.a. tollfríu sølurnar, hevði ta prinsipiellu áskoðan, at tað ikki átti at verið loyvt at tikið tollfrítt rúsdrekka við inn í Noreg.

Kortini ynskir norska stjórnin ikki at taka av skipanina. Fatanin er yvirskipað tann, at tollfría sølan er við at tryggja undirtøkuna fyri tálmandi rúsdrekkapolitikkinum í Noregi, tí henda søla virkar sum ein ventilur, ið ger, at almenningurin hevur lættari við at góðtaka høgu avgjøldini annars. Samstundis eru tollfríu sølurnar ein týðandi inntøkukelda hjá flogvøllunum.[96]

Tollfríu sølurnar hava eisini stóran fíggjarligan týdning fyri ávikavist Smyril Line og Vága Floghavn/Atlantic Airways. Viðmerkjast skal, at munur er á treytunum til hesar sølur, tí tollfría sølan í Vágum skal keypa inn rúsdrekka umvegis Rúsdrekkasølu Landsins, meðan Smyril Line ikki hevur hesi krøv.

Mett verður, at árligi umsetningurin frá sølubúðini á Vága Floghavn er 45 mió. kr. Ein partur av hesum yvirskoti kemst av sølu av rúsdrekka. Fleiri arbeiðspláss eru tengd at hesum virkseminum. Hugsandi er, at um hesar fyritøkur missa ein part av hesum inntøkum, mugu inntøkur fáast til vega á annan hátt, sum helst ber eykað kostnað við sær fyri kundan. Sannlíkt vildu ferðaseðlar og ferðaavgjøld hækkað eitt vet, vóru tollfríu sølurnar tiknar av.

---

[95] SIRUS (2012).
[96] Helse – og omsorgsdepartementet (2012).

Her heima er spurningurin reistur, hvørt tað er rímiligt, at tey, sum ferðast, kunnu keypa bíligari rúsdrekka enn tey, sum ikki hava møguleika fyri at ferðast. Tey, sum hava hesi sjónarmið, mæla til, at tey, sum ynskja at keypa rúsdrekka, verða javnsett, og tað merkir, at skipanin við tollfríu søluni verður tikin av. Gallupkanning, sum Rúsdrekkasølan hevur latið gjørt í november 2013, vísir, at tað í størri mun eru fólk við hægri inntøkum, sum keypa rúsdrekka uttanlands ella í tollfríum sølum.

Spurningurin um tollfríu sølurnar er langt frá einfaldur, og sjónarmiðini eru ymisk. Sæð útfrá einum heilsupolitiskum sjónarhorni stríðir tollfría sølan ímóti tí tálmandi rúsdrekkapolitikkinum um avmarkaða atkomu, tí prísurin á rúsdrekka er lutfalsliga lágur í hesum sølum. Við tað, at alt fleiri ferðast – og ferðast oftari – er atkoman til bíligt rúsdrekka vaksin munandi. Hvussu nógv vita vit ikki, og tað er ein avbjóðing. Í Noregi vera krøv sett teimum, ið reka tollfría sølu, um at veita upplýsingar til hagtalsendamál. Slík áseting finst ikki í Føroyum, og tí hava vit eitt ivasamt grundarlag at byggja eina politiska støðutakan á.

**Fáa til vega upplýsingar um sølu í tollfríum sølum.** Krøv eiga at verða sett teimum, ið hava tollfría sølu, um at lata upplýsingar til almennan myndugleika til hagtalslig endamál.

**Tollfrí søla í framtíðini.** Sjónarmiðini eru mong og atlitini fleiri, tá tað kemur til tollfría rúsdrekkasølu. Spurningur kann setast við, um tað er rætt at loyva fólki at flyta inn tollfrítt rúsdrekka, tí hetta bæði stríðir ímóti tálmandi rúsdrekkapolitikkinum annars, umframt at tað vendir sosialt skeivt. Onnur hava aðra fatan, og tí verður hesin spurningurin við hesum lagdur upp til kjak.

## 5.3 Átaksøki 3: Marknaðarføring og forboð móti lýsingum fyri rúsdrekka

Forboð móti lýsingum er eitt týdningarmikið amboð í strembanini eftir at tálma rúsdrekkanýtsluni. Hetta kemst av, at slík forboð eru við til at avmarka eftirspurningin og ávirka hugburðin til rúsdrekka.

Í Føroyum er ikki loyvt at lýsa við rúsdrekka. Hetta merkir, at øll sølufremjandi lýsing í føroyskum fjølmiðlum og tíðarritum, útbýting av lýsingarseðlum o.a. um sølu, skeinking og útflýggjan av rúsdrekka er forboðin.

Sjálvt um Føroyar – og fleiri onnur lond við – hava sett í gildi forboð móti lýsingum fyri rúsdrekka, fer slík lýsing fram í hesum londum hóast tað. Hetta kemst av, at slíkar lýsingar koma umvegis útlendskar sjónvarpsræsir, aðrar miðlar, internetið o.s.fr. Lýsingar fara eisini fram við at knýta rúsdrekkavørumerki til ítróttarhendingar og mentanarlig tiltøk. Harafturat spælir undirhaldsídnaðurin ein leiklut við at skapa hugmyndir millum ung gjøgnum tær ímyndir av rúsdrekka, sum filmar, undirhaldssendingar í sjónvarpinum, tónleikur og aðrar mentanarvørur vísa.

### 5.3.1 Ávaringartekstur

Í rúsdrekkalógini er ongin áseting um ávaringartekst. Í sambandi við arbeiðið at orða henda rúsdrekka- og rúsevnispolitikk hevur spurningurin verður umrøddur, um rætt er at seta ávaringartekstir á vørur við rúsdrekka, á sama hátt sum gjørt verður við tubbaksvørur.[97] Grundgevingin fyri at seta ávaringartekstir á

[97] Løgtingslóg nr. 61 frá 10. juni 2008 um tiltøk at minka um royking; Kunngerð nr. 105 frá 9. desember 2008 um krøv til innandura roykirúm og ávaringartekst um heilsuvandar v.m.

slíkar vørur er, at hetta kann virka fyribyrgjandi, tí brúkarin verður kunnaður um vandar, sum kunnu standast av ovurnýtslu av rúsdrekka.

Tað er avmarkaður kunnleiki um, hvørja ávirkan ávaringartekstir hava á nýtslu og skaðaárin. Ymiskt bendir á, at ávaringartekstir sum ávirkingarmegi fara at verða umrøddir í ES í komandi árum. Við støði í hesum valdi undanfarna norska stjórnin ikki at seta í verk egna skipan við ávaringartekstum, men heldur at fylgja gongdini í ES hesum viðvíkjandi.[98]

**Fylgja neyvt við gongdini í ES í mun til ávaringartekstir.** Í staðin fyri at seta eina serføroyska skipan í verk við ávarkingartekstum á vørum við rúsdrekka, sum verða seldar í Føroyum, verður mælt til at fylgja neyvt við gongdini á hesum økinum í ES og øðrum londum.

## 5.4 Átaksøki 4: Rúsdrekkakoyring

Átøk ímóti rúsdrekkakoyring eru effektiv amboð fyri at minka um skaðiligu nýtsluna av rúsdrekka og í mun til at forða rúsdrekkatengdum ferðsluóhappum. Vísindin vísir somuleiðis á, at hesi átøk ikki eru kostnaðarmikil og geva tí eina serliga góða kost-nyttu effekt.

### 5.4.1 Lágt promillumark gevur úrslit

At gera átøk móti rúsdrekkakoyring er eitt politiskt amboð, sum vísir seg at hava stóran stuðul millum fólk flest. Søguliga vísir tað seg, at tá strangari reglur um avmarkingar av rúsdrekkakoyring eru framdar, so fáa tær skjótt fólksliga undirtøku. Eisini í Føroyum eru ábendingar um hetta. Tá ásetingin í ferðslulógini[99] um promillukoyring í 2009 varð herd, vóru hissini mótmæli, men í dag hoyrist einki til hesa ónøgd. Orsøkin er helst, at slík átøk ikki bert avmarka vandan fyri tann, sum koyrir bil, men eisini fyri ferðafólk í bilinum, fótgangarar og onnur í ferðsluni.

Í Føroyum hava vit eina syrgiliga søgu, tá ið tað snýr seg um ferðusluóhapp, sum hava kraft mannalív, men støðan er batnað markant síðani 1990. Talvan niðanfyri vísir talið av deyðum í ferðsluni tilsamans í Norðurlondum fyri hvørjar 100.000 íbúgvar. Talvan er frá Ferðsluhagtalsbókini frá 2007.[100] Nýggjari tøl fyri árini 2008 til 2011 frá Landsverki styrkja henda trendin, og liggja Føroyar tey árini betri enn hini Norðurlondini.

---

[98] Helse- og omsorgsdepartementet (2012).
[99] Løgtingslóg nr. 49 frá 11 mai 2009 um broyting í løgtingslóg um ferðslu.
[100] Ráðið fyri Ferðslutrygd (2007).

Talva 8: Deyð í ferðsluni í Norðurlondum fyri hvørjar 100.000 íbúgvar 1976-2006




Sum talvan greitt vísir, so eru als ikki eins nógvar álvarsligar ferðsluvanlukkur í Føroyum í dag sum í áttatiárunum. Nógv átøk eru gjørd í tíðarskeiðinum fyri at bøta um støðuna, og ikki minst tykist hugburðurin millum fólk at vera broyttur. Trygdarbelti, betri vegir og sterkari eftirlit eru millum virknastu átøkini í hesum høpi.[101] Hinvegin var gongdin árini 2000-2006 ikki eins bjørt, tá ið talan var um vanlukkur orsakaðar av rúsdrekka, sí talvu. Gev gætur, at tølini eru ikki fyri andlát, men vanlukkur við persónsskaða í ferðsluni orsakað av rúsdrekka.

[101] Vinnumálaráðið (2007).

Talva 9: Tal av vanlukkum orsakaðar av rúsdrekka pr. 100.000 – 1997-2005




Sambært altjóða kanningum er hitt mest virkna átakið rætt og slætt at seta promillumarkið niður. Yvirskipað kann sigast, at í teimum londum, har promillumarkið er yvir 0,5 g/l, hevur tað gagnlig árin at seta markið á 0,5 g/l, og í teimum londum, har markið longu er á 0,5 g/l, ber til við fyrimuni at seta markið niður á 0,2 g/l. Eftir broytingina í 2009 í ferðslulógini er promillumarkið í Føroyum 0,2 g/l. [102] Á ársfundi sínum í 2012 samtykti Norðurlanda Ráðið eitt uppskot um "Nordisk alkohol og tobakspolitikk i et folkehelseperspektiv", har eitt av málunum var at seta markið niður á 0,2 g/l.[103]

Tøl frá løgregluni árini 2008 til 2014 vísa eisini greitt, at talið av ferðsluóhappum orsakað av rúsdrekka eru í minking. Í 2008 vóru 165 ákærur móti persónum fyri at bróta ferðslulógina vegna promillukoyring og í 2015 vóru 105. Talið hevur verið støðugt fallandi hesi árini, undantikið í 2010 – árið eftir, at ferðslulógin varð herd. Tá varð talið av ákærum 99.

Vert er tó at leggja aftrat, at jaligi virknaðurin av at seta promillumørkini niður síggjast bert aftur, um reglan verður handhevjað. Besti mátin at handhevja ásetingina er við at steðga tilvildarligum bilførarum og lata teir blása í alkoholmátarar. Handhevjanin eigur at verða stuðlað av upplýsingarherferðum, ið hava til endamáls at tryggja, at fólk vita, hvat hendir, um tey verða steðgað av løgregluni. Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur seinnu árini javnan skipað fyri herferðum fyri betri ferðslutrygd í Føroyum. Millum annað herferðin "Vinir loyva ikki vinum at koyra skít" sum var í fleiri miðlum í 2014. Annað dømi um upplýsingarherferð, ið skal tryggja betri ferðslutrygd, er danska kampanjan "Klar til et pust", sum minnir bilførarar á ikki at drekka meira enn promillumarkið loyvir.

[102] World Health Organization (2014).
[103] Nordisk Råd (2012).

**Tryggja at lága promillumarkið verður handhevjað.** Eisini verður mælt til framhaldandi at stuðla hesi handhevjan við upplýsingarherferðum.

## 5.5 Átaksøki 5: Minka um skaðiligu árinini, tá ið drukkið verður

Eitt av tilmælunum í "Global strategy to reduce harmful use of alcohol" frá 2010[104] er at tryggja eina ábyrgdarfulla útskeinking. Hetta snýr seg millum annað um at handhevja lógina, sum setur forboð fyri at selja og skeinkja rúsdrekka til ung undir 18 ár, og sum eisini setur forboð fyri at skeinkja persónum, sum eru sjónliga ávirkaðir. Eftirmetingar av miðvísum átøkum á hesum øki kring knøttin vísa eitt markant fall í harðskapsmálum í býarlívinum.

### 5.5.1 Minka um skaðiligu árinini, tá ið drukkið verður – Útskeinking við ábyrgd

Hetta tiltak er ein partur av einum átaksøki, sum snýr seg beinleiðis um at minkað um skaðiligu árinini, tá ið tú drekkur. Í føroysku rúsdrekkalógini er ásetingin um, at tað er ikki loyvt at skeinkja til persónar, "tá orsøk er at halda, at teir við at drekka meira kunnu verða sær sjálvum til vanda ella verða øðrum til vanda ella ónáðir", eitt dømi um eitt tiltak, sum hevur til endamáls at minka um skaðiligu árini, tá drukkið verður.[105]

Ásetingin byggir á ta fatan, at tess meira persónar drekka, tess størri eru sannlíkindini fyri, at teir gera skaða á seg sjálvan og onnur. Gransking vísir, at so er.[106] Svensk frágreiðing við heitinum "Ansvarsfull alkoholservering" frá 2012 sigur, at samband er ímillum rúsdrekkanýtslu og harðskap, og at sambandið millum rúsdrekka og harðskap verður alt greiðari, tess meira fólk hava drukkið.

Vit hava ikki líknandi kanningar í Føroyum, men hesin samanhangur er sambært løgregluni eisini týðuligur í Føroyum. Jens Jensen frá kriminaldeildini hjá løgregluni og limur í Fólkaheilsuráðnum sigur, at at kalla øll harðskapsmál, bæði tá tað kemur til bardaga og húsaófrið, hava samband við rúsaðar persónar. Hagtøl frá løgregluni siga somuleiðis, at greitt størsti parturin av málunum um harðskap eru náttina til sunnudag og náttina til leygardag, tá eisini nógv flest fólk eru í býnum. Seinastu 15 árini hevur talið av harðskapsmálum verið millum 70 og 100, um árið og fatanin hjá løgregluni er, at talið er rímiliga støðugt.

Í seinnu hálvu av 1990'unum menti svenski stovnurin STAD (Stockholm forebygger Alkohol- og Drogproblem) ein nýggjan hátt, sum verður róptur Ansvarsfull Alkoholservering ella á føroyskum Útskeinking við ábyrgd. Verkætlanin hevði sum endamál at minka um harðskapsmálini í býarlívinum í Stockholm og vóru úrslitini ógvuliga góð. Ein eftirmeting í 2001, vísti at harðskapsmálini vóru minkað við 29 prosentum í tíðarskeiðinum. Seinni hava eisini aðrar kommunur í Svøríki sett í verk líknandi átøk, og hevur verkætlanin givið kommunum í londum sum Avstralia og Danmark íblástur. Í danska Fyribyrgingarpakkanum um rúsdrekka frá 2012 verður mælt kommunum til at seta í verk átøk eftir svensku fyrimyndini.[107]

Upprunakonseptið Ansvarsfull Alkoholservering hvílir á tríggjar súlur:

- útbúgving av teimum, ið servera rúsdrekka til gestirnar,

---

[104] World Health Organization (2010)a.
[105] Løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 17. mai 2011.
[106] STAD-rapport 50 (2012).
[107] Sundhedsstyrelsen (2012).

- samstarv millum avvarðandi partar á økinum - kommunu, løgreglu og matstovuvinnu –
- og eitt effektivt eftirlit við um rúsdrekkalógin verður hildin.

Orsøkir eru at halda, at eitt líknandi átak eisini hevði gjørt mun í býarlívinum í Føroyum og serliga í miðbýnum í Tórshavn, hóast harðskapur sum so, ikki verður mettur at vera ein stórur trupulleiki.

---

**Útskeinking við ábyrgd.** Samband er ímillum rúsdrekkanýtslu og harðskap. Fyri at minka um harðskapsmálini í býarlívinum, verður tí mælt til at seta í verk átak um ábyrgdarfulla útskeinking við íblástri úr verkætlan í Stockholm.

---

## 5.6 Átaksøki 6: Rúsdrekkapolitikkir á arbeiðsplássum, ítróttarfeløgunum og kommunum

Í hesum stutta partinum verður nomið við átøk at minka um skaðiligu nýtsluna av rúsdrekka, sum vera mett at hava ein góðan virkna, hóast vísindaligu prógvini ikki eru eins haldgóð sum fyri øðrum átøkum. Talan er í hesum partinum um at gera politikk fyri rúsdrekkanýtslu á arbeiðsplássum, á stovnum og í ítróttarfeløgum fyri at avmarkað atgongdina til rúsdrekka. í hesum sambandi verður hetta til umrøðu:

- Arbeiðspláss og rúsdrekka
- Ítróttur og rúsdrekka
- Almennir og kommunalir fasilitetir og rúsdrekka

Ásett er í almenna starvsfólkapolitikkinum, at øll almenn arbeiðspláss eru rúsevnafrí. Orðið rúsevni fevnir í hesum høpi bæði um rúsdrekka og rúsevni (narkotika). Endamálið við almenna rúsevnapolitikkinum, sum Løgmansskrivstovan evnaði til um ártúsundaskiftið, er at skapa eitt trygt og gott arbeiðspláss, at fyribyrgja trupulleikum av rúsevnum og at geva starvsfólkum møguleika – so tíðliga sum gjørligt – at koma úr møguligari misnýtslu. Í hesum politikki eru greiðar ásetingar um, hvør hevur ábyrgdina fyri at politikkurin verður fylgdur, hvørjar møguleikar hin einstaki hevur til viðgerð, og eisini hvørjir sanktiónsmøguleikar eru. Til dømis stendur beinleiðis, at "um næsti fyrisetti varnast, at starvsfólk hevur rúsevnatrupulleikar, skal hon/hann skipa fyri eini samrøðu við viðkomandi. Endamálið við samrøðuni er at geva munnliga ávaring og tilboð um hjálp til viðgerð av trupulleikunum".[108]

Almenni rúsevnapolitikkurin ásetur harvið rættindi og treytir fyri starvsfólkini í hesum sambandi. Politikkurin er einans galdandi fyri alment sett starvsfólk í almenna geiranum, men formelt sæð ikki fyri til dømis starvsfólk í kommunala geiranum ella á privata arbeiðsmarknaðinum. Fleiri kommunur hava tó orðað greiðan rúsdrekkapolitikk fyri starvsfólkini, sum eru fult á hædd við tann almenna rúsevnapolitikkin.

Ítróttarsamband Føroya samtykti í 2012 stevnumið um rúsevni og ítrótt. Stevnumiðið byggir á ta súlu, at børn og ung, sum íðka ítrótt, trygt skulu kunna koma til venjingar og kappingar í einum rúsfríum umhvørvi. Tað verður tí álagt venjarum, leiðarum og ítróttafólki, at tey skulu vera ein góð fyrimynd fyri onnur børn og ung og eiga ikki at brúka rúsdrekka ella rúsevni í hesum samstarvi. Í hesum sambandi hevur ÍSF eisini ment tilfar

[108] www.tinganes.fo

til venjarar, leiðarar og onnur um góðan atburð. Hetta tilfar mælir til, at hesi fólk, sum í stóran mun eru fyrimyndir fyri onnur, skulu vísa í verki, at tey eru ímóti at nýta rúsdrekka og rúsevni í sambandi við ítrótt. Á hoyringsfundi við umboð fyri Ítróttarsambandið kom fram, at ymiskt er, hvussu virkin feløgini vóru at fylgja ráðunum hjá ÍSF. Átakið er ikki fylgt upp, og tí er ilt at meta um hvønn mun stevnumiðini hava ávirkað atferðina hjá ítróttarfólki, men metingin er, at minni bland er ímillum ítrótt og rúsdrekka í dag enn fyrr.[109]

Á hoyringsfundi við Kommunufelagið var umrøtt, um kommunur (og land) í størri mun enn í dag áttu at sett treytir við, tá fasilitetir hjá kommuni vóru leigað út til ymisk tiltøk. Í dag hava kommunalar hallir og onnur anlegg ymiskar reglugerðir. Sama er galdandi fyri hølir, sum landið eigur. Danska heilsustýrið skjýtur upp, at kommunur og land seta treytir til feløg og líknandi, sum leiga hallir, hølir o.a. hjá kommuni um, at tey hava ein rúsdrekkapolitikk.

---

**Treytir í sambandi við leigu.** Mælt verður til, at hesin politikkur eisini inniheldur ásetingar um treytir fyri leigu av fasilitetum hjá kommununi.

**Leikluturin hjá ítróttarfeløgum.** Mælt verður til, at ÍSF í størri mun enn í dag eggjar feløgunum til at taka til sín tilfarið og hugsjónina um góðan atburð.

---

## 5.7 Átaksøki 7: Kampanjur og undirvísing í skúlum

Nógvar landsfevnandi rúsdrekkaheildarætlanir og – tiltøk leggja áherðslu á tørvin á at skipa fyri undirvísing og upplýsing bæði fyri børnum og ungum – og fyri almenninginum sum heild.  Fleiri orsøkir eru til at leggja dent á undirvísing og upplýsing. Av og á er tað heilt einfalt eitt ynski um at gera moralsku sannføringina sjónliga um, at fólkið eigur at kenna til og skilja tann vanda, rúsdrekka kann hava fyri heilsuna.

Tá stórur dentur verður lagdur á júst henda partin, kann tað í summum førum siga nakað um eina ov avgjørda sannføring um, at upplýsing og undirvísing kunnu loysa rúsdrekka- og rúsevnistrupulleikar. Hetta er eitt sjónarmið, sum ikki rættiliga hevur botn í próvtilfari[110].

Tað er ikki ókent, at eitt einsíðugt fokus á upplýsing í veruleikanum kann vera tekin um at vilja sleppa undan at kjakast um og fremja onnur, meira munadygg fyribyrgingartiltøk. Eitt nú at skerja atkomuna til rúsdrekka ella at hækka avgjøld á rúsdrekka.

Ofta snýr upplýsing um rúsdrekkanýtslu seg um at kunna um tað hættisliga ella skaðiliga markið fyri tílíkari nýtslu. Hetta slagið av kunning kann virka gagnligt, men í roynd og veru eru sera fá prógv um, at slíkar lýsingarherferðir gera nakran mun til tess at broyta atferð hjá fólki[111].

Hetta skal tó ikki misskiljast. Vit eiga framvegis at hava upplýsingarherferðir, hóast próvførslan fyri, at hetta virkar, er lítil. Men hesar upplýsingarherferðirnar skulu gerast betri, í fyrsta lagi við at kanna, hvat almenningurin veit, ella heldur seg vita, soleiðis at herferðirnar kunnu gerast meira málrættaðar. Í øðrum lagi

[109] Ítróttarsamband Føroya: “Í okkara felag vita øll, hvørjar reglur eru galdandi”. Soleiðis tosa vit um rúsdrekka og tubbak í felagnum.
[110] Sundhedsstyrelsen (2012).
[111] Ibid

kunnu upplýsingarherferðir brúkast til at fáa stuðul frá almenninginum til at seta í verk ein virknari rúsdrekkapolitikk.

### 5.7.1 Upplýsing um vandar við rúsdrekka í undirvísingini

Sum nevnt eru skjalprógvini fyri, at undirvísing í skúlum og kampanjur í sjálvum sær virka, ivasom, men hesi átøk kunnu stuðla undir øðrum, sum kunnu hava eina beinleiðis ávirkan á at avmarka rúsdrekkanýtsluna. Hetta kann til dømis vera aldursmark fyri keyp av rúsdrekka. Sambært danska Heilsustýrinum eru undirvísing og kunning týðandi keldur til vitan um evnið, ið er avgerandi, tá ið vit tosa um møguligar broytingar í atferð, hóast hetta ikki kann standa einsamalt.

Øll skúlabørn eiga eisini fram yvir at fáa undirvísing um rúsdrekka, men her er neyðugt at viðurkenna, at slík undirvísing neyvan í sær sjálvum fremur jaligar broytingar í atferðini. Sum er, eru fleiri, sum veita skúlabørnum slíka undirvísing, t.d. lærarar, heilsufrøðingar og SSP.

Spurningurin er, um hetta er rætti hátturin at skipa økið uppá; ella um tað kundi verið skipað og samskipað á ein øðrvísi hátt, so bæði starvsfólka- og fíggjarliga orkan kundu verið gagnnýtt skilabetri – og harvið eisini munadyggari úrslit møguliga kundu verið rokkin. Fíggjarligi stuðulin til slíka undirvísing eigur altíð at standa mát við orkuna, sum verður løgd í tað. Málið eigur fyrst og fremst at vera at fremja eina betri fatan av endamálinum við einum virknum rúsdrekkapolitikki, og undirvísingin skal royna at eggja fólki í vandabólkinum til at leita sær hjálp.

At fáa til vega serkunnleika innan rúsdrekka og menna heilsufakliga støði eigur framhaldandi at vera ábyrgdin hjá tí almenna og ikki hjá rúsdrekkaídnaðinum. Próvtilfar – hóast avmarkað – hevur víst, at undirvísingartilfar, sum ídnaðurin hevur rindað fyri, hevur lyndi til at geva eina meira jaliga áskoðan á rúsdrekka, enn veruligt grundarlag er fyri.

---

**Undirvísing í Fólkaskúlanum.** Skúlabørn eiga eisini framyvir at fáa undirvísing um rúsdrekka.

**Almennar upplýsingarherferðir um rúsdrekka.** Hesar eiga at standa í rímiligum samsvari við evnið og snúgva seg um at kunna um váðan við rúsdrekka, og kunna um ta hjálp og viðgerð, sum eru tøk.

---

## 5.8. Átaksøki 8: Prísásetan

Avgjøld hava víst seg at vera ein munadyggur háttur at minkað um skaðiligu rúsdrekkanýtsluna. WHO vísir tó á, at avgjøld gera ikki eins stóran mun hjá teimum, ið hava betur ráð, enn hjá teimum, ið hava minni, og tí kunnu avgjøld ikki væntast at hava somu effekt í øllum sosialum samfelagsløgum. Prísurin ávirkar atferðina hjá teimum ungu, teimum eldru og hjá teimum, sum eru bundin av rúsdrekka. Eru prísirnir lágir, drekka hesi meir og øvugt.

Myndin niðanfyri vísur, hvørji avgjøld eru á ymsu rúsdrekkavørunum, sum verða seldar í Rúsdrekkasølu Landsins. Yvirskipað fylgja avgjøldini alkoholstyrkini – tess sterkari, tess hægri avgjald.

Talva 10: Soleiðis verður inntøkan av seldum førum býtt - dømir




Kelda: Rúsdrekkasøla Landsins.

Á talvu 10 er dømi um eina fløsku av spiritus, sum kostar Rúsdrekkasøluni góðar 45 krónur í innkeypsprísi men 261 krónur fyri tann sum keypir fløskuna í Rúsdrekkasøluni. Ein partur av hesum fer til rakstur, men nógv størsti parturin fer til almenn gjøld. Tað er greitt, at lágir rúsdrekkaprísir hava avgerandi týdning fyri nýtsluna og fylgiskaðum av rúsdrekkanýtslu. Tí skal prísurin verða mettur í mun til prísin fyri aðrar vørur og tillagaður í mun til inntøkur. Í Føroyum eru avgjøldini høg, og tað er neyvan møguligt at spenna tvinguna enn meiri fyribils. Um prísurin gerst ov høgur, er reellur vandi fyri, at fólk finna sær aðrar vegir at rúsa seg. Møguliga við evnum og drykkjum, sum eru meira vandamiklir enn rúsdrekka. Í Noregi hava søguliga verið mong, sum hava brent brennivín til egna nýtslu. Tað er neyvan gongd leið. Víst verður annars til partin um søluskipan.

**Regulering við avgjøldum.** Hetta er eitt munadygt amboð at regulera rúsdrekkanýtsluna, hóast tað ikki kann standa einsamalt. Mælt verður til framhaldandi eisini at nýta hetta amboðið.

## 5.9 Átaksøki 9: Fyribyrging og rúsdrekkaviðgerð í heilsuverkinum

Eitt vælvirkandi heilsuverk er grundarsteinurin undir bæði at veita viðgerð fyri skaðiligu nýtsluna av rúsdrekka og at fyribyrgja, at skaðilig nýtsla tekur seg upp. Millum tilmælini er ein stutt ráðgevandi samrøða (brief

intervention) hjá kommunulækna – ella aðrastaðni í primera geiranum – við tey, ið hava eina stóra nýtslu ella eina skaðiliga nýtslu av rúsdrekka. Talan er sostatt bæði um fyribyrging og viðgerð í hesum parti.

### 5.9.1 Fyribyrging. Tiltøk í tøkum tíma – skjót interventión

Ein týðandi súla í tí fyribyrgjandi arbeiðinum er at staðfesta rúsdrekkatrupulleikar tíðliga, áðrenn tann skaðiliga nýtslan av álvara tekur seg upp. Tað er kent, at fólk, sum fara í viðgerð fyri rúsdrekka, í longri tíð hava havt eina skaðiliga nýtslu, sum ikki bert hevur havt heilsulig og sosial árin á tann einstaka, men á maka og børn og onnur við. Tí verður arbeitt fyri at menna tiltøk og hættir, sum fyribyrgja skaðum, áðrenn teir taka seg upp.

Tá ið vit í Føroyum tosa um at gera tiltøk, sum skulu fyribyrgja, at trupulleikar av rúsdrekka taka seg upp og í øðrum føri vaksa, so liggur uppgávan í dag hjá nógvum ymsum pørtum upp á tvørs av stovnum og geirum.

Í arbeiði sínum at minka um skaðarnar av rúsdrekkanýtslu hevur Fólkaheilsuráðið seinnu árini havt fokus á upplýsing um vandan av at drekka ov nógv rúsdrekka. Eitt dømi er nýggja átakið "Tann lítli roknarin",[112] har fólk sjálvi kunnu seta inn egna nýtslu í eina talvu og skjótt fáa upplýst, um teirra nýtsla kann vera skaðandi ella ikki. Eisini kann nevnast, at Fólkaheilsuráðið kannaði rúsdrekkanýtsluna hjá fólki, sum part av MARK-kanningini frá 2007, og var ein faldari gjørdur í samstarvi við SSP[113] í 2011 um góð ráð til foreldur at ungum, sum byrja at smakka sær á. Í heila tikið hevur Fólkaheilsuráðið brúkt sína orku til aðrar vandatættir seinnu árini, serliga upplýsing um vandarnar við at roykja, av skeivum kosti og manglandi rørslu.

Føroyska samfelagið bjóðar fram eina røð av tænastum og tilboðum til borgaran. Vit hava børn á dagstovnum, í fólkaskúla og á miðnám. Vit hava fría atgongd til kommunulækna, tá tørvur er á tí, og fáa regluliga vitjan av heilsufrøðingum í sambandi við føðing. Í frítíðini hava vit møguleikan at melda okkum til alskyns frítíðarítriv, børnini gera fimleik, spæla hondbólt og fótbólt, samstundis sum tey læra okkurt ljóðføri. Eru vit fyri sosialari hending, kunnu vit venda okkum til almannaverkið at fáa fíggjarliga hjálp, og barnaverndartænastan veitir familjum og børnum stuðul.

Allar hesar fyriskipanir merkja, at vit gjøgnum lívsleiðina koma í samband við nógv fólk. Nógv av hesum starvast fyri almennan myndugleika og hava til uppgávu at tryggja familjum og einstaklingum hjálp, tá tørvur er. Fyribyrgjandi uppgávan liggur tí eisini í ávísan mun hjá teimum og verður í stóran mun eisini væl røkt.

Innan heilsuverkið er tað til dømis kommunulæknin, sum er í fyrstu røð og møtir fólki, sum hava rúsdrekkatrupulleikar. Ikki altíð tí at rúsdrekkamisnýtarin sjálvur førir tað fram fyri kommunulæknanum, men ofta kemur læknin inn á tað sum eina møguliga orsøk til teirra sjúkufyribrigdi. Kommunulæknin hevur ymsar viðgerðarmøguleikar – frá samrøðum til at skriva út antabusheilivág, ella kann hann ávísa til viðgerð á sjúkrahúsinum. Lærarar, námsfrøðingar, heilsufrøðingar og sosialráðgevar eru aðrir starvsbólkar í fremstu røð, sum hava ábyrgd av at fráboða og í flestu førum eisini gera tað, tá ið tey varnast, at til dømis rúsdrekka elvir til trupulleikar fyri einstaklingin og/ella familjuna.

Fráboðanarskyldan er millum annað ásett í barnaverndarlógini.[114] Tey, sum í starvi sínum hava við børn at gera, hava eina víðkaða skyldu at boða myndugleikunum frá, um tey gerast varug við at til dømis

---

[112] www.folkaheilsa.fo

[113] www.bsv.fo

[114] Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013.

rúsdrekkatrupulleikar í heiminum skaðar børnini. Skyldan at boða frá er sett framum tagnarskylduna hjá hesum bólki.

#### 5.9.1.1 Stutt ráðgevandi samrøða

Í fyribyrgingarpakkanum frá 2012 hjá danska Heilsustýrinum um rúsdrekka verður mælt til eitt tiltak, sum gransking hevur víst gevir góð úrslit.[115] Talan er um eina stutta ráðgevandi samrøðu, sum er allýst sum ein stutt samrøða á 5-20 minuttir eina til fimm ferðir í leypi av stuttari tíð. Hátturin hevur skjalprógvaða effekt í mun til at minka um rúsdrekkanýtsluna hjá sjúklingum, sum hava eina stóra nýtslu ella skaðiliga nýtslu. Stutta ráðgevandi samrøðan kann millum annað fara fram í heilsudeplum ella kommunulæknaviðtalum. Danska Heilsustýrið hevur gjørt eina kliniska vegleiðing, sum rópast "Spørg til alkoholvaner", sum bæði gevur vitan um rúsdrekkatengdar heilsuskaðar, og hvussu kommunulæknin kann finna fram til, meta um, útgreina og geva sjúklinginum við yvirnýtslu eina stutta ráðgevandi samrøðu.

Í innganginum til vegleiðingina[116] verður víst á, at kommunulæknarnir kenna flestu sjúklingarnar og hava tí ein sentralan leiklut í at styrkja tiltøkini mótvegis rúsdrekkatrupulleikum. Men hóast kommunulæknin oftani sær sjúklingar við møguligu rúsdrekkatengdum sjúkum, fyllir rúsdrekka ikki nógv í tí diagnostiska arbeiðinum. Kanska tí læknar ikki vilja styggja sjúklingin – ella tí læknin ikki veit, hvat eigur at verða gjørt.[117] Í nýggjari svenskari kanning mettu læknar, at teir høvdu munandi verri førleika at ráðgeva á rúsdrekkaøkinum enn á øðrum lívshættarøkjum. Sama kanning staðfesti, at 3 av 10 læknum spurdu ikki um rúsdrekka, tá sjúklingurin hevði sjúkueyðkenni, sum læknin metti kundu tengjast saman við rúsdrekka.

Sum nevnt meta bæði WHO og danska Heilsustýrið, at hátturin við stuttari ráðgevandi samrøðu hevur góðan virkna. Endamálið við hesum háttinum at finna fram møguligar rúsdrekkatrupulleikar er at finna sjúklingar við eini stórari nýtslu við tí fyri eyga at geva røttu hjálpina.

Talan er ikki um, at læknin skal spyrja øll hvørja ferð. Í klinisku vegleiðingini eru tilmæli um, nær tað er viðkomandi at spyrja um rúsdrekkavanar (t.d. heilsukanningar), og nær tað er viðkomandi at spyrja um rúsdrekkavanar (t.d. í samband við barnakonukanningar). Í vegleiðingini eru eisini hugskot til, hvussu samrøðan kann fara fram.

Hóast kliniska vegleiðingin hjá Heilsustýrinum er ætlað kommunulæknum, mælir Heilsustýrið í fyribyrgingarpakkanum um rúsdrekka til, at háttalagið handan stuttu ráðgevandi samrøðuni eisini kann brúkast av øðrum, sum møta borgarum í fremstu røð. Mælt verður til, at fakbólkar, sum longu frammanundan hava samband við stórar bólkar av borgarum, t.d. sosialráðgevar í Almannaverkinum ella ráðgevar í ALS, brúka stuttu ráðgevandi samrøðuna fyri at finna fram til møguligar rúsdrekkatrupulleikar.[118]

### 5.9.2 Rúsdrekka- og rúsevnisviðgerð í Føroyum

Í hesum parti verða tilboðini um viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu umrødd. Støði verður tikið í teimum viðgerðartilboðum, sum verða veitt í Føroyum. Síðani verður umrøtt, hvørt galdandi viðgerðartilboð nøkta tann viðgerðartørv, sum tey við rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu hava.

115 Sundhedsstyrelsen (2012).
116 Sundhedsstyrelsen (2010).
117 Sundhedsstyrelsen (2010).
118 Sundhedsstyrelsen (2012).

### 5.9.2.1 Viðgerðartilboð í Føroyum

Í Føroyum eru tvey viðgerðarstøð: Blákrossheimið og Heilbrigdið. Harumframt eru privatir viðgerar, sum veita viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu.

*Blákrossheimið*

Í 1984 stovnaði Blái Krossur Føroya Viðgerðarstaðið Blákrossheimið. Leiðslan á Blákrossheiminum er ein nevnd við 3–5 persónum, sum Blái Krossur velur. Nevndin setur fyristøðufólk. Landsnevndin fyri Bláa Kross Føroya skal góðkenna setanina. Fyristøðufólkið hevur dagligu ábyrgdina av fíggjarligu og viðgerðarligu leiðsluni á Blákrossheiminum við ábyrgd fyri nevndini. Landið fíggjar raksturin umvegis Løgtingsins fíggjarlóg. Blákrosshemið hevur seinastu árini gjørt mál- og avrikssáttmálar við Heilsumálaráðið.

Sambært viðtøkunum byggir virksemi á kristiligt grundarlag og hevur til endamáls at vera viðgerðarstað fyri rúsevnismisnýtarar[119]. Viðgerðin á Blákrossheiminum er skipað sum heildarviðgerð, og inniheldur henda avrúsing, dag- ella samdøgursviðgerð og eftirviðgerð. Harumframt hevur Blákrossheimið, sum liður í viðgerðini, tilboð um ambulanta viðgerð og familjuviðgerð.

Viðgerðin á Blákrossheiminum hevur til endamáls at arbeiða fram ímóti fullkomnum fráhaldi frá rúsevnum. Sambært Blákrossheiminum verður hetta í fyrstu atløgu gjørt við at avrúsa, samstundis sum arbeitt verður í bólkum við m.a. motivatión, rúsfunktión, broytingarætlan og upplýsing. Í aðru atløgu fylgja brúkararnir viðgerðarætlan, sum verður gjøgnumførd við arbeiði í bólkum og einasamrøðum, har ljós verður varpað á tað, hin einstaki hevur brúk fyri. Hátturin Blákrossheimið arbeiðir uppá, er sosialpedagogisk og sálarfrøðilig viðgerð, og verður t.d. eg-styrkjandi-, ACT- og kognitivviðgerð nýtt.

Síðani 2011 er Blákrossheimið miðvíst byrjað at arbeiða meira við heildarviðgerð, soleiðis at skilja, at fólk, eftir at tey hava verið í viðgerð, arbeiða víðari í skipaðum bólkum í eftirviðgerð, upp í tvey ár. Tá møguleiki er fyri at arbeiða víðari í bólki, er lættari at halda seg til upprunaligu avgerðina um at broyta lívsførslu og liva tað góða lívi uttan rúsandi evnir.

Eftirviðgerðartilboðið er í trimum pørtum. Í fyrsta parti kunnu fólk koma aftur tvær til tríggjar ferðir um mánaðin í 6 mánaðir, har tey m.a. arbeiða í einum skipaðum bólki saman við sálarviðgera. Í næsta parti, eftir umleið hálvt ár frá fyrsta parti, verða tey boðin til eftirviðgerðarskeið, hetta er bólkur, sum møtist eitt kvøld um vikuna í 15 vikur saman við sálarfrøðingi. Í triðja parti hava øll, sum hava verið í viðgerð møguleika at koma á vikuligan eftirviðgerðarfund. Hesir fundir eru í Havnini og á Nesi í Eysturoynni.

Í viðtøkunum er ásett, at øll størv á Blákrossheiminum skulu lýsast leys alment. Í lýsingini skal verða greitt frá hvørjar fortreytir eru neyðugar og ynskiligar til tey ávísu størvini. Nevndin setur eftir tilmæli frá leiðaranum onnur fólk í starv. Blákrossheimið hevur upplýst, at á viðgerðarheiminum eru 9,5 fulltíðarstørv. Talan er um leiðara, deildarsjúkrarøktarfrøðing, sálarfrøðing, sálarviðgera, rúsevnisviðgera, familjuráðgeva og onnur starvsfólk. Eisini eru lækni og prestur knýttir at viðgerðini, men hesir eru ikki taldir við í uppgerðina av fulltíðarstarvsfólkum. Landið setur ikki krøv til talið av ella førleikum hjá starvsfólkum á Blákrossheiminum.

*Heilbrigdið*

Viðgerðarheimið Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi[120] fór undir virksemi sítt tann 1. desember 1986. Heilbrigdi er sjálvsognarstovnur við nevnd við fimm fólkum. Landsstýrismaðurin velur nevndina eftir tilmæli frá nevndini

[119] Rúsevnismisnýtsla merkir í hesum høpi bæði rúsdrekka og rúsevnismisnýtsla.

[120] Viðgerðarheimið Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi verður vanliga nevnt Heilbrigdi. Við tað, at tað vanliga heitið er "Heilbrigdi", hava vit valt at brúka tað her.

sjálvari. Nevndarlimirnir skulu umboða ávikavist politisku skipanina, løgregluna, sjúkrahúsverkið, kommununa og brúkaran. Nevndin setir eitt fyristøðufólk, sum hevur dagligu ábyrgdina av fíggjarligu og viðgerðarligu leiðsluna á Heilbrigdi við ábyrgd fyri nevndini. Fyrisitingarliga er Heilbrigdið undir Heilsumálaráðnum og gera partarnir á hvørjum ári mál- og avrikssáttmála. Landið fíggjar raksturin umvegis Løgtingsins fíggjarlóg.[121]

Sambært viðtøkunum er endamálið við Heilbrigdi at vera viðgerðarstað fyri rúsdrekkamisnýtarar. Viðgerðin er skipað eftir Minnisota-modellinum og viðgjørt verður eftir 12 stigum. Grundleggjandi fatanin er tann, at alkoholisma er ein kronisk, økjandi og deyðilig sjúka. Í viðgerðini verður gjørt greitt, at ongin alkoholikari kann drekka við hógv, aftaná at ávís likamlig, sálarlig og sosial eyðkenni hava víst seg. Heilbrigdi veitir avrúsan, ambulanta viðgerð, eftirviðgerð og familjuviðgerð. Sambært Heilbrigdi fevnir viðgerðarskráin um tríggjar høvuðspartar:

- Avrúsing og forviðgerð
- Viðgerð, ið hevur til endamáls at læra rúsevnismisnýtaran at kenna seg sjálvan, og læra viðkomandi at liva uttan rúsevni, ein dag í senn
- Eftirviðgerð, ið hevur til endamáls at læra rúsevnismisnýtaran at luttaka á A.A. fundum og í andaligum felagsskapum

Í viðtøkunum er ásett, at øll størv á Heilbrigdi skulu lýsast leys alment. Í lýsingini skal verða greitt frá, hvørjar treytir eru neyðugar og ynskiligar til tey ávísu størvini. Nevndin setur eftir tilmæli frá fyristøðufólkinum onnur fólk í starv. Heilbrigdi hevur upplýst, at á viðgerðarheiminum starvast 1 sjúkrarøktarfrøðingur, 2 kvøldvaktir, 2 náttarvaktir, 2 ráðgevarar, 1 programleiðari, 1 1/2 kokkur og 1/2 avloysaravakt. Læknavaktin verður umsitin av 3 læknum. Sálarfrøðingur verður nýttur av og á. Landið setur eingi krøv viðvíkjandi tali av ella førleikum hjá starvsfólkum á Heilbrigdi.

#### 5.9.2.2 Hagtøl fyri viðgerðir á viðgerðarstovnunum

Ein fortreyt fyri at kunna veita røttu viðgerðartilboðini til teirra, sum hava eina rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu er, at tað er neyvur kunnleiki um, hvør viðgerðartørvurin er. Blákrossheimið og Heilbrigdi gera upp á hvørjum ári, hvussu nógv hava verið í viðgerð á viðgerðarstøðunum báðum. Av tí, at hesar upplýsingar verða skrásettar í egnum hagtalsgrunnum, ber ikki til at samanbera hagtølini hjá stovnunum báðum.

Skrásetingarhátturin hjá Blákrossheiminum gevur eina rættuliga greiða mynd av gongdini viðvíkjandi viðgerðarvirkseminum á stovninum. Skrásetingin hjá Heilbrigdi av viðgerðarvirkseminum er meira avmarkað, og av somu orsøk geva hagtølini ikki eins stóran kunnleika til virksemið á hesum stovni.

*Hvussu nógv fara í viðgerð?*

Í talvu 11 sæst, hvussu nógv hava verið innløgd til viðgerð á ávikavist Blákrossheiminum og á Heilbrigdi í tíðarskeiðinum 2009-2014. Talið fyri, hvussu nógv fara í viðgerð, broytist nakað ár undan ári. Í nevnda tíðarskeið hava í miðal verið 239 persónar í viðgerð á Blákrossheiminum og Heilbrigdi árliga. Av hesum hava í miðal 138 persónar verið í viðgerð á Blákrossheiminum, meðan 101 persónar í miðal hava verið í viðgerð á Heilbrigdi. Sambært hesum tølum kvinkar talið av persónum í viðgerð á Heilbrigdi spakuliga niðureftir, meðan

[121] Viðtøkur fyri Sjálvsognarstovnin Heilbrigdi á Velbastað (2011).

talið av persónum á Blákrossheiminum broytist ár undan ári. Talið av persónum í ambulantari viðgerð hevur síðani 2010 verið um 30-40 um árið.

Gerast skal vart við, at yvirlitið yvir persónar, sum hava verið í sambandi við viðgerð á viðgerðarstøðunum báðum, skal takast við fyrivarni, tí tað ber ikki til at staðfesta, um talan er um ymiskar persónar, ella um talan partvíst er um somu persónar, sum hava verið í viðgerð fleiri ferðir ella í viðgerð á ymsum viðgerðarstovnum.

Talva 11: Tal av persónum í viðgerð á Blákrosshiminum og Heilbrigdi (innløgd)

| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Blákrossheimið | 126 | 143 | 136 | 147 | 164 | 112 |
| Heilbrigdi | 110 | 108 | 107 | 105 | 94 | 84 |
| í alt | 236 | 251 | 243 | 252 | 258 | 196 |

Kelda: Blákrossheimið (2009-2014); Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi (2009-2014).

### *Kynsbýti*

Sambært hagtølunum sæst, at kynsbýtið á teimum, sum søkja sær viðgerð á ávikavist Blákrossheiminum og Heilbrigdi, hevur stóra slagsíðu. Meginparturin av teimum, sum velja at fara í viðgerð, eru menn. Hóast tølini broytast nakað ár undan ári, so hevur lutfallið millum kynini í tíðarskeiðinum 2011-2014 ligið á umleið 80% menn og 20% kvinnur.

Hóast talið av teimum, sum fara í viðgerð, sveiggjar nakað, so sæst tó ein ábending um, at síðani 2006 eru tað fleiri kvinnur, sum hava valt at fara í viðgerð á viðgerðarstovnunum. Flestu kvinnurnar, sum fara í viðgerð, velja at fara í viðgerð á Blákrossheiminum.[122]

[122] Blákrossheimið (2005-2014); Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi (2008-2014).

Talva 12: Kynsbýtið á persónum í viðgerð á Heilbrigdi og Blákrossheiminum 2011-2014




Kelda: Blákrossheimið (2009-2014); Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi (2009-2014).

### *Aldursbólkar*

Í talvu 13 sæst, hvussu nógv í hvørjum aldursbólki søkja sær viðgerð á Blákrossheiminum. Heilbrigdi hevur bert upplýst miðalaldurin á persónum í viðgerð einstøk ár, sí talvu 14.

Størsti parturin av teimum, sum søkja sær viðgerð á Blákrossheiminum, eru í aldrinum 30-60 ár. Talið av teimum, sum eru í aldursbólkinum 60 ár og eldri, er nøkulunda støðugt. Talið av teimum heilt ungu, t.v.s. persónum yngri enn 20 ár, er minkað síðani 2010. Talið av teimum í aldursbólkinum 20-29 ár er nøkulunda støðugt. Verður hugt eftir øllum yngri enn 30 ár, sæst at tørvur er á viðgerðartilboðum til henda aldursbólk. Miðalaldurin á teimum, sum fara í viðgerð á Blákrossheiminum hevur ligið um 43-48 ár. Flestu árini hevur miðalaldurin tó ligið um 47-48 ár.

Talva 13: Aldur á innløgdum persónum í viðgerð á Blákrossheiminum

| Aldur | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| -19 | 9 | 11 | 4 | 1 | 0 | 1 |
| 20-29 | 15 | 12 | 12 | 20 | 16 | 5 |
| 30-39 | 23 | 29 | 26 | 34 | 31 | 30 |
| 40-49 | 34 | 37 | 40 | 41 | 34 | 38 |
| 50-59 | 25 | 33 | 27 | 28 | 51 | 21 |
| 60+ | 20 | 21 | 27 | 23 | 31 | 17 |
| Miðalaldur | 43 ár | 43 ár | 45 ár | 44 ár | 47 ár | 47 ár |

Kelda: Blákrossheimið (2009-2014).

Talva 14: Aldur á persónum í viðgerð á Heilbrigdi

| Aldur | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Miðalaldur | 40 ár | 44 ár | 50 ár | | 47 ár | |

Kelda: Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi (2009-2014).

### *Slag av misnýtslu*

Blákrossheimið og Heilbrigdi brúka ymsar hættir at skráseta, hvat slag av misnýtslu persónar koma í viðgerð fyri á viðgerðarstøðunum báðum. Av tí, at viðgerðarstøðini brúka ymsar skrásetingarhættir, ber ikki til at lýsa nágreiniliga fyri hvat slag av misnýtslu persónar søkja sær viðgerð. Harafturat ber bara til at fáa fatur á slíkum upplýsingum fyri nøkur fá ár frá Heilbrigdi.

Sambært teimum hagtølum, sum eru til taks, sæst, at størsti parturin av teimum persónum, sum fara í viðgerð á ávikavist Blákrossheiminum og á Heilbrigdi, fara vegna rúsdrekkamisnýtslu; meðan ein væl minni partur fer í viðgerð vegna eitt blandingsmisnýtslu, sí talvu 15. Talan er um blandingsmisnýtslu, tá tað snýr seg um at rúsa seg við fleiri enn einum evni, t.d. rúsdrekka og antin/ella tablettir, hash, narkotika.

Sum tað sæst broytist lutfallið millum tey, sum fara í viðgerð fyri ávikavist rúsdrekkamisnýtslu og blandingsmisnýtslu. Lutfallið av teimum, sum fara í viðgerð vegna rúsdrekkamisnýtslu økist; samstundis sum tað minkar hjá teimum, sum fara í viðgerð vegna blandingsmisnýtslu.

Talva 15: Lutfallið millum viðgerð fyri rúsdrekka- og blandingsmisnýtslu




Kelda: Blákrossheimið (2009-2014); Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi (2009-2014).

Sambært hagtølum hjá Blákrossheiminum ber til at fáa eina lýsing av, hvat slag av misnýtslu, persónar hava, sum koma í viðgerð. Hagtølini árini 2009-2014 vísa, at í hesum tíðarskeiði eru millum 62-73 prosent komin í viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu. Restin hevur verið í viðgerð fyri blandingsmisnýtslu. Sambært Blákrossheiminum hevur ongin verið í viðgerð, sum "bert" hevur havt trupulleikar av hashi ella øðrum narkotiskum evnum. Ein orsøk til hetta kann vera, at tilgongdin av rúsevnum er óstøðug og kostnaðarmikil, og tí velja fólk at rúsa seg við øðrum evnum eisini.

Sambært Blákrossheiminum brúka tey ungu í størri mun sterkaru rúsevnini, sum t.d. hash, amfetamin, kokain, heroin og onnur narkotisk evni saman við rúsdrekka. Hetta ger, at tað aloftast er truplari at fáast við, og tekur longri tíð at viðgera. Tey ungu kenna seg rímiliga væl á Blákrossheiminum, men tað kann tó vera trupult hjá teimum at vera saman við rúsdrekkamisnýtarum, sum eru væl eldri enn tey sjálvi. Av hesi orsøk eru tað nøkur, sum fáa tilboð um ambulanta viðgerð, tí Blákrossheimið veit, at døgntilboðið ikki altíð er nøktandi fyri tey. Blákrossheimið heldur tí, at tað hevði verið ynskiligt við einum serstøkum viðgerðartilboði fyri ungum.

Vitanargrundarlagið er veikt, tá tað snýr seg um, hvat slag av misnýtslu ávikavist kvinnur og menn fara í viðgerð fyri. Tó geva upplýsingar frá Heilbrigdi og Blákrossheiminum eina hóming av, at mynstrið er ymiskt hjá kynunum báðum. Nógv tann størsti parturin av monnunum fara í viðgerð fyri rúsdrekka; meðan ein minni partur hevur eina blandingsmisnýtslu. Hjá kvinnunum er mynstrið eitt heilt annað. Hjá kvinnunum fer umleið helmingurin í viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu og hin helmingurin fer í viðgerð fyri blandingsmisnýtslu.

*Innleggingarlongd*

Á talvu 16 sæst eitt yvirlit yvir, hvussu nógvar dagar tey, sum eru í viðgerð, í miðal hava verið innløgd á ávikavist Blákrossheiminum og Heilbrigdi. Miðaltalið á innleggingardøgum er nøkulunda tað sama á viðgerðarstøðunum báðum, tó við einstøkum undantøkum. Sambært Heilbrigdi er ein broyting hend í viðgerðarhøpinum hesi árini. Færri fólk koma í viðgerð, meðan viðgerðartíðin er vorðin longri.

Talva 16: Innleggingarlongd í døgum

| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Blákrossheimið | 27 | 24 | 29 | 33 | 26 | 30 |
| Heilbrigdi | 25 | 26 | 26 | 26 | 27 | 29 |

Kelda: Blákrossheimið (2009-2014); Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi (2009-2014).

*Vitanargrundarlag*

Staðfestast kann, at hagtalsgrundarlagið á økinum er ikki nóg gott – og av somu orsøk ber ikki til at fáa nóg neyva vitan um økið sum heild. Eftirsum tað ikki finst ein yvirskipað skráseting av teimum, sum veita viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu, ber ikki til at fáa upplýst, hvussu nógv søkja sær viðgerð árliga; hvussu aldursbýtið er hjá hesum; kyn; slag av misnýtslu o.s.fr. Dentur eigur tí at verða lagdur á at bøta um hagtalsgrundarlagið á hesum økinum (sí Átaksøkið 10). Neyvari kunning um hesi viðurskifti er somuleiðis ein fortreyt fyri støðugt at kunna menna góðskuna í teimum tilboðum, sum verða veitt innan rúsdrekka- og rúsevnisviðgerð.

### 5.9.2.3 Ávísing til viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu

Persónar kunnu venda sær beinleiðis við viðgerðarstovnarnar til at verða innlagdir ella fáa viðgerð, men viðhvørt eru tað kommunulæknarnir, sum senda viðkomandi, og viðhvørt verða tey send frá Landssjúkrahúsinum.

Landssjúkrahúsið móttekur sjúklingar við rúsdrekkatrupulleikum ella øðrum rúsevnistrupulleikum. Hesir sjúklingarnir verða altíð vístir til Landssjúkrahúsið ígjøgnum kommunulækna. Fleiri av hesum sjúklingum hava dupulta diagnosu, tað er bæði rúsevnistrupulleikar og sálarligar trupulleikar. Landssjúkrahúsið hevur ávíst samarbeiði við viðgerðarstovnar um at senda sjúklingar til viðgerðar á stovnunum, áðrenn tey fáa sálarliga viðgerð. Soleiðis kunnu sjúklingar verða sendir frá Landssjúkrahúsinum til viðgerðarstovnarnar og aftur til Landssjúkrahúsið, ella umvent. Ongar fastar mannagongdir eru um hetta.

Almannaverkið hevur heimild í forsorgarlógini at gjalda fyri at senda fólk til viðgerðar uttanlands, ella til ambulanta viðgerð hjá øðrum privatum stovnum, sum ikki fáa játtan á fíggjarlógini. Henda heimildin verður bert brúkt, tá alt annað er roynt, tað er at viðkomandi hevur verið til viðgerðar á Blákrossheiminum og Heilbrigdi uttan úrslit. Hetta er einans brúkt í samráði við Blákrossheimið og Heilbrigdi og kommunulækna.

Kriminalforsorgin kann senda fólk í viðgerð sum ein partur av einum dómsmáli. Kriminalforsorgin hevur eisini viðskiftafólk inni hjá sær í samtalum og viðtalur við starvsfólk á stovninum. Stovnurin hevur ikki játtan til at

gjalda fyri viðtalur hjá privatum stovnum ella uttanlands. Soleiðis sendir Kriminalforsorgin fólk í viðgerð á Blákrossheiminum og Heilbrigdi, um tað er neyðugt. Um Kriminalforsorgin sendir fólk í viðgerð hjá privatum stovnum, verður neyðugt at fáa játtan yvir forsorgarøkið til endamálið.

Privatur stovnur (Brúgvin) fær viðhvørt einstaklingar ella familjur frá barnaverndarnevndum til ambulanta viðgerð.

### 5.9.2.4 Játtan til viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu

Landið fíggjar raksturin av Blákrossheiminum og Heilbrigdi. Árliga játtanin verður býtt nøkulunda javnt millum viðgerðarstøðini bæði. Á talvu 18 sæst játtanin á fíggjarlógini til viðgerðarstøðini í tíðarskeiðinum 2009-2015. Árliga játtanin er økt úr 10 mió. kr. í 2009 upp í 12 mió. kr. í 2015.

Í tíðarskeiðinum 2009 – 2015 hevur játtanin til Blákrossheimið og Heilbrigdi verið tilsamans 75 mió.kr.

Talva 17: Játtan á fíggjarlógini til viðgerðarstøð 2009-2014[123]




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

### 5.9.2.5 Framtíðarviðgerðartilboð í Føroyum

Í sambandi við, at ein rúsdrekka- og rúsevnispolitikkur skal orðast, er tað eitt gylt høvi at umrøða allar teir grundleggjandi spurningarnar á økinum – her undir atkoma til viðgerð; hvørji viðgerðartilboð skulu veitast; hvussu skulu tey skipast og fíggjast; framhaldandi dygdarmenning o.s.fr.

Í grannalondum okkara verður í hesum árum nógv ljós varpað á viðgerðartilboð, og hvussu hesi kunnu dygardarmennast. Vit hava fingið íblástur hagani í sambandi við spurningin um framtíðarviðgerðartilboð í Føroyum.[124]

---

[123] Fíggjarmálaráðið (2011); Fíggjarmálaráðið (2015).

[124] Departementet for Sundhed (2015); Helse- og omsorgsdepartementet (2012); Inuuneritta; Regeringens proposition 2010/11:47; Regeringskansliet (2012); Statens offentliga utredninger. SOU 2011:35; Sundhedsstyrelsen (2015); Sundhedsstyrelsen (2012); Ålands landskapsregering (2013).

### *Viðgerðartørvur og viðgerðartilboð*

Tá talan er um viðgerðartilboð, eigur viðgerðartørvurin hjá persónum við rúsdrekkamisnýtslu og avvarðandi teirra at verða settur í miðdepilin. Hetta kann verða gjørt upp á fleiri mátar. Men um atlit samstundis skulu takast til tey viðurskifti, sum eru nevnd omanfyri, so eigur tað at verða umhugsað at fremja tillagingar í viðgerðartilboðunum fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu, sum verða veitt í dag.

Tað er ikki kannað, hvussu nógvir føroyingar hava tørv á viðgerð, og hvørji sløg av viðgerð teir hava tørv á. Men hóast hetta ber til at siga, at talan eru um tørv á viðgerð fyri ymisk sløg av misnýtslu, og tí er tørvur á fjølbroyttum viðgerðartilboðum. Við støði í hesum er avbjóðingin tí at skipa fyri nøktandi viðgerðartilboðum, sum taka atlit til øll viðkomandi viðurskifti, her undir tal av persónum í viðgerð; ymsan viðgerðartørv; kyn; aldur; viðgerð fyri avvarðandi; landafrøði; starvsfólkaorku; fakligar førleikar; fíggjarliga orku o.s.fr.

Fleiri av hoyringspørtunum hava gjørt vart við, at teir halda ikki, at tey viðgerðartilboð, sum verða veitt í Føroyum, á fullgóðan hátt nøkta tann fjøltáttaða tørvin á viðgerðartilboðum, sum er. Somuleiðis hava fleiri teirra víst á, at verandi hølisumstøður hava við sær ta óhepnu avleiðing, at øll tey, sum fara í viðgerð, eru samla undir somu lon – t.v.s. bæði kvinnur og menn; ung og gomul o.s.fr.

Samanborið við onnur Norðurlond er talið av teimum, sum fara í viðgerð í Føroyum fyri rúsdrekka- og rúsevnisnýtslu, sera lágt. Hetta hevur við sær, at tað ikki uttan víðari ber til at seta eina útlendska skipan í verk í Føroyum. Avbjóðingin er tí at skipa viðgerðartilboð, sum eru tillagað til tann viðgerðartørv og umstøður annars, sum eru galdandi í Føroyum.

### *Viðgerðartørvur kvinnur*

Av tí, at tey, sum fara í viðgerð, eru so ymisk og hava ein so fjøltáttaðan viðgerðartørv, er talið av persónum innan ymsu viðgerðarbólkarnar lutfalsliga lágt. Talið í hvørjum av hesum bólkunum verður enn meira smábýtt, eftirsum viðgerðir verða veittar á fleiri viðgerðarstøðum.

Sum dømi um hetta kunnu nevnast viðgerðartilboð til kvinnur og ung. Umleið 20 prosent av teimum, sum fara í viðgerð, eru kvinnur. Hesar eru í øllum aldri og fara tær í viðgerð fyri ymisk sløg av misnýtslu. Viðgerðartilboðini verða veitt á bæði Blákrossheiminum og Heilbrigdi. Hetta merkir, at tað eru lutfalsliga fáar kvinnur, sum eru í viðgerð í senn á teimum báðum viðgerðarstøðunum.

### *Viðgerðartørvur ung*

Á hoyringsfundunum greiddu ávikavist Blákrossheimið, Heilbrigdi og Frelsunarherurin frá, at tey halda ikki, at verandi viðgerðartilboð til ung eru nøktandi. Tey mæltu øll til at skipa serstøk viðgerðartilboð, sum eru ætlað ungum. Hesum eru umboð fyri Barnaverndarstovuna, Almannaverkið og Psykiatriska depilin samd í. Frelsunarherurin hevur gjørt eina kanning nevnd "Rúsdrekka og rúsevnismisnýtsla hjá teimum ungu".[125] Sambært niðurstøðuni í hesi kanningini vísir tað seg at vera sera trupult at staðfesta tørvin á einum viðgerðarstovni fyri ung við rúsdrekka- og rúsevnistrupulleikum við hagtølum. Men hóast hetta halda tey, sum hava verið við í kanningini, at tørvur er á einum slíkum viðgerðarstovni. At tørvur er á viðgerðartilboðum til ung samsvarar eisini við talvu 13, har tað m.a. sæst, hvussu nógvir persónar yngri enn 30 ár hava verið í viðgerð á Blákrossheiminum.

Viðgerðartørvurin hjá einum ungum, sum hevur eina misnýtslu, kann verða sera stórur. Samstundis kunnu vit staðfesta, at talið á ungum, sum hava tørv á viðgerð, er avmarkað. Spurningurin er tí, hvussu eitt

[125] Jacobsen (2014).

viðgerðartilboð til ung kann skipast á skilabesta hátt, tá atlit samstundis skulu takast til at veita eitt munadygt viðgerðartilboð, tal av ungum við tørvi á viðgerð, starvsfólkaorku, fíggjarliga orku, hølisumstøður o.s.fr.

Frelsunarherurin hevur gjørt eitt uppskot um at skipa eitt viðgerðartilboð fyri ung á einum serstøkum viðgerðarstovni, sum skal skipast til endamálið. Fyrimunurin við at skipa ein viðgerðarstovn fyri ung er, at til ber at málrætta viðgerðartilboðini, so tey hóska til júst henda aldursbólk.

### *Fáa staðfest misnýtsluna so tíðliga sum gjørligt*

Fleiri av hoyringspørtunum hava fýlst á, at viðgerðartilboðini ikki verða veitt, fyrr enn skaðin er hendur. Ofta er misnýtslan vorðin so stór, at viðgerðin verður óneyðuga drúgv og kostnaðarmikil – umframt avleiðingarnar fyri bæði persónin sjálvan og avvarðandi hjá viðkomandi. Við støði í hesum hava fleiri teirra víst á, at tað hevði verið ein skilabetri skipan at "vent viðgerðartilboðini á høvdið". T.v.s., at strembað eftir at staðfesta misnýtsluna so tíðliga sum gjørligt, so tað ber til at fara undir viðgerðina, áðrenn skaðarnir eru vorðnir ov umfatandi. Harafturat eigur dentur at verða lagdur á at veita hjálp og viðgerð til bæði tann, sum hevur eina misnýtslu, og avvarðandi hjá viðkomandi. Hoyringspartarnir hava eisini víst á, at við fleiri og meira fjøltáttaðum viðgerðarmøguleikum kann roknast við, at fólk við rúsmisnýtslu koma í viðgerð tíðliga í misnýtslusskeiðnum, tí viðgerðartilboð eru, sum hóska til tann einstaka.

Við støði í hesum eiga vit at viðgera spurningin, um tað ber til at skipa og samskipa viðgerðartilboðini á ein munadyggari hátt, enn gjørt verður í dag. Hetta við tí í hyggju at kunna veita viðgerðartilboð, sum taka atlit til tann fjøltáttaða viðgerðartørvin hjá ymsu bólkunum av misnýtarum.

### *Avrúsing – á sjúkrahúsi ella uttanfyri?*

Tað eru fleiri hættir at skipa viðgerðartilboðini uppá. Áður hevur verið mælt til, at avrúsingin fer fram innan sjúkrahúsverkið. Orsøkin til, at avrúsingin fer fram á sjúkrahúsum, er, at henda fyrst og fremst fevnir um observatión, umframt at tørvur eisini kann vera á viðgerð við heilivági. Tá ið avrúsingin á sjúkrahúsinum er liðug, kann viðkomandi verða ávístur til ambulanta viðgerð ella til eitt viðgerðarstað. Viðgerðin aftaná avrúsingina kann verða av t.d. sálarfrøðiligum, sálarheilsuligum ella námsfrøðiligum slagi.

Um ein líknandi skipan verður sett í verk í Føroyum, kann avrúsingin fara fram á antin einum ella fleiri av sjúkrahúsunum; meðan viðgerðin kann fara fram ambulant á t.d. heilsudeplunum, sum arbeitt verður við at skipa kring landið ella á einum viðgerðarstovni.

### *Ambulant viðgerð í heilsudeplum*

Sambært Heilsustýrinum hevur tað stóran týdning, at tey, sum hava ein viðgerðartørv, lættliga kunnu fáa røttu viðgerðina. Ein stórur trupulleiki er, at bert fá av teimum, sum hava tørv á viðgerð, leita sær viðgerð. Í Danmark røkkur rúsdrekkaviðgerð til eini 6.000-18.000 persónar árliga, hóast roknað verður við, at eini 140.000 eru bundin av rúsdrekka og hava tørv á viðgerð. Fyri at lætta um atkomuna til viðgerðartilboð mælir Heilsustýrið til at umrøða spurningin, um slík tilboð kunnu veitast á heilsudeplum.[126]

Í framtíðini fara støðugt fleiri tilboð um heilsuveitingar at verða veitt á komandi heilsudeplunum, t.d. kanningar og ráðgeving í sambandi við diabetes, KOL og aðrar varandi sjúkur. Av tí, at ein røð av heilsuveitingum fara at verða veittar á heilsudeplunum, kann roknast við, at tað fer at kennast minni stigmatiserandi at leita sær viðgerð har fyri rúsdrekkamisnýtslu. Av somu orsøk kann somuleiðis roknast við, at fleiri fara at velja at fara í viðgerð.

---

[126] Sundhedsstyrelsen (2009).

Við at skipa ambulanta viðgerð í heilsudeplunum kring landið verður tað eisini lættari og meira ómakaleyst hjá bæði teimum við misnýtslu og avvarðandi teirra at taka av viðgerðartilboðunum. Sum dømi kann nevnast, at tað er høgligari hjá einum úr Sumba at fara í ambulanta viðgerð á heilsudeplinum í Suðuroynni, heldur enn at noyðast norð til Havnar ella inn á Nes at fáa slíka viðgerð.

Tað kann roknast við, at tað fer at hava við sær fleiri fyrimunir at skipa ambulant viðgerðartilboð kring landið. Við at skipa tilboðini á henda hátt fara borgarar at koma fyrr í viðgerð; tað verður lættari hjá borgarum búsitandi í útjaðaranum at koma í viðgerð; lættari verður hjá avvarðandi – og serliga børnum – at koma í familjuviðgerð; fíggjarligur fyrimunur fyri tey, sum hava tørv á viðgerð, tí tey fara ikki at hava sama lønarmiss o.s.fr. Ein slík skipan merkir, at tað verða starvsfólkini á viðgerðarstøðunum, sum koma at flyta seg til tey, sum hava ambulantan viðgerðartørv, og ikki umvent.

### *Viðgerðarstovnar*

Umframt tey, sum kunnu fara í ambulanta viðgerð, fer tað eisini at vera ein partur, ið fer at hava tørv á viðgerð á einum viðgerðarstovni. Viðgerðarstovnarnir kunnu so í enn størri mun leggja seg eftir at veita hesum persónum eina munadygga viðgerð.

### *Lógarverk*

Sum er finst einki lógarverk, sum regulerar viðgerðartilboðini fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu. Hetta er í andsøgn við viðgerðartilboðini, sum verða veitt í heilsuverkinum. Innan heilsuverkið er ásett í lóg, hvørjir borgarar hava rætt til hvørjar heilsutænastur; hvørji heilsustarvsfólk hava rætt til at útinna heilsutænastur, skipan, rakstur o.s.fr. Við tað, at talan er um viðgerð og eftirviðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu, eigur hetta økið somuleiðis at verða regulerað í lóg við líknandi ásetingum, sum galda innan heilsuverkið. Í fleiri av grannalondunum er tað ásett í lóg, at tey, sum starvast innan misnýtsluviðgerð, skulu hava viðkomandi útbúgving. Við at áseta krøv um fakligar førleikar í lóg ber til at hækka fakliga støðið í viðgerðartilboðunum og harvið góðskuna í teimum. Sum dømi um hetta kann nevnast, at í Íslandi hevur tað síðani 2006 verið eitt lógarkrav, at tey, sum starvast innan misnýtsluviðgerð, skulu hava viðkomandi útbúgving.[127] Royndirnar hagani vísa, at kravið um fakligar førleikar hevur havt við sær, at misnýtsluviðgerðin nú er nógv meira professionel, enn hon var áður, og harafturat eru viðgerðartilboðini evidensbasera.

### *Ókeypis viðgerð ella gjøld?*

Spurningurin um, hvussu heilsuveitingar skulu fíggjast verður tíðum umrøddur. Sambært galdandi skipan eru summar heilsuveitingar ókeypis fyri borgaran (t.d. viðtala hjá kommunulækna og viðgerð á sjúkrahúsi); meðan aðrar hava heilt ella partvíst egingjald (t.d. viðgerð hjá tannlækna). Orsøkin til ymsu hættirnar at fíggja heilsuveitingar uppá kemst av søguligum ávum.

Í Føroyum er viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu á viðgerðarstøðunum Blákrossheimið og Heilbrigdi ókeypis. Umframt tey viðgerðartilboðini, sum tað almenna fíggjar, eru nakrir privatir viðgerar. Tey, sum velja at fara í viðgerð hjá privatum viðgerum, rinda sjálvi fyri viðgerðina. Spurningurin um, hvør skal rinda fyri viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu, verður til tíðir umrøddur í Føroyum, t.v.s. um tað skal vera ókeypis fyri tann, sum fer í viðgerð, ella um viðkomandi skal rinda eitt gjald fyri at kunna koma í viðgerð ella afturvendandi viðgerð.

---

[127] www.saa.is

Í stuttum ber til at siga, at tey, sum mæla til, at viðgerðin skal vera ókeypis, vísa á, at tað er týdningarmikið, at øll hava atgongd til slík viðgerðartilboð. Somuleiðis vísa tey á, at eitt heilt ella partvíst egingjald kann hava við sær óhepnar sosialar avleiðingar, tí vandi er fyri, at fólk fara at setast aftur at fara í viðgerð av fíggjarligum ávum. Tey, sum mæla til heilt ella partvíst egingjald, vísa hinvegin á, at fólk eru meira hugað at fara í viðgerð, tá tey rinda fyri hana sjálvi. Av somu orsøk er størri møguleiki fyri, at viðgerðin eydnast, og tey verða rúsfrí. Á henda hátt er eisini størri møguleiki fyri at fyribyrgja, at fólk fara í viðgerðir fleiri ferðir.

Hvussu viðgerðartilboðini – harundir eisini tilboðini um rúsdrekkaviðgerð – verða fíggjað, er ein politiskur spurningur. Higartil hevur tað ikki verið undirtøka fyri at broyta verandi leist, sum er, at rúsdrekkaviðgerð er ókeypis fyri tey, sum fara í slíka viðgerð.

---

**Ráðgevandi samrøða hjá kommunulækna.** Flestu fólk koma í samband við kommunulækna, og tí er tað sera hóskandi at hava samrøður um rúsdrekkanýtslu har. Hetta kann setast í verk við íblástri úr klinisku vegleiðingini hjá Heilsustýrinum. Eisini aðrir fakbólkar kunnu hava slíkar samrøður.

**Betri vitanargrundarlag.** Vitanin um økið viðvíkjandi viðgerðartørvi og viðgerðartilboðum er ikki nøktandi. Hetta kemst av, at eingin skipað vitan finst um støðuna á økinum sum heild. Slík vitan er ein fyritreyt fyri at kunna skipa meira málrættað viðgerðartilboð, sum hóska til hvønn einstakan, ið hevur tørv á viðgerð. Tað eigur tí at verða raðfest frammarlaga at fáa hesa neyðugu vitan til vega.

**Viðgerðartilboð til ung skipast.** Verandi viðgerðartilboð til ung eru ikki nøktandi. Tørvur er á at skipa tilboð, sum eru málrættað til henda aldursbólk. Spurningurin um, hvussu viðgerðartilboð til ung skulu skipast. eigur at verða viðgjørdur neyvari saman við viðkomandi pørtum.

**Avrúsing og viðgerð.** Mælt verður til, at umrøða spurningin um avrúsingin framyvir skal fara fram innan sjúkrahúsverkið. Viðgerðin aftaná avrúsingina kann síðani fara fram ambulant á einum heilsudepli kring landi ella á einum viðgerðarstovni.

**Lóg um viðgerðartilboð.** Sum ein liður í strembanini eftir støðugt at betra um viðgerðartilboðini til teirra, ið hava tørv á viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu, verður sett í gildi lóg, har ásetingar verða um krøv til viðgerðarstøð; krøv um fakligar førleikar og fakliga menning hjá starvsfólkum á viðgerðarstøðum; skipan; rakstur o.s.fr.

**Góðskumenning.** Sum ein liður í støðugu strembanini eftir at góðskumenna viðgerðartilboðini, skulu hesi eftirmetast regluliga.

---

## 5.10 Átaksøki 10: Yvirvøka (monitorering) og eftirmetingar

WHO vísir á, at tað hevur týdning at vaka yvir og eftirmeta tey átøk, ið vera sett í verk. Hetta kann gerast við hagtølum, skrásetingum og fólkateljingum. Endamálið er millum annað at fáa eitt yvirlit yvir tey, ið drekka ov nógv, hvat verður drukkið og bakgrundina fyri tí skaðiligu rúsdrekkanýtsluni. Hetta eru dáta, sum kunnu brúkast til fyribyrging og somuleiðis til at meta um effektina av møguligum átøkum.

Rúsdrekka er, uppá gott og ilt, ein partur av okkara gerandisdegi, og skulu vit minkað um skaðiligu árini av rúsdrekkanýtslu, er neyðugt at hava gjølliga vitan um, hvørji fólk drekka, nær fólk drekka, hví fólk drekka og kanska eisini hvat fólk drekka.

Rúsdrekkanýtsla og –misnýtsla er tengd at nógvum ymiskum faktorum, og samspælið millum hesar faktorar og rúsdrekkanýtsluna/-misnýtsluna er ógvuliga komplekst. Sjálvt um tað í ávísan mun ber til at samanbera rúsdrekkanýtslu/-misnýtslu frá samfelag til samfelag, so eru altíð munir, sum gera, at vitan um rúsdrekkanýtslu/-misnýtslu í einum samfelag ikki neyðturviliga kann brúkast í einum øðrum samfelag.

Fyri at tað skal bera til at seta skynsom mál fyri ætlanum um at tálma rúsdrekkanýtslu og fyribyrgja misnýtslu, er neyðugt við munagóðari yvirvøku av og eftirlitið við rúsdrekkanýtsluni.

### *Yvirvøka hjá heimsheilsustovninum WHO*

WHO leggur serliga dent á at savna vitan um:

- Vavi av rúsdrekkanýtsluni
- Brúksmynstur (hvørji fólk drekka, nær, hvar og hví?)
- Skaðar og avleiðingar av rúsdrekkanýtslu/-misnýtslu
- Búskaparlig árin av rúsdrekkanýtslu/-misnýtslu
- Virknað av verksettum politikkum, sum hava til endamáls at tálma rúsdrekkanýtslu/-misnýtslu
- Fyribyrging, gransking og viðgerð av vandamiklari og skaðiligari rúsdrekkanýtslu/-misnýtslu
- Rúsdrekkanýtslu/-misnýtslu hjá ungum[128]

WHO umsitur datagrunnin GISAH,[129] sum inniheldur upplýsingar um rúsdrekkanýtslu í 196 londum. Ein partur av grundarlagnum undir GISAH er spurnarkanningin *The Global Survey on Alcohol and Health*, sum verður send øllum limalondum í WHO. Seinasta kanningin varð í 2012 og 2013, og tá svaraðu 177 limalond umboðandi 97,2% av heimsins íbúgvum.

Aðalendamálið við yvirvøkuni hjá WHO av rúsdrekkanýtslu í øllum heiminum er at menna amboð, sum gera tað lættari at fara frá yvirvøku til politikkmenning og frá verksetan av politikkum til eftirmeting. Hagtølini hjá WHO, eru alment atkomilig á internetinum.[130]

Grundarlagið undir øllum eftirfarandi hagtølum eru neyvar og álítandi skrásetingar. Tað er soleiðis umráðandi, at eingin ivi er um, hvat tað er, sum verður skrásett, nær og undir hvørjum umstøðum.

### *Avbjóðingar í sambandi við skráseting*

Ein trupulleiki, tá skrásetingar skulu gerast um til hagtøl, er, at sama skráseting kann koma fyri fleiri staðni og soleiðis skeikla myndina, sum hagtølini skulu vísa. Um ætlanin t.d. er at gera hagtøl um, hvussu nógvir einstaklingar hava fingið viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu í einum árið, so er týðandi, at hvør einstakur persónur bert verður taldur við einaferð. Her kann ein trupulleiki verða, at sami persónur er skrásettur fleiri ferðir í sama ári og kanska á fleiri ymiskum viðgerðarstøðum; um hvør skráseting í hagtølunum verður tald sum ein nýggjur einstaklingur, førir hetta við sær, at hagtølini fyri, hvussu nógvir einstaklingar hava fingið viðgerð í einum ári, verður ov høgt.

---

[128] World Health Organization (2014)

[129] The Global Information System on Alcohol and Health

[130] www.who.int/gho/alcohol

Ein máti at fyribyrgja nevnda trupulleika er at eyðmerkja hvønn einstakling sær, t.d. við p-talinum, og so bara hyggja at, hvussu nógv einstøk p-tøl eru skrásett í árinum. Í hvussu so er tveir trupulleikar knýta seg afturat hesum háttalagnum. Fyri tað fyrsta er vitanin um, at ein persónur hevur ella hevur havt alkoholtrupulleikar, roknað sum serliga viðkvom, og eigur tí at vera handfarin við størsta varsemi og undir strangari tagnarskyldu. Í øðrum lagi kann tað møguliga gerast ein forðan fyri, at fólk leita sær hjálp fyri rúsdrekkamisnýtslu, um tey vita, at tey skulu lata eyðmerkiligar upplýsingar um seg sjálvan og sína misnýtslu til ein sentralan datagrunn. Spurningurin er, hvussu trupulleikin kann loysast, soleiðis at vit bæði fáa eftirfarandi hagtøl *og* varðveita trúnaðin og harvið álitið hjá borgaranum á skipanina.

### *Passiv skráseting*

Tað finnast tvinni sløg av skráseting. Annað slagið er tann skrásetingin, sum fer fram, tá borgarin kemur í samband við myndugleikar ella viðgerðarstøð. Her kann talan vera um kommunulækna, skaðastovu, sjúkrahúsdeild, privat viðgerðarstøð, løgreglu, barnavernd ella aðrar sosialar myndugleikar. Hvørt samband verður skrásett, og einstaki myndugleikin ella viðgerðarstaðið kann síðani gera hagtøl yvir sítt virksemi. T.d. kann barnaverndin gera hagtøl yvir, hvussu ofta rúsdrekkamisnýtsla var orsøk til eitt barnaverndarmál eitt ávíst ár, ella løgreglan kann gera hagtøl yvir, hvussu nógvar handtøkur í einum ávísum ári vóru grundaðar á rúsdrekkatengdar orsøkir.

Hetta slagið av skráseting nevna vit *passiva skráseting*. Trupulleikin við passivari skráseting er, at hon, sum útgangsstøði, ikki kann brúkast til at siga nakað um ítøkiligu støðuna í samfelagnum. Hagtøl, sum eru framleidd úr passivum skrásetingum, siga bara nakað um, hvat er skrásett, og í tann mun tey kunnu siga nakað um støðuna í samfelagnum sum so, er tað tí at tey verða tulkað og løgd til grund fyri metingum.

Trupulleikin við passivari skráseting er, at ikki øll, sum t.d. fremja harðskap, meðan tey eru rúsdrekkaávirkað, koma í samband við løgregluna. Heldur ikki øll mál um børn, sum eru fyri vanrøkt orsakað av rúsdrekkamisnýtslu, koma til kunnleika hjá barnaverndini. Hesir tilburðir, sum ikki vera skrásettir, men sum vit, við stórari vissu, vita koma fyri, nevna vit fyri skuggatøl.

### *Aktiv skráseting*

Skulu vit vita meira um skuggatølini, er ikki nóg mikið at dúva uppá passiva skráseting. Tá er neyðugt við aktivari skráseting, har farið verður út í samfelagið at tosa við fólk og spyrja tey, hvat tey vita um støðuna hjá sær sjálvum og øðrum. Út frá hesum ber til at gera eina meira eftirfarandi meting av, hvussu støðan er, hóast talan er um viðurskiftir, sum ongantíð enda við at verða passivt skrásett.

### *Rúsdrekkanýtsla sum miðalnýtsla í litrum*

Tá tosað verður um rúsdrekkanýtslu í einum landi, verður ofta tosað um miðalnýtsluna í litrum fyri hvønn borgara 15 ár og eldri. Hetta talið sigur kortini ikki so nógv, hvørki um nýtsluna í løtuni ella um broytingar í nýtsluni gjøgnum tíðina. Orsøkin er, at spjaðingin í nýtsluni hjá tí einstaka kann vera ovurhonds stór. Siga vit, at vit hava 100 persónar, harav teir 50 ongantíð nýta rúsdrekka, teir 30 drekka 2 litrar um árið, teir 10 drekka 4 litrar um árið og teir seinastu 10 drekka 15 litrar um árið, so fáa vit eina miðalnýtslu uppá 2,5 l/persón/ár. Hetta talið sigur, sum sæst, einki í sær sjálvum um nýtsluna hjá tí einstaka. Hugsa vit okkum, at nýtslumynstrið broytist, soleiðis at teir 30, sum áður drukku 2 litrar um árið, seta nýtsluna niður í 1 litur um árið, meðan teir 10, sum áður drukku 15 litrar um árið, seta sína nýtslu upp til 18 litrar um árið, so er miðalnýtslan óbroytt 2,5 l/persón/ár.

Sum sæst av hesum, kann eitt miðaltal fyri nýtsluna av rúsdrekka ikki standa einsamalt. Tørvur er eisini á kvalitativum kanningum, har eitt passaliga stórt tal av tilvildarliga útvaldum einstaklingum verða spurdir um

sína rúsdrekkanýtslu. Hetta nevna við *aktiva* skráseting. Við aktivari skráseting ber til at fáa greiði á nýtslumynstrinum, og harvið um serligir trupulleikar eru við nýtsluni hjá ávísum bólkum av borgarum, tað verið seg býtt eftir aldri, kyni, starvið, útbúgving, bústaði ella øðrum. Á henda hátt fæst til vega vitan, sum kann brúkast til at staðfesta, um neyðugt er at málrætta átøk til ávísar bólkar og seinni til at staðfesta, um framd átøk hava havt ætlað árinini.

### *Rúsdrekkanýtsla í Føroyum samanborið við okkara grannalond*

Rúsdrekkanýtslan/-misnýtslan í Føroyum kann í ávísan mun samanberast við nýtsluna/misnýtsluna í okkara grannalondum. Men tó eru munir; summir ivaleysir (Føroyar eru ikki partur av meginlandinum eins og Danmark), meðan aðrir eru ivasamir (føroyingar keypa meira rúsdrekka tollfrítt enn danir). Teir ivasomu munirnir eru munir, sum ljóða sannlíkir, men sum ikki eru prógvaðir. Skulu vit hava vitan um tollfría innflutningin av rúsdrekka til Føroya, so finst eingin passiv skráseting. Neyðugt er við aktivari skráseting, og tað merkir aftur, at kanningar mugu gerast, har fólk verða spurd, hvussu nógv rúsdrekka tey hava innflutt tollfrítt í einum ávísum tíðarskeiði. At gera slíka kanning er avbjóðandi, men als ikki ómøguligt. Tann vitanin, sum kann fáast við slíkum kanningum, kann partvíst brúkast til at samanbera okkum við onnur lond, sum gera líknandi kanningar, og til at síggja, um metingin av nýtsluni, sum byggir á passivu skrásetingina hjá Rúsdrekkasøluni, gevur eina rættvísandi mynd.

### *Kanningar av støðuni við jøvnum millumbilum*

Kanningar eiga at vera gjørdar við jøvnum millumbilum, soleiðis at møguligar broytingar í støðuni kunnu staðfestast og eftirfylgjandi tulkast og møgulig átøk fyrireikast og fremjast. Serliga umráðandi eru kanningarnar fyri at kunna meta um, hvørt framd átøk hava havt nakra broyting við sær. Eisini eru kanningarnar týðandi fyri at kunna staðfesta óheppin lyndi (tendensir) í nýtslumynstrinum og harvið kunna gera inntriv skjótt og miðvíst.

Tað er umráðandi at slíkar kanningar verða gjørdar javnan, kanska triðja hvørt ár. Hetta krevur at uppgávan at gera kanningarnar er væl og virðiliga lýst, at tað er greitt hvør tað er, sum hevur ábyrgdina fyri at fremja kanningina, og at tann stovnurin ella myndugleikin, sum hevur ábyrgdina fyri kanningini, altíð hevur nóg mikið at fíggjarligari orku til at gera arbeiðið.

### *Uppgávur hjá Fólkaheilsustovninum*

Eitt av tilmælunum í Heilsunýskipanini er at skipa ein Fólkaheilsustovn, sum skal standa á odda fyri fólkaheilsugransking og fólkaheilsuframa í landinum. Arbeiðið at fremja tilmælið í verkið er komið væl ávegis, og verður mælt til, at Fólkaheilsustovnurin m.a. fær ábyrgdina fyri uppgávuni at gera regluligar kanningar kanningar viðvíkjandi rúsdrekkanýtsluni hjá føroyingum.

---

**Tørvur á betri vitanargrundarlagi.** Vitan um økið er neyðug fyri at lýsa tær avbjóðingar, sum standa fyri framman, og fyri at kunna leggja til rættis og fremja fyribyrgjandi tiltøk í verki. Harumframt er týdningarmikið við góðum hagtølum og at vísindaligar eftirmetingar av átøkum og viðgerðartilboðum verða settar í verk. Mælt verður til, at komandi Fólkaheilsustovnurnin fær hesa uppgávu at røkja.

---

# Kapittul 6 – Fíggjarligar avleiðingar og ætlan fyri átøkini 2015-2020

Í hesum parti verður hugt eftir fíggjarligu avleiðingunum av at seta tilmælini í verk. Eisini verður sett áramál á, nær tilmælið eigur at vera sett í verk.

Tað er sera torført at gera nágreiniligar kostnaðarmetingar av hvørjum einstøkum tilmæli. Tí skulu fíggjarligu avleiðingarnar av tilmælunum takast við størsta fyrivarni. Í nøkrum førum er hetta eisini meira ella minni ein ógjørlig uppgáva, áðrenn eitt neyvari greiningararbeiði verður gjørt, og tí byggja fleiri av kostnaðarmetingunum upp á leysligar metingar.

## 6.1. Tilmælir og kostnaður

Í Rúsdrekka- og rúsevnispolitikki Føroya eru 28 tilmælir. Hesi verða viðgjørd niðanfyri við atliti at kostnaði og íverksetan.

## 6.2. Rúsevnir, ein støðulýsing

Í kapittli 3 eru 4 tilmælir, ið verða endurtikin í talvuni niðanfyri. Harumframt eru gjørdar viðmerkingar, kostnaðarmetingar og uppskot til tíðarætlan.

| Nr. | Tilmæli | Viðmerking | Meirkostaður | Tíðar-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| 1 | **Forboð fyri innflutningi av cannabisfræi.** Virkað verður fyri, at forboð verður sett fyri innflutningi av cannabisfræi ella um neyðugt, at tað einans kann flytast inn við serligum loyvi frá avvarðandi myndugleika. | Lógarbroyting skal gerast. | Tilmælið hevur ikki við sær meirkostnað. | 2016 |
| 2 | **Støðugt dagføra regluverkið um euforiserandi evni.** Týðandi er at dagføra listarnar við euforiserandi evnum, sum eru ólóglig at innflyta til landið og sum hoyra til lógina, so hvørt sum broytingar koma í gildi í Danmark. | Dagføra galdandi lóg. | Tilmælið hevur ikki við sær meirkostnað. | 2015 – 2020 |
| 3 | **Fylgja gongdini á rúsevnisøkinum neyvt.** Skipað verður fyri árligum fundum millum Heilsumálaráðið, løgreglu, Landsapotekara, Landslækna, Fólkaheilsuráð, Psykiatriska depilin og Kommunulæknafelagið at umrøða gongdina við heilivágsmisnýtslu. | | Tilmælið hevur ikki við sær meirkostnað. | |
| 4 | **Fólkaheilsuráðið skipa fyri kampanju um vandarnar við rúsevnismisnýtslu.** Ráðið eigur at seta málið á skrá í 2016. | | Torført er at meta um kostnaðin av hesum. Antin verður tørvur á hægri játtan til Fólka-heilsuráðið, ella verður neyðugt at niðurraðfesta onnur tiltøk samsvar-andi. | |

## *10 ítøkilig átaksøkir*

Í kapitli 5 eru 10 átaksøkir við tilsamans 24 tilmælum, ið verða endurtikin í talvunum niðanfyri. Harumframt eru gjørdar viðmerkingar, kostnaðarmetingar og uppskot til tíðarætlan.

### *Átaksøki 1: Taka ábyrgd, tilvitan og útinnan*

| Nr. | Tilmæli | Viðmerking | Meirkostn-aður | Tíðar-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| 5 | **Uppfylging og íverksetan av átøkum**. Fólkaheilsustovnurin fær til uppgávu at tryggja, at átøkini í hesum Rúsdrekka- og rúsevnispolitikki verða fylgd upp og sett í verk. | | Torført er at siga nakað um kostnað í hesum sambandi. | 2015 |
| 6 | **Minka miðalnýtsluna**. Málið er, at árliga miðalnýtslan av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri minkar til í mesta lagi 6 litrar í 2020. | | | 2015-2020 |

### *Átaksøkið 2: Atkoma*

| Nr. | Tilmæli | Viðmerking | Meirkostnaður | Tíðar-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| 7 | **Einkarsøluskipanin varðveitast og mennast.** Rúsdrekkasøla Landsins er krummtappurin í einum tálmandi rúsdrekkapolitikki, sum hevur til endamáls at minka um skaðiligu avleiðingarnar av rúsdrekkanýtslu, og eigur søluskipanin at verða varðveitt. Neyðugt er, at Rúsdrekkasølan áhaldandi tillagar seg í mun til dagsins krøv og tørv, og tí eigur hon at fáa fríari karmar at virka undir. | Lógarbroyting skal gerast, sum broytir karmarnar fyri virkseminum hjá Rúsdrekkasølu Landsins. | Lógarbroytingin hevur ikki við sær meir-kostnað. | 2016 – 2017<br><br>7 |
| 8 | **Rúsdrekkasølan framhaldandi landsstovnur.** Játtanar- og fíggjarlógarskipan landsins verður mett at hóska illa til ein landsstovn, sum rekur handilsligt virksemi, tí skipanin tekur ikki í nóg stóran mun atlit til tær avbjóðingar, sum handilsfyritøkur hava fíggjarliga og rakstrarliga. Tí eigur at verða arbeitt fyri at skipa Rúsdrekkasøluna sum landsstovn leysur av hesum skipanum. | Lógarbroyting skal gerast, sum broytir karmarnar fyri virkseminum hjá Rúsdrekkasølu Landsins. | Lógarbroytingin hevur ikki við sær meirkostnað. | 2016 – 2017 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 9 | **Avlopskravið strikast.** Mælt verður til at avtaka avlopskravið, tí tað stríðir móti endamálinum at tálma nýtsluni av rúsdrekka. | Avlopskravið er ásett í kunngerð. Neyðugt er at broyta kunngerðina fyri at strika avlopskravið. | Verður avlopskravið tikið av, skal støða takast til aðra avgjaldsskipan. | 2016 – 2017 |
| 10 | **Fleiri sløg av skeinkiloyvum**. Heimild skal fáast til vega at lata ymisk skeinkiloyvi, alt eftir hvat virksemi er á staðnum. Til dømis eitt slag av skeinkiloyvum til tey støð, sum fáast við hotel- og restauratiónsvirksemi, og eitt annað slag av skeinkiloyvum til dansistøð, skeinkistøð og líknandi. | Fyritreytin fyri at kunna fremja hetta í verki er, at galdandi reglur verða broyttar. | Støða skal takast til, hvat gjald skal rindast fyri ymsu sløgini av skeinkiloyvum | 2016 – 2017 |
| 11 | **Varðveita aldursmarkið.** Mælt verður til, at aldurmarkið at keypa rúsdrekka framhaldandi verður 18 ár, sum er myndugleikaaldur. | Ongin broyting samanborið við galdandi skipan. | | |
| 12 | **Fáa til vega upplýsingar um sølu í tollfríum sølum.** Krøv eiga at verða sett teimum, ið hava tollfría sølu, um at lata upplýsingar til almennan myndugleika til hagtalslig endamál. | Lógarbroyting skal gerast til tess at fáa upplýsingar um sølu í tollfríum sølum. | Torført er at meta um kostnaðin av hesum, men hetta fer at hava við sær nakað av meirkostnað. | 2017 |
| 13 | **Tollfrí søla í framtíðini.** Sjónarmiðini eru mong og atlitini fleiri, tá tað kemur til tollfría rúsdrekkasølu. Spurningur kann setast við, um tað er rætt at loyva fólki at flyta inn tollfrítt rúsdrekka, tí hetta bæði stríðir ímóti tálmandi rúsdrekkapolitikkinum annars, umframt at tað vendir sosialt skeivt. Onnur hava aðra fatan, og tí verður hesin spurningurin við hesum lagdur upp til kjak. | Verður mælt til at broyta galdandi reglur, verður neyðugt við lógarbroyting. | Áðrenn støða er tikin til málið, ber ikki til at siga nakað um kostnað hesum viðvíkjandi. | 2017 |

*Átaksøkið 3: Marknaðarføring og forboð móti lýsingum fyri rúsdrekka*

| Nr. | Tilmæli | Viðmerking | Meirkostn-aður | Tíðar-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| 14 | **Fylgja neyvt við gongdini í ES í mun til ávaringartekstir.** Í staðin fyri at seta eina serføroyska skipan í verk við ávarkingartekstum á vørum við rúsdrekka, sum verða seldar í Føroyum, verður mælt til at fylgja neyvt við gongdini á hesum økinum í ES og øðrum londum. | | | 2015–2020 |

*Átaksøkið 4: Rúsdrekkakoyring*

| Nr. | Tilmæli | Viðmerking | Meirkostn-aður | Tíðar-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| 15 | **Tryggja, at lága promillumarkið verður handhevjað.** Eisini verður mælt til framhaldandi at stuðla hesi handhevjan við upplýsingarherferðum. | | Hetta verður longu gjørt, og tí hevur tilmælið ikki við sær meirkostnað. | 2015–2020 |

*Átaksøkið 5: Minka um skaðiligu árinini, tá ið drukkið verður*

| Nr. | Tilmæli | Viðmerking | Meirkostn-aður | Tíðar-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| 16 | **Útskeinking við ábyrgd.** Samband er ímillum rúsdrekkanýtslu og harðskap. Fyri at minka um harðskapsmálini í býarlívinum, verður tí mælt til at seta í verk átak um ábyrgdarfulla útskeinking við íblástri úr verkætlan í Stockholm. | | Torført er at meta um kostnaðin í hesum sambandi. Hetta fer at hava við sær meirútreiðslur, og støða skal takast til, hvør skal rinda tær. | 2016-2017 |

*Átaksøkið 6: Rúsdrekkapolitikkir á arbeiðsplássum, ítróttarfeløgum og kommunum*

| Nr. | Tilmæli | Viðmerking | Meirkostn-aður | Tíðar-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| 17 | **Treytir í sambandi við leigu.** Mælt verður til, at hesin politikkur eisini inniheldur ásetingar um treytir fyri leigu av fasilitetum hjá kommununi. | | Hevur ikki við sær útreiðslur | 2016 |
| 18 | **Leikluturin hjá ítróttarfeløgum.** Mælt verður til, at ÍSF í størri mun enn í dag eggjar feløgunum til at taka til sín tilfarið og hugsjónina um góðan atburð. | | Ein partur av hesum verður longu gjørt. Roknast kann tó við nakað av útreiðslur í sambandi við tilfar o.s.fr. | 2015-2020 |

*Átaksøkið 7: Kampanjur og undirvísing í skúlum*

| Nr. | Tilmæli | Viðmerking | Meirkostn-aður | Tíðar-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| 19 | **Undirvísing.** Skúlabørn eiga eisini framyvir at fáa undirvísing um rúsdrekka. | | Av tí, at skúlabørn longu fáa slíka undirvísing, fer hetta ikki at hava við sær meirkostnað. | 2015-2020 |
| 20 | **Almennar upplýsingarherferðir um rúsdrekka.** Hesar eiga at standa í rímiligum samsvari við evnið og snúgva seg um at kunna um váðan við rúsdrekka, og kunna um ta hjálp og viðgerð, sum er tøk. | | Torført er at meta um kostnaðin av hesum. Roknað verður við, at hetta ikki hevur við sær meirkostnað. | 2015-2020 |

*Átaksøkið 8: Prísásetan*

| Nr. | Tilmæli | Viðmerking | Meirkostn-aður | Tíðar-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| 21 | **Regulering við avgjøldum.** Hetta er eitt munadygt amboð at regulera rúsdrekkanýtsluna, hóast tað ikki kann standa einsamalt. Mælt verður tó til framhaldandi eisini at nýta hetta amboð. | | | |

*Átaksøkið 9: Fyribyrging og rúsdrekkaviðgerð í heilsuverkinum*

| Nr. | Tilmæli | Viðmerking | Meirkostn-aður | Tíðar-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| 22 | **Ráðgevandi samrøða hjá kommunulækna.** Flestu fólk koma í samband við kommunulækna, og tí er tað sera hóskandi at hava samrøður um rúsdrekkanýtslu har. Hetta kann setast í verk við íblástri úr klinisku vegleiðingini hjá Heilsustýrinum. Eisini aðrir fakbólkar kunnu hava slíkar samrøður. | | Torført er at meta um kostnaðin av at seta hetta tilmælið í verk. Men tað er sannlíkt, at tað fer at hava við sær meirkostnað. | 2016-2020 |
| 23 | **Betri vitanargrundarlag.** Vitanin um økið viðvíkjandi viðgerðartørvi og viðgerðartilboðum er ikki nøktandi. Hetta kemst av, at eingin skipað vitan finst um støðuna á økinum sum heild. Slík vitan er ein fyritreyt fyri at kunna skipa meira málrættað viðgerðartilboð, sum hóska til hvønn einstakan, ið hevur tørv á viðgerð. Tað eigur tí at verða raðfest frammarlaga at fáa hesa neyðugu vitan til vega. | Støða skal takast til, hvørjar hagtalsskipanir skulu setast í verk til tess at fáa neyðuga vitan til vega. | Torført er at meta um kostnaðin av at seta hetta tilmælið í verk. Men tað er sannlíkt, at tað fer at hava við sær meirkostnað. | 2016 – 2020 |
| 24 | **Viðgerðartilboð til ung skipast.** Verandi viðgerðartilboð til ung eru ikki nøktandi. Tørvur er á at skipa tilboð, sum eru málrættað til henda aldursbólk. Spurningurin um, hvussu viðgerðartilboð til ung skulu skipast, eigur at verða viðgjørdur neyvari saman við viðkomandi pørtum. | | Torført er at meta um kostnaðin av at seta hetta tilmælið í verk. Men tað fer at hava við sær meirkostnað. | 2016–2017 |
| 25 | **Avrúsing og viðgerð.** Mælt verður til, at umrøða spurningin um avrúsingin framyvir skal fara fram innan sjúkrahúsverkið. Viðgerðin aftaná avrúsingina kann síðani fara fram ambulant á einum heilsudepli kring landi ella á einum viðgerðarstovni. | | Roknað verður við, at hetta kann skipast innanfyri verandi játtan. | 2017–2020 |
| 26 | **Lóg um viðgerðartilboð.** Sum ein liður í strembanini eftir støðugt at betra um viðgerðartilboðini til teirra, ið hava tørv á viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu, verður sett í gildi lóg, har ásetingar verða um krøv til viðgerðarstøð; krøv um fakligar førleikar og fakliga menning hjá starvsfólkum á viðgerðarstøðum; skipan; rakstur o.s.fr. | Lóg skal gerast. | Torført er at meta um kostnaðin av at seta hetta tilmælið í verk. Men tað er sannlíkt, at tað fer at hava við sær meirkostnað. | 2017 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 27 | **Góðskumenning.** Sum ein liður í støðugu strembanini eftir at góðskumenna viðgerðartilboðini, skulu hesi eftirmetast regluliga. | Støða skal takast til eina skipan við regluligum eftirmetingum. | Torført er at meta um kostnaðin av at seta hetta tilmælið í verk. Men tað er sannlíkt, at tað fer at hava við sær meirkostnað. | 2017–2020 |

*Átaksøkið 10: Yvirvøka (monitorering) og eftirmetingar*

| Nr. | Tilmæli | Viðmerking | Meirkostn-aður | Tíðar-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| 28 | **Tørvur á betri vitanargrundarlagi.** Vitan um økið er neyðug fyri at lýsa tær avbjóðingar, sum standa fyri framman, og fyri at kunna leggja til rættis og fremja fyribyrgjandi tiltøk í verki. Harumframt er týdningarmikið við góðum hagtølum, og at vísindaligar eftirmetingar av átøkum og viðgerðartilboðum verða settar í verk. Mælt verður til, at komandi Fólkaheilsustovnurnin fær hesa uppgávu at røkja. | | Torført er at meta um kostnaðin av at seta hetta tilmælið í verk. | 2017 – 2020 |

# Kapittul 7 – Kelduyvirlit


Almanna- og heilsumálaráðið (2006): Álit um apoteksverkið í framtíðini.

Anderson, Peter; Casswell, Sally; Parry, Charles og Rehm, Jürgen (2013): "*Alcohol*". Í Leppo Kimmo v.fl. Health in All Policies. Ministry of Social Affairs and Health.

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Fyribyrgingarráðið (2007): Úrslit úr Fólkaheilsukanningunum 2006/07. *Rúsdrekka.* http://www.health.fo/Data/Register/9bc2ba26-29b0-4289-a9d8-493796938e78/4ec6f96f-38dc-43a7-a1c4-76113266e718/9a403194-ff11-4e26-8a2f-9b01092d6622.pdf

Nerg , R.C.; Underland, V. (2012): Effekten av primærforbyggende tiltak mot bruk af tobak, alkohol og andre rusmidler hos barn og unge. Report from Kunnskapssenteret no. 07-2012: Norwegian Knowledge Centre for Health Services.

Blákrossheimið. Ársfrágreiðing 2014.

Blákrossheimið. Ársfrágreiðing 2013.

Blákrossheimið. Ársfrágreiðing 2012.

Blákrossheimið. Ársfrágreiðing 2011.

Blákrossheimið. Ársfrágreiðing 2010.

Blákrossheimið. Ársfrágreiðing 2009.

Blákrossheimið. Ársfrágreiðing 2008.

Blákrossheimið. Ársfrágreiðing 2007.

Blákrossheimið. Ársfrágreiðing 2006.

Blákrossheimið. Ársfrágreiðing 2005.

Departementet for Sundhed: Forslag til national plan for fremtidens misbrugsbehandling. FM 2015

Departementet for Sundhed og Infrastruktur: Misbrugsbehandling behov og samfundsmæssige gevinster.

Fíggjarmálaráðið (2015). Løgtingsfíggjarlógin fyri fíggjarárið 2015.

Fíggjarmálaráðið (2011). Løgtingsfíggjarlógin fyri fíggjarárið 2011).

Fólkaheilsuráðið (2014): Gallup kanning.

Fólkaheilsuráðið (2012): Álit um rúsevnapolitikk í Føroyum.

Fólkaheilsuráðið (2010). MARK Fólkaheilsukanning 2008-2009.

Frágreiðing til aðalorðaskifti um Heilsunýskipan. Tingmál nr. F-2/2013.

Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya (2009): Umstøðurnar hjá føroyskari matstovuvinnu anno 2009.

Helse- og omsorgsdepartementet (2012): Se mig – En helhetlig rusmiddelpolitikk. Alkohol – narkotika – doping. Meld.St. 30.

Inuuneritta: Handleplan for alkoholområdet i Grønland 2013-2019.

Isholm, Erling (2005): Losjan Støt Viljen 100 ár. Forlagið Mál & Mentan.

Ítróttarsamband Føroya: “Í okkara felag vita øll, hvørjar reglur eru galdandi”. Soleiðis tosa vit um rúsdrekka og tubbak í felagnum.

Jacobsen, Elin Súsanna (1995): Rúsdrekka – siðir og ósiðir. Rúsdrekka- og Narkotikaráðið.

Jacobsen, Sigmar B. (2014): Rúsdrekka og rúsevnismisnýtsla hjá teimum ungu. Kanning fyri Frelsunarherin.

Jensen, Frants (2015): *“Hvør rúspolitikkur er tann effektivasti at avmarka skaðarnar?”*. Blákrossblaðið 1/2015.

Nordens Välfärdscenter (2013): Alkoholbruk och skador på andra.

Nordisk Råd (2012): Udvalgsforslag om Nordisk alkohol og tobakspolitikk i et folkehelseperspektiv. A 1566/velfærd.

Ráðið fyri Ferðslutrygd (2007): Ferðsluhagtalsbóknin.

Regeringens proposition 2010/11:47: En samlad strategi för alkohol-, narkotika-, dopnings- och tobakspolitiken.

Regeringskansliet (2012): Regeringens åtgärdsprogramk för alkohol-, narkotika-, dopnings- och tobakspolitiken.

Reglugerð fyri Blákrossheimið. 2001.

Rossow, Ingeborg; Mäkelä, Pia; Kerr, William (2014): *“The collectivity of changes in alcohol consumption revisited”.* Í Addiction. Vol. 109. 2014.

Rúsdrekka- og Narkotikaráðið: Rúsdrekka í Norðanlondum.

Rúsdrekka- og Narkotikaráðið. Ársfrágreiðing 1992.

Rúsdrekka- og Narkotikaráðið (1991): Álit um rúsdrekkapolitikk í Føroyum.

Rúsdrekkasøla Landsins. Ársfrágreiðing 2014.

Rúsdrekkasøla Landsins. Ársfrágreiðing 2013.

Samgonguskjal millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin, Miðflokkin og Sjálvstýrisflokkin. 2011.

SIRIUS (2012): Avgiftsfritt salg på flyplasser og ferger i utenlandstrafikk.

Statens offentliga utredninger. SOU 2011:35: Bättre insatser vid misbruk och beroende. Individen, kunnskapen och ansvaret.

Stoltenbergutvalget (2010): Rapport om narkotika.

Sundhedsstyrelsen (2015): National klinisk retningslinje for behandling af alkoholafhængighed.

Sundhedsstyrelsen (2012): Forebyggelsespakke – alkohol.

Sundhedsstyrelsen og DSAM (2010): Spørg til alkoholvaner – diagnostik og behandling af alkoholproblemer.

Sundhedsstyrelsen (2009): Kvalitet i alkoholbehandling – et rådgivningsmateriale.

Sundhedsstyrelsen (2008): Kvalitet i alkoholbehandling – et rådgivningsmateriale.

The 2011 ESPAD Report. Substance Use Among Students in 36 European Countries.

The 2003 ESPAD Report. Substance Use Among Students in 36 European Countries.

Trolldal, Björn; Brännström, Lars; Paschall, Mallie J.; Kvillemo, Pia og Leifman, Håkan (2012): Ansvarfull alkoholservering – effekter på våldsbrotsligheten i landets kommuner. STAD-rapport 50.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi. Ársroknskapur 2014.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi. Ársroknskapur 2013.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi. Grannskoðanarprotokoll fyri 2012.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi. Ársroknskapur 2011.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi. Ársroknskapur 2010.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi. Ársroknskapur 2009.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi. Ársroknskapur 2008.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi. Úrrit úr grannskoðaraprotokoll fyri árið 2007.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdi. Úrrit úr grannskoðaraprotokoll fyri árið 2006.

Viðtøkur fyri Sjálvsognarstovnin Heilbrigdi á Velbastað. 2011

Vinnumálaráðið (2015). Útveitan av sjóvegis farleiðum. Frágreiðing um møguleikarnar fyri útveitan av sjóvegis farleiðunum hjá Strandfaraskipum Landsins.

Vinnumálaráðið (2007): Ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar 2008 til 2015.

World Health Organization (2014): Global status report on alcohol and health 2014.

World Health Organization (2012)a: Alcohol in the European Union. Consumption, harm and policy approaches, World Health Organisation.

World Health Organization (2012)b: Global status report on alcohol and health.

World Health Organization (2010)a: Global strategy to reduce the harmful use of alcohol.

World Health Organization (2010)b: European Status Report on Alcohol and Health 2010.

World Health Organization: The Global Information System on Alcohol and Health. http://www.who.int/gho/alcohol/en/

Workshop: Alkoholrelateret folkehelsearbeid i de nordiske lande – hvordan jobber man? Hva er aktuelt nå? Nordisk rusmiddelseminar. Trondheim 26.-29. august 2014.

Örnberg, Jenny Cisneros; Ólafsdóttir, Hildigunnur: Hur sälja alkohol? Nordiska alkoholmonopol i en tid af förändring. Í Nordisk alkohol- og narkotikatidsskrift, vol. 24. 2007.

Ålands landskapsregering (2013): Ålands handlingsprogram mot riskbruk och misbruk 2013-2013.

http://www.bsv.fo

http://www.folkaheilsa.fo//rusdrekka+er+ongantid+vandaleyst_aqvu.html

http://kvf.fo/netvarp/uv/2013/04/12/ritalin-endar-gtuni-froyum

http://www.logting.fo/files/casestate/15179/123.14%20Alit%20um%20rusdrekkalog.pdf

http://www.nordiskfolkehelsekonferanse.no/lib/tpl/nfh-/assets/presentasjoner/ws_f_leifman_270814.pdf

http://www.saa.is

http://www.systembolaget.se/vart-uppdrag/sa-sager-folket/

http://www.who.int/gho/alcohol

### *Lógarverk*

Anordning nr. 1321 af 2. december 2014 om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af lov om euforiserende stoffer.

Fráboðan nr. 148 frá 14. november 2011 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar, sum seinast broytt við fráboðan nr. 92 frá 4. september 2014.

Kunngerð nr. 95 frá 2. juli 2015 um hvat ferðandi kunnu flyta inn tollfrítt og avgjaldsfrítt til Føroya.

Kunngerð nr. 105 frá 9. desember 2008 um krøv til innandura roykirúm og ávaringartekst um heilsuvandar v.m.

Kunngerð nr. 146 frá 15. desember 2005 um innflutning av rúsdrekka hjá ferðandi, sum broytt við kunngerð nr. 121 frá 14. september 2011.

Kunngerð nr. 118 frá 7. desember 1994 um proviantering av skipum og flogførum til nýtslu umboð ella til sølu til ferðafólk.

Kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins, sum seinast broytt við kunngerð nr. 19 frá 24. mars 2010.

Kunngerð nr. 141 frá 8. oktober 1992 um at løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka fær gildi.

Kunngerð nr. 61 frá 7. mai 1992 um reglur fyri skeinkingarloyvisnevndina, sum seinast broytt við kunngerð nr. 76 frá 17. juni 2010.

Kunngerð nr. 60 frá 7. mai 1992 um skeinkingarloyvi, sum seinast broytt við kunngerð nr. 5 frá 13. januar 2011.

Kunngerð nr. 59 frá 7. mai 1992 um at partar av løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka fáa gildi.

Kunngerð nr. 153 frá 28. oktober 1992 um framleiðslu og útflutning av rúsdrekka, sum seinast broytt við kunngerð nr. 122 frá 14. september 2011.

Kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins, sum seinast broytt við kunngerð nr. 19 frá 24. mars 2010.

Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands.

Løgtingslóg nr. 128 frá 19. desember 2014 um Løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2015.

Løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg.

Løgtingslóg nr. 49 frá 11 mai 2009 um broyting í løgtingslóg um ferðslu.

Løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan.

Løgtingslóg nr. 61 frá 10. juni 2008 um tiltøk at minka um royking.

Løgtingslóg nr. 57 frá 16. mai 2006 um broyting í rúsdrekkalógini.

Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013.

Løgtingslóg nr. 56 frá 10. mai 2000 um Fólkaheilsuráð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 111 frá 11. desember 2007.

Løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 17. mai 2011.

Løgtingsmál nr. 123/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka (innflutningur og søla av víni og øli).

Løgtingsmál nr. 46/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka.

Løgtingsmál nr. 86/2005: Uppskot til løgtingslóg um broyting í rúsdrekkalógini.

Uppskot nr. 84 til løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka. 1991.

# Kapittul 8 – Fylgiskjal – hoyringspartar

Í sambandi við hoyringina, sum Heilsumálaráðið skipaði fyri, vóru ein long røð av viðkomandi myndugleikum, stovnum, ráðum, fyritøkum, privatum felagsskapum og áhugafelagsskapum boðin at koma á fund ella at senda skrivligt íkast.

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir tey, sum valdu at vera við í hoyringini.

1. Almannaverkið
2. Barnaverndarstova Føroya
3. Blái Krossur Føroya
4. Ein Malt
5. Erna Hákonardóttir
6. Finnur Koba
7. Fólkaheilsuráðið
8. Frelsunarherurin
9. Føroya Bjór
10. Gigni
11. Gistingarhús- og matstovufelag Føroya
12. Heilbrigdi
13. Ítróttarsamband Føroya
14. Kommunufelagið
15. Krabbameinsfelagið
16. Landssjúkrahúsið
17. Loyvisnevndin
18. Psykiatriski depilin (Landssjúkrahúsið)
19. Ráðið fyri Ferðslutrygd
20. Rúni Djurhuus
21. Rúsdrekkasøla Landsins
22. SSP-ráðgevingin
23. Vága Floghavn